

# Greinasavn um SAMEINDU TJÓÐIR OG MANNARÆTTINDI

Amnesty International
Føroya deild

Høvundur og bókarheiti: Amnesty International Føroya deild
Greinasavn um Sameindu Tjóðir og Mannarættindi
© Høvundar og Fróðskapur: © Amnesty International Føroya deild og Fróðskapur
Stuðlar: Føroya Ungdómsráð og Mentanargrunnur Landsins
Umbróting, prent og innbinding: Prenta
Útgevari: Fróðskapur – Faroe University Press, Tórshavn 2009
ISBN 978-99918-65-28-7

# Greinasavn

# um

# Sameindu Tjóðir og Mannarættindi

## Evnisyvirlit:

Formæli ........................................................................................................ 5

**Herluf Sigvaldsson:** Sameindu Tjóðir ........................................................ 7

**Halgir W. Poulsen:** Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi ..... 23

**Birita Ludvíksdóttir:** Altjóða rættur og staðfesting av altjóða sáttmálum..... 41

**Birita Ludvíksdóttir:** ST-mannarættindasáttmálarnir frá 1966..................... 54

**Kristianna W. Poulsen:** CEDAW – menniskjarættindi fyri kvinnur.................. 75

**Annika Sølvará:** Sáttmálin móti píning ...................................................... 90

**Firouz Gaini:** Altjóða sáttmálin um barnarættindi....................................... 102

**Heðin D. Poulsen:** Altjóða sáttmálin um rættindi teirra brekaðu ................ 123

Orðið: “Human Rights”................................................................................ 143

Orðalisti........................................................................................................ 145

Keldulisti....................................................................................................... 148

Høvundar...................................................................................................... 159

## Formæli

Árið 2008 var sermerkt á tann hátt, at heimurin varpaði ljós á mannarættindini, ið høvdu seksti ára á baki sum Heimsyvirlýsing í Sameindu Tjóðum. Mannarættindafelagskapir, við Amnesty International á odda, nýttu høvið at seta spurningin: hvussu langt eru vit komin í stríðnum fyri at verja mannarættindini hjá menniskjum kring heimin? Eisini í Føroyum var mannarættindadagurin 10. desember 2008 hátíðarhildin. Hugskotið um at gera eitt føroyskt greinasavn um Sameindu Tjóðir og mannarættindasáttmálar kyknaði í hesum sama anda, og spurningurin, ið ritstjórarnir settu sær, var soljóðandi: Hvussu nógv vita ungir føroyingar um Sameindu Tjóðir sum stovn og skipan? Ongin ivi er um, at nýtt tilfar á føroyskum máli um Sameindu Tjóðir og mannarættindi er hart tiltrongt – ikki minst hjá teimum, ið ganga í miðnámsskúla og á hægri lærustovnum.

Henda bókin, ið her fyriliggur, er serliga ætlað teimum, ið eru á hægsta stigi í miðnámsskúlum og á byrjanarstigi á hægri lærustovnum. Tó er bókin eyðvitað ikki einans ætlað teimum, ið eru undir útbúgving. Greinasavnið er kærkomið hjá øllum, ið vilja ogna sær størri og ney
vari innlit um altjóða mannarættindaviðurskifti. Bókin viðger mannarættindi úr mentanarligum, sosialum, búskaparligum, politiskum og løgfrøðiligum sjónarhornum. Bókin er tann fyrsta av sínum slagi á føroyskum, og hon kemur sostatt at hava stóran týdning fyri almenna føroyska kjakið um mannarættindi í framtíðini. Greinirnar eru skrivaðar av føroyskum serfrøðingum, ið hava fakligar og praktiskar royndir í altjóða mannarættindaspurningum. Heldur enn at týða útlendska bókaútgávu hava vit her valt at skapt eitt sjálvstøðugt verk, ið hóskar til føroyskar lesarar og føroysk samfelagsviðurskifti anno 2009.

Átta kapitlar eru í bókini, og teir taka lesaran á ferð ígjøgnum ST-stovnin og mannarættindasáttmálarnar. Herluf Sigvaldsson, Halgir Winther Poulsen, Birita Ludvíksdóttir, Kristianna Winther Poulsen, Annika Sølvará, Firouz Gaini og Heðin D. Poulsen hava skrivað tekstirnar. Ritstjórnað hava Firouz Gaini, Jacoba Kruse og Birita Ludvíksdóttir. Elin Mortensen, fyrrverandi samskipari hjá Amnesty International í Føroyum, skal eisini nevnast her, tí hon var við í ritstjórnini fram til desember 2008, tá ið Jacoba Kruse tók yvir. Halgir Winther Poulsen, løgfrøðingur, og Kári á Rógvi, Ph.D í løgfrøði, hava við síni hollu fakligu vitan givið ritstjórnini góð ráð og viðmerkingar. Amnesty International í Føroyum gevur bókina út saman við forlagnum Fróðskapi. Til øll tey, ið ikki eru nevnd her, hóast tey hava givið eitt íkast til greinasavnið: Takk fyri stuðulin.

Nú bókin er latin úr hondum, er okkara vón, at føroyingar í øllum aldri fara at brúka verkið, so at tilvitanin um Sameindu Tjóðir og altjóða sáttmálar um mannarættindi mennist í Føroyum. Okkara mál er at fáa fólk at fata, hvussu stóra ávirkan sáttmálarnir og altjóðarættur yvirhøvur hava fyri einstaklingar, bæði í Føroyum og úti í heimi. Tað er vónleyst at stríðast fyri mannarættindum, um fjøldin ikki kennir síni rættindi. Tí er bókin ognað tykkum øllum, ið ynskja at nema vitan um rættindi tykkara sum borgarar í samfelagnum. Nú hava tit fingið fakligt tilfar um mannarættindi á føroyskum máli, og vónin er, at vit fara inn í eina framtíð við størri vitan um og virðing fyri mannarættindum í øllum londum.

Firouz Gaini
Formaður, Amnesty International í Føroyum
Tórshavn mars 2009

# Sameindu Tjóðir

*Herluf Sigvaldsson*
*Serfrøðingur í heimspolitikki*

Í hesum parti verður greitt frá søguligu gongdini fram ímóti Sameindu Tjóðum og sostatt teimum rembingum í altjóða samfelagnum, ið løgdu lunnar undir altjóða skipanina í heiminum nú á døgum. Síðan verður greitt nærri frá, hvussu Sameindu Tjóðir eru skipaðar innanhýsis í seks høvuðsstovnar við hvør sínum heimildum. Loksins verður greitt frá føroyskari luttøku í Sameindu Tjóðum.

**Søguliga gongdin fram ímóti Sameindu Tjóðum**

Okkara heimur er skipaður sum eitt altjóða samfelag við sjálvstøðugum fullveldisríkjum, ið hava eina langa og drúgva søgu við friði ella kríggi. Sameindu Tjóðir er altjóða felagsskapurin, ið hýsir øllum heimsins fullveldisríkjum.

Søgan undan Sameindu Tjóðum er merkt av mongum millumtjóða sorgarleikum. Tá ið skoðað verður aftur í søguna ber til at siga, at serstakliga fýra slíkir hava so líðandi sannført heimsins leiðarar um tær meginreglur, ið altjóða samfelagið er skipað eftir í dag.

Tríatiárakríggið frá 1618 til 1648 hevði ræðandi avleiðingar við sær í Evropa. Í tí landaøki, ið nú er Týskland doyði nærum triðingurin av øllum fólkinum, umframt at landið í stóran mun varð lagt í oyði. Sáttargerðin í Vestfalia í 1648 fevndi um friðarsáttmálarnar úr Osnabrück og Münster, har meginreglan um, at ríki eiga javnstøðu í fullveldi og meginreglan um ikki-uppílegging í innanríkispolitisk viðurskifti hvør hjá øðrum, vórðu staðfestar á fyrsta sinni.

Napoleons-kríggini frá 1803 til 1815 høvdu stórar rembingar við sær í Evropa. Søguliga verða serliga politisku rembingarnar viðgjørdar, tá ið hugsað verður um hesi kríggj, sjálvt um tey vóru ein sannur sorgarleikur fyri lond og fólk. Hóast Paríssáttmálin frá 1815 ásetti friðartreytirnar millum Frakland og ta

sjeyndu samgonguna av sameindum sigrandi londum við Bretlandi, Russlandi, Prusslandi og Eysturríki á odda, so var endaliga Evropakortið teknað av nýggjum undir Vienráðstevnuni frá 1814 til 1815.

Fyrri heimsbardagi frá 1914 til 1918 byrjaði í kjalarvørrinum av hjálandaveldisspenningi, tjóðskaparligum spenningi og búskaparligum spenningi. Í hundrað ár høvdu eingi stórkríggj verið í Evropa. Í hesum tíðarskeiði fór ein ógvislig ídnaðarmenning fram í Evropa. Harumframt var Týskland savnað saman í eitt tjóðríki og gjørdist við hesum eitt stórveldi. Fyrri heimsbardagi verður roknaður sum fyrsta stórkríggj við tøkni og vápnum, sum vórðu framleidd í kjalarvørrinum av ídnaðarkollveltingini, og av tí sama var mannfallið stórt. Versaillessáttmálin frá 1919 ásetti friðartreytirnar í sambandi við krígslok. Harumframt var undangongufelagsskapurin hjá Sameindu Tjóðum, Fólkasamgongan *(Leauge of Nations)*, sett á stovn, ið bygdi á felagstrygd. Týðandi altjóða meginreglur vóru ásettar á fyrsta sinni. Sertakliga meginreglan um, at allir altjóða sáttmálar eiga at vera almennir.

Seinni heimsbardagi frá 1939 til 1945 var av mongum roknaður sum eitt úrslit av einum Versaillessáttmála, ið var ov eyðmýkjandi fyri Týskland, umframt at Fólkasamgongan ikki hevði ta undirtøku, ið skuldi til fyri at gera hana virkisføra. Týskland segði seg úr Fólkasamgonguni í 1933, og USA var ongantíð limaríki. Harumframt var heimurin í svárari búskaparkreppu, ið legði støði undir politiskan ruðuleika kring um í Evropu og ikki minst í Týsklandi. Hitlertýskland gjørdi av ikki at virða og halda friðartreytirnar úr Verseilles longur. Eftirlætispolitikkur Bretlands og Fraklands helt fram, til Týskland leyp á Pólland í 1939. Líkt er til, at stjórnarvøldini í Bretlandi og Fraklandi tigandi samtyktu, at tað var rímiligt, at Týskland legði undir seg aftur land av "týskum uppruna". Seinni heimsbardagi hevði kollveltandi broytingar við sær fyri altjóða samfelagið og var ein sannur sorgarleikur fyri tey mongu raktu.

Í kjalarvørrinum av seinna heimsbardaga gjørdist hjálandaavtøka samsvarandi sjálvsavgerðarrætti fólkanna meginregla í verki, samstundis sum Bretland og Frakland hvurvu sum risaveldi, og USA og Sovjetsamveldið tóku yvir henda

leiklut. Altjóðarættur, diplomati og meginreglan um valdsjavnvág, ið høvdu sín uppruna í Evropa, fingu nú gildi um allan heim, soleiðis at altjóða samfelagið av evropiskum fullveldisríkjum so líðandi gjørdist altjóða samfelagið av øllum heimsins fullveldisríkjum.

Tað ber til at siga, at altjóða samstarvið, sum er grundfest í Sameindu Tjóðum, so líðandi varð ment í kjalarvørrinum av tríatiárakrígnum, Napoleons-kríggjunum, fyrra heimsbardaga og seinna heimsbardaga til tað nú er høvuðsframferðarháttur í samvirkanini ríkja millum og serstakliga innan fyri karmarnar av Sameindu Tjóðum. Tað fór fram ávikavist í Vestfalia í 1648, Vien í 1815, Versailles í 1919 og San Francisco í 1945. Úrslitini vórðu ávikavist *International Society of Europe, Concert of Europe, League of Nations* og *United Nations.*

### Sameindu Tjóðir verða settar á stovn

Stovningarsáttmáli Sameindu Tjóða *(Charter of the United Nations)* var undirritaður við fundarlok á Ráðstevnu Sameindu Tjóða fyri Altjóðafelagsskap hin 26. juni 1945 í San Francisco. Stovningarsáttmálin, ið eisini fevnir um Løgskjalið fyri Altjóða Dómstólin *(The Statute of the International Court of Justice)*, fekk gildi hin 24. oktober 1945, og hesin dagur verður hildin um allan heim sum okkara ST-dagur. Aðalfundur Sameindu Tjóða hevur síðan í fleiri førum samtykt at broyta stovningarsáttmálan.




*ST høvuðsæti í New York*

Broytingarnar, ið fingu gildi hin 31. august 1965, høvdu við sær, at limaskapurin í trygdarráðnum varð øktur úr ellivu upp í fimtan limir, at avgerðir at broyta mannagongdirnar hjá trygdarráðnum krevja í minsta lagi níggju atkvøður fyri heldur enn sjey sum frammanundan, at allar aðrar avgerðir hjá trygdarráðnum harumframt krevja, at føstu limirnir eru íroknaðir tær níggju atkvøðurnar fyri, orsakað av teirra sýtingarrætti, og at Búskapar- og Almannaráðið varð økt úr átjan uppí 27 limir. Limatalið í Búskapar- og Almannaráðnum varð eftirfylgjandi enn einaferð økt sambært broyting, ið fekk gildi hin 24. september 1973, og økingin var úr 27 uppí 54 limir.

Broytingarnar, sum fingu gildi hin 12. juni 1968, førdu við sær, at tveir triðingar av limunum á aðalfundinum saman við níggju – heldur enn sjey sum frammanundan – limum í trygdarráðnum kunnu áseta dag og stað fyri eini aðalráðstevnu millum limaríkini við tí endamáli at endurskoða sáttmálan.

Stovningarsáttmáli Sameindu Tjóða kann á mangan hátt skiljast sum "stjórnarskipan heimsins", ið altjóða samfelagið í grundregluni er skipað eftir í dag bæði politiskt og rættarliga. Sameindu Tjóðir eru sostatt politiski og rættarligi leikpallurin fyri altjóða viðurskiftum.

Altjóðapolitiski setningurin hjá Sameindu Tjóðum er staðfestur í formælinum til stovningarsáttmálan. Í formælinum veita fólkini hjá Sameindu Tjóðum í felag hvør øðrum lyfti um, at komandi ættarlið skulu sleppa undan kríggi og teim sorgarleikum, báðir heimsbardagarnir høvdu við sær. Somuleiðis verða grundleggjandi mannarættindi eins og javnrættindi á ein og hvønn hátt endurváttað. Eisini seta tey sær fyri at skapa umstøður fyri, at rættvísi og virðing fyri altjóða rætti verða uppihildin, eins og tey eru avgjørd um at fremja vælferð í størri frælsi.

Til tess at fremja nevndu lyfti eru fólkini hjá Sameindu Tjóðum avgjørd um at sýna hvør øðrum tolsemi eins og at liva saman í friði við hvønn annan sum góðir grannar. Tey eru somuleiðis avgjørd um at standa saman í mátti sínum til tess at varðveita altjóða frið og trygd, somuleiðis sum tey hava lagt seg undir altjóða

meginreglur og stovnsligt samstarv til tess at tryggja, at tey ikki vilja nýta hervald hvør móti øðrum og í felag heldur fremja felags trygd umframt framgongd hjá øllum fólkum innan búskaparlig og sosial viðurskifti.

Sameindu Tjóðir *(United Nations)* eru sambært grein 7 í stovningarsáttmála Sameindu Tjóða skipaðar innanhýsis í seks høvuðsstovnar. Teir eru Aðalfundur Sameindu Tjóða, Trygdarráðið, Búskapar- og Almannaráðið, Tilsjónarráðið, Altjóða Dómstólurin og Skrivstovan.

### *Aðalfundur Sameindu Tjóða*

Aðalfundur Sameindu Tjóða *(General Assembly of the United Nations)* kann á mangan hátt skiljast sum "heimstingið". Á aðalfundinum sita øll tey 192 limaríkini hjá Sameindu Tjóðum við hvør sínari atkvøðu. Aðalfundurin hevur setu frá september til desember mánað á hvørjum ári, ella tá ið áneyðir eru fyri tí. Ríkini kunnu í mesta lagi hava fimm umboð á fundi. Umframt limaríkini sita Vatikanið og Palestina sum eygleiðarar á aðalfundinum.




*Aðalfundur Sameindu Tjóða*

Samtyktirnar hjá aðalfundinum verða gjørdar við vanligum meiriluta. Tó verða samtyktir um tilráðingar viðvíkjandi friði og trygd umframt val av limum í trygdarráðið gjørdar við meiriluta, ið umboðar í minsta lagi tveir triðingar av limunum. Seinnu árini hevur formaðurin tó í fleiri førum roynt fundarsemju um tilráðingar við ongari atkvøðugreiðslu. Í tílíkum førum hevur formaðurin rátt seg við limirnar hvør sær frammanundan.

Einans fullveldisríki kunnu gerast limir í Sameindu Tjóðum og sostatt verða umboðað á aðalfundinum. Tó vóru Ukreina og Hvítarussland limir í Sameindu Tjóðum eitt skifti sum ósjálvstøðug ríki umframt Sovjetsamveldið sum lið í eini neyðloysn millum USA og Sovjetsamveldið í sambandi við samráðingarnar um at seta Sameindu Tjóðir á stovn. Eftir at Sovjetsamveldið var upployst, og Ukreina og Hvítarussland fingu sjálvstýri, yvirtók Russland limaskapin hjá Sovjetsamveldinum.

Til ber at siga, aðalfundurin ber brá av at vera eitt høpi, har fleirpartasamráðingar fara fram uttan enda. Sostatt er aðalfundurin ein staður, har heimsins lond umrøða, leggja politiskar ætlanir og samráðast um øll heimsins viðurskifti, ið Sameindu Tjóðir sum felagsskapur er ætlaður at viðgera. Grundleggjandi viðurskifti innan fyri altjóða rætt verða sostatt viðgjørd á aðalfundinum.

Aðalfundurin hevur í virki sínum uppgávur og heimildir, ið fevna um at umrøða og gera tilráðingar viðvíkjandi almennu meginreglunum fyri samstarvi, tá ið ræður um at varðveita altjóða frið og trygd, haruppií avvápnað; at umrøða ein og hvønn spurning viðvíkjandi altjóða friði og trygd og gera tilráðingar viðvíkjandi teimum, uttan tá ið trygdarráðið longu hevur trætuna ella støðuna til umrøðu; at umrøða við sama undantakið og gera tilráðingar viðvíkjandi einum og hvørjum spurningi innan fyri karmin av stovningarsáttmálanum ella spurningar, ið ávirka heimildir og virki hjá einum og hvørjum stovni hjá Sameindu Tjóðum.

Eisini eigur aðalfundurin at taka stig til at kanna og gera tilráðingar til tess at fremja altjóða politiskt samstarv, at menna og løgsavna altjóða rætt, at fremja mannarættindi og grundleggjandi frælsi umframt altjóða samstarv í búskapar-,

almanna-, hjálpar-, menta-, útbúgvingar- og heilsumálum; at gera tilráðingar til tess at finna friðarligar loysnir á eini og hvørjari støðu, ið kann skaða vinarlig viðurskifti millum tjóðir.

Somuleiðis eigur aðalfundurin at móttaka og umrøða frágreiðingar frá trygdarráðnum og øðrum stovnum undir Sameindu Tjóðum; at umrøða og góðkenna fíggjarætlanina hjá Sameindu Tjóðum og áseta limagjøldini hjá limaríkjunum; at velja limirnar í trygdarráðnum, ið ikki hava fastan sess, umframt limirnar í øðrum ráðum og stovnum undir Sameindu Tjóðum og at tilnevna aðalskrivaran *(The Secretary General)* eftir tilráðing frá trygdarráðnum.

Í førum, har trygdarráðið ikki megnar at taka avgerðir vegna sýtingarrættin hjá einum føstum limi í máli, har friður tykist at vera hóttur ella brotin, ella krígsstøða er íkomin, kann aðalfundurin taka málið upp á snarfundi til tess at samtykkja tilráðing at leggja fyri limirnar, so at felags tiltøk kunnu verða framd fyri at varðveita ella fáa í lag altjóða frið og trygd.

Hóast aðalfundurin ikki er heimilaður at gera bindandi tilráðingar til limirnar í altjóða málum á sínum virkisøki, so hevur aðalfundurin tó tikið stig til átøk, ið hava ávirkað milliónir av fólkum um allan heim. Dømi um týðandi aðalfundarsamtyktir eru *Millennium Declaration* frá 2000 og *World Summit Outcome Document* frá 2005.

## *Trygdarráðið*

Trygdarráðið *(Security Council)* hevur sum høvuðssetning at varðveita frið og trygd í heiminum. Heimildir trygdarráðsins eru greitt ásettar í stovningarsáttmálanum og eru íkomnar til tess at skapa einar meira virkisførar Sameindu Tjóðir, enn Fólkasamgongan nakrantíð var. Í trygdarráðnum sita teir fimm føstu limirnir USA, Russland, Bretland, Frakland og Kina, ið eru teir einastu av teimum fimtan limunum í trygdarráðnum, ið hava sýtingarrætt. Formansskapurin í trygdarráðnum skiftir mánaðarliga millum teir fimtan limirnar.

Trygdarráðið er sambært stovningarssáttmálanum evsti myndugleiki, tá ið ræður um millumtjóðakreppur, haruppií spenning og linna. Friðarfremjandi skipan Sameindu Tjóða er grundað á meginregluna um felags trygd. Tað merkir, at ríki standa saman móti ágangi, og tað kann antin sannføra tað ríkið, ið hevur ætlanir um at skipa fyri ágangi, at duga sær hógv ella skapa fyritreytirnar fyri nóg stórari hernaðarligari orku at niðurberja tað ríkið, ið skipar fyri áganginum.

Støðugt at kunna vera til reiðar at viðgera millumtjóða kreppur við sera stuttum skotbrái hevur við sær, at trygdarráðið er í grundregluni altíð mannað. Sostatt hava limaríkini í trygdarráðnum altíð sínar sendiharrar til Sameindu Tjóðir til reiðar at fara á fund. Harumframt hevur trygdarráðið eisini í nøkrum førum hildið toppfundir, har ríkisleiðarar og stjórnarleiðarar hava luttikið, og tað er vanligari og vanligari, at uttanríkisráðharrarnir manna trygdarráðið.




*Trygdarráðið á fundi í New York*

Tá ið ríki letur trygdarráðnum kæru, tí at tað metir, at friðurin er hóttur, tekur trygdarráðið sum sítt fyrsta stig at ráða avvarðandi ríkjum til at fáa semju í lag á friðarligan hátt. Í nøkrum førum tekur trygdarráðið eisini stig til at kanna málið og royna seg sum semingspart. Trygdarráðið kann eisini tilnevna serligar sendimenn ella heita á aðalskrivaran um, at hann ella aðalskrivstovan roynir semju. Trygdarráðið kann eisini áseta meginreglur fyri eini friðarligari loysn á trætuni.

Í teimum førum, tá ið ein træta endar við hernaðarligum atgerðum, tekur trygdarráðið beinanvegin stig til at fáa frið í lag. Í mongum førum hevur trygdarráðið sent út fyriskipanir um vápnahvíld, ið hava verið viðvirkandi til at forða fyri fíggindaskapi. Trygdarráðið hevur eisini sent friðarvarðveitandi herdeildir frá Sameindu Tjóðum til ófriðarlig øki til tess at linka spenningin, at skilja fíggindaherar frá hvør øðrum og at skapa umstøður fyri rógv, har friðarligar loysnir kunnu verða royndar. Trygdarráðið kann taka avgerð um tvingsilsátøk, búskaparlig revsitiltøk, eitt nú handilsstongsil ella felags hernaðarligar atgerðir.

Tá ið trygdarráðið hevur tikið stig til fyribyrgjandi átøk ella tvingsilsátøk ímóti einum limaríki, kann aðalfundurin útihýsa nevnda ríki frá at útinna síni limaskapsrættindi og framíhjárættindi eftir tilráðing frá trygdarráðnum. Aðalfundurin kann eftir tilráðing frá trygdarráðnum burturvísa einum limaríki frá Sameindu Tjóðum, ið áhaldandi hevur brotið meginreglurnar í stovningarsáttmálanum.

Eitt ríki, ið er limur í Sameindu Tjóðum, men ikki í trygdarráðnum, kann luttaka við ongum atkvøðurætti á fundi í trygdarráðum, um so er, at trygdarráðið metir, at áhugamálini hjá ríkinum eru ávirkað. Tá ið trygdarráðið viðger eina trætu millum lond, ið antin eru limir ella ikki eru limir í Sameindu Tjóðum, verða tey boðin at taka lut við ongum atkvøðurætti. Í tílíkum førum ásetur trygdarráðið treytirnar fyri luttøku hjá ríki, ið ikki er limur í Sameindu Tjóðum.

Stovningarsáttmáli Sameindu Tjóða hevur eina røð av ásetingum um at fremja frið og trygd í heiminum. Sambært grein 1 hava Sameindu Tjóðir sum aðalendamál

at uppihalda altjóða friði og trygd og tískil at taka felagsstig til tess at byrgja fyri tiltøkum, ið hava til endamáls at skapa ófrið og ótryggleika í heiminum. Tó er uppílegging í innanríkispolitisk viðurskifti hjá ríkjum bannað. Sambært grein 40 um fyribilsstig, grein 41 um tiltøk og grein 42 um valdsnýtslu hevur trygdarráðið tó heimild til at gera úrskurð um friðarhóttanir og at samtykkja nevndu tiltøk til tess at forða fyri ófriði og ótryggleika í heiminum.

Harumframt ásetir grein 43 skyldur limaríkjanna at stuðla samtyktum trygdarráðsins, og grein 48 ásetir heimildir limaríkjanna at fremja samtyktir trygdarráðsins. Uttan mun til, hvussu álvarslig kreppan er, og hvørjar avleiðingar hon kann fáa fyri friðin og trygdina í heiminum, hava føstu limaríkini í trygdarráðnum sum áður nevnt sýtingarrætt.

Friðarfremjandi tiltøk og kreppuumsiting Sameindu Tjóða fevnir um *peacekeeping,* tað er at fáa fríholt ósemjupartanna millum, *preventive diplomacy,* tað er at greina orsøkirnar til ósemjuna og virka fyri linna, *peace enforcement,* tað er hernaðarlig tiltøk til tess at fáa vápnahvíld í lag, *humanitarian intervention,* tað er at skapa "sømilig" kor hjá fólkinum í ósemjurakta landinum og *multidimensional peace operations,* tað er, at embætismenn heldur enn hermenn royna at fremja sáttargerð í ósemjurakta landinum.

### *Búskapar- og Almannaráðið*

Búskapar- og Almannaráðið *(Economic and Social Council)* er høvuðsstovnurin í Sameindu Tjóðum, tá ið ræður um at samskipa búskaparlig og sosial viðurskifti umframt annað tengt virksemi hjá teimum fjúrtan serstovnunum og virkisligu nevndunum eins og teimum fimm staðbundnu nevndunum undir Sameindu Tjóðum. Virkisøkið hjá ráðnum er av tílíkum umfevnandi slagi, at tað fevnir um góð sjeyti prosent av øllum starvsfólka- og fíggjarfæi hjá Sameindu Tjóðum.

Í Búskapar- og Almannaráðnum sita 54 limaríki við hvør sínari atkvøðu, ið aðalfundurin hevur valt fyri eitt trý ára skeið í senn við støði í einum landafrøðiligum

býti millum ymsar partar av heiminum. Ráðið tekur avgerðir við atkvøðugreiðslu, har vanligur meiriluti ræður.

Búskapar- og Almannaráðið hevur vanliga eina fimm til seks viku langa evnisliga setu um árið, aðruhvørja ferð í ávikavist New York og Geneve, umframt eina skipanarliga setu í New York. Undir evnisligu setuni er eisini ein serfundur á høgum stigi, har ráðharrar og høgir embætismenn luttaka til tess at viðgera búskapar- og almannamál av stórum týdningi.

Búskapar- og Almannaráðið fremur sítt starv í undirskipaðum eindum eitt nú nevndum og umboðum, ið hava reglubundnar fundir, har frágreiðingar verða tilevnaðar og lætnar ráðnum. Tað ráðførir seg samsvarandi stovningarsáttmála Sameindu Tjóða við ikki-stjórnarfelagsskapir, ið hava áhuga í málum innanfyri málsræði ráðsins. Tað viðurkennir, at hesir felagsskapir eiga at fáa høvi til siga frá sínum sjónarmiðum, serstakliga tí at teir eiga serroyndir ella tøkniligan kunnleika, ið eru virðismett fyri virksemið hjá ráðnum.

Góðir 2.100 ikki-stjórnarfelagsskapir *(NGO's)* hava fingið ráðgevandi støðu hjá Búskapar- og Almannaráðnum. Felagsskapirnir flokka seg í trý, har summir hava áhuga í virkseminum hjá ráðnum sum heild, aðrir hava áhuga í virkseminum hjá ráðnum á serstøkum økjum samsvarandi sínum serførleika, og aftur aðrir hava listað seg tøkar at lata sítt íkast fyrifallandi til ráðið og undirskipaðu eindir tess ella aðrar stovnar í Sameindu Tjóðum.

Ikki-stjórnarfelagsskapir, ið hava ráðgevandi støðu, kunnu senda eygleiðarar á almennar fundir í Búskapar- og Almannaráðnum umframt undirskipaðu stovnar tess og kunnu í tílíkum førum lata inn skrivligar frágreiðingar, ið eru viðkomandi fyri virksemi ráðsins. Somuleiðis kunnu teir ráðføra seg við skrivstovu Sameindu Tjóða um mál av felags áhuga.

Samanumtikið kann verða sagt um Búskapar- og Almannaráðið, at tað er miðstaðurin fyri øllum altjóða orðaskifti um búskapar- og almannamál, ið eru av heimsfevnandi ella tvørnámsligum slagi, og somuleiðis staðurin, har tilráðingar

verða orðaðar viðvíkjandi málum, ið verða stílað til limaríki og Sameindu Tjóðir.

Eisini ger ella tekur Búskapar- og Almannaráðið stig til rannsóknir og frágreiðingar og tilevnar somuleiðis tilráðingar um altjóða mál av búskapar-, almanna-, menta-, útbúgvingar- og heilsuligum slag umframt mál innanfyri onnur atknýtt øki. Tað virkar fyri, at mannarættindi og grundleggjandi frælsi verða vird og hildin, eins og tað kallar saman til altjóða ráðstevnur og fyrireikar uppskot til sáttmálar at leggja fram á aðalfundinum í málum, sum koma undir málsræðið hjá fundinum.

Somuleiðis samráðist Búskapar- og Almannaráðið um sáttmálar við serstovnarnar, ið áseta viðurskifti teirra við Sameindu Tjóðir. Tað samskipar virksemið hjá serstovnunum við at ráðføra seg við teir og gera tilráðingar til teir umframt tilráðingar til aðalfundin og limirnar í Sameindu Tjóðum.

Loksins fremur Búskapar- og Almannaráðið tænastur til limirnar í Sameindu Tjóðum, ið eru góðkendar av aðalfundinum, umframt tænastur til serstovnarnar eftir áheitan. Tað ráðførir seg við ikki-stjórnarfelagsskapir, ið fáast við mál, sum eru á skrá hjá ráðnum.

### *Tilsjónarráðið*

Tilsjónarráðið *(Trusteeship Council)* var skipað sum innanhýsis høvuðsstovnur til tess at hava umsjón við umsitingini av tilsjónarumveldum *(Trust Territories)*, ið vóru sett undir tilsjónarskipanina *(Trusteeship System)* hjá Sameindu Tjóðum. Í tilsjónarráðnum sita teir fimm føstu limirnir í trygdarráðnum USA, Russland, Bretland, Frakland og Kina.

Tilsjónarumveldini vóru antin undir yvirræði ásettum av Fólkasamgonguni eftir fyrra heimsbardaga, umveldi, ið vóru atskyld frá fíggindaríkjum í sambandi við seinna heimsbardaga, ella umveldi, sum avvarðandi ríki við frælsum vilja høvdu sett undir tilsjónarskipanina hjá Sameindu Tjóðum.

Aðalmálið við tilsjónarskipanini var at fremja politiskan, búskaparligan, útbúgvingarligan og sosialan framburð hjá fólkunum í tilsjónarumveldunum umframt eina menning stig fyri stig ímóti sjálvstýri ella sjálvstøðu. Tilsjónarumveldini vóru upprunaliga ellivu í tali, og tey eru øll antin farin saman við grannaríkjum ella vorðin sjálvstøðug ríki. Sigast kann, at skipanin er sostatt framd í verki.

Tá ið Palau gjørdist sjálvstøðugt ríki í 1994, vóru ikki fleiri tilsjónarumveldi eftir. Tískil avgjørdi tilsjónarráðið í 1994 at broyta sínar mannagongdir og steðga sínum virksemi og árligu fundum. Nú hevur tað einans fund eftir avgerð ráðsins ella formansins ella eftir umbøn frá trygdaráðnum, aðalfundinum ella einum meiriluti av ráðnum um áneyðir eru fyri at halda fund.

### *Altjóða Dómstólurin*

Altjóða Dómstólurin *(International Court of Justice)* er rættarligi høvuðsstovnur Sameindu Tjóða og kann á mangan hátt skiljast sum heimsrætturin. Hann hevur sæti sítt á friðarborgini í Haag í Niðurlondum og yvirtók leiklutin hjá Fasta Altjóða Dómstólinum *(Permanent Court of International Justice)*. Sostatt heldur dómstólurin til uttan fyri New York sum einastur av teim seks høvuðsstovnum Sameindu Tjóða. Í dómstólinum sita fimtan dómarar, ið aðalfundurin og trygdarráðið hava valt í eitt níggju ára skeið. Almennu mál dómstólsins eru enskt og franskt.

Altjóða Dómstólurin hevur sum aðalsetning at fáa semju í lag í løgfrøðiligum trætum samsvarandi altjóða rætti, sum ríki í semju hava lagt fyri hann at gera úrskurð um, antin sambært serligum sáttmála, áseting í altjóða sáttmála ella einvísari yvirlýsing. Millum tey 192 limaríkini í Sameindu Tjóðum hava 66 teirra viðurkent løgdømið hjá dómstólinum við einvísari yvirlýsing sum bindandi antin fyri øll mál ella eina avmarkaða røð av málum, ella í avmarkaða tíð og somuleiðis treytað av, at avvarðandi ríki, sum av eintingum fer í dómstólin við

máli, somuleiðis hevur framt slíka viðurkenning. Úrskurðir hjá dómstólinum eru endaligir og bindandi fyri avvarðandi ríki og kunnu ikki kærast. Tó kann eitt ríki, ið heldur seg vera fyri órøttum dómi, heita á dómstólin um at endurskoða dómin, um nýggjar próvgrundir eru komnar undan kavi, ið eru avgerandi fyri málið.

Dómstólurin hevur eisini sum setning at gera ráðgevandi úrskurð í løgfrøðiligum spurningum, ið høvuðsstovnar og serstovnar Sameindu Tjóða leggja fyri hann.

Hinvegin kann dómstólurin á ongan hátt taka mál upp til máls hjá einstaklingum, vinnufeløgum ella felagsskapum av einstaklingum ella vinnufeløgum, uttan so at heimaríki teirra samsvarandi altjóða rætti tekur málið upp til máls ímóti øðrum ríki, ið hevur framt órætt ímóti teimum. Ei heldur kann dómstólurin sum so taka mál upp til máls, ið hava við brot á mannarættindi at gera ella brotsverk ímóti mannaættini. Í tílíkum førum hevur altjóða samfelagið sett á stovn serdómstólar, eitt nú í sambandi við sorgarleikirnar í Jugoslavia og Rwanda.

Altjóða Dómstólurin hevur eina fasta fyrisiting undir heitinum *Registry,* ið fyrireikar øll mál til rættarviðgerð og avgreiðir tey eftir úrskurð. Á odda fyri hesi fyrisiting er ein stjóri undir starvsheitinum *Registrar* við umleið hundrað embætismonnum.

Nú Altjóða Dómstólurin umframt at vera ein dómstólur eisini er ein altjóða stovnur, tekur fyrisiting hansara sær av málum, ið eru bæði av rættarligum, diplomatiskum og fyrisitingarligum slagi. Embætismenninir í fyrisitingini hava tískil bæði diplomatisk rættindi og órin, eins og hjá diplomatiska liðnum á staðnum, og eru annars undir somu setanartreytum eins og hjá teimum í New York.

## *Skrivstovan*

Skrivstovan *(The Secretariat)* er sjálvt fyrisitingarliga kervið í Sameindu Tjóðum og tænir í virki sínum hinum innanhýsis høvuðsstovnunum eins og hon situr fyri skráum og stevnum, ið teir hava samtykt. Aðalskrivarin stjórnar skrivstovuni, ið er mannað við einum altjóða liði av starvsfólkum uppá umleið 8.900 fólk,

ið burtur av skulu røkja áhugamálini hjá Sameindu Tjóðum og einans hava sín trúskap har. Somuleiðis hava limaríkini bundið seg til ikki á nakran hátt at ávirka aðalskrivaran og starvsfólk hansara í virki teirra til tess at fremja tjóðskaparligu áhugamál síni. Aðalfundurin tilnevnir aðalskrivaran eftir tilráðing frá trygdarráðnum fyri eitt fimmáraskeið í senn, sum kann verða longt.


©UN Photo/P Klee

*ST skrivstovan í Geneve*

Skrivstovan hevur høvuðssæti í New York og hevur harumframt dyggiliga umboðan í Addis Ababa, Bangkok, Beirut, Geneve, Nairobi, Santiago og Vien, umframt at hon eisini hevur aðra umboðan kring um í heimi. Skrivstovan tekur sær av øllum málum hjá Sameindu Tjóðum, alt frá at umsita friðarvarðveitandi tiltøk og atgerðir til at royna seg sum semingspart í altjóða ósemjum, at meta um rákið í búskaparligum og sosialum málum og til at fyrireika kanningar viðvíkjandi mannarættindum og sjálvberandi menning, at kunna fjølmiðlar heimsins um virksemið hjá Sameindu Tjóðum, at skipa fyri altjóða ráðstevnum um mál av heimsfevnandi áhuga eins og at tulka røður og at umseta skjøl til tey seks almennu málini hjá Sameindu Tjóðum, sum eru enskt, franskt, spanskt, russiskt, arabiskt og kinverskt.

## Føroyar í Sameindu Tjóðum

Grundleggjandi eindirnar í altjóða samfelagnum eru fullveldisríki. Í síni altjóða politisku samvirkan skapa tey altjóða rætt antin algilt í siðvenjurætti ella í sáttmálarætti, tá ið tveyparta ella fleirparta, haruppií heimsfevnandi sáttmálar, verða gjørdir eins og stovningarsáttmáli Sameindu Tjóða.

Sum áður umrøtt eru Sameindu Tjóðir einans fyri sjálvstøðug ríki, og Føroyar eru sostatt ikki limir har. Hinvegin fevnir danski limaskapurin í Sameindu Tjóðum eisini um Føroyar, og á tann hátt fevna Sameindu Tjóðir um Føroyar, ikki sum limaríki, men sum knýttar aftur at Danmarkar Kongsríki í limaskapi sínum.

Í Sameindu Tjóðum hava Føroyar higartil luttikið í donskum sendinevndum upp á tríggjar ymsar hættir. Føroyskir tingmenn hava nú í nøkur ár luttikið á aðalfundum sum partur í donsku sendinevndini, tveir á hvørjari setu og ein hvørja ferð. Áðrenn Føroyar fingu sín fyrsta uttanríkisráðharra í 2008, hava løgmenn á tvær ferðir luttikið á aðalfundum sum partur í sendinevndini hjá danska uttanríkisráðharranum og á einum sinni á fundi í trygdarráðnum, seinast Danmark var limur har. Føroyskir embætismenn hava stundum luttikið sum partur í donskum sendinevndum á fundum í Sameindu Tjóðum í sambandi við, at frágreiðingar um føroysk viðurskifti eru gjørdar og kannaðar eftir altjóða sáttmálum undir eftirliti Sameindu Tjóða.

Hóast Føroyar ikki eru limir í Sameindu Tjóðum í egnum navni, so hevur siðvenjan um eygleiðarastøðu í egnum navni vunnið sær frama fyri sjálvstøðug lond eins og ósjálvstøðug lond í skipanini hjá Sameindu Tjóðum.

Tað verður tó sett fram sum treyt, at lond, ið ætla at søkja sær eygleiðarastøðu í Sameindu Tjóðum í egnum navni, skulu í minsta lagi verða limir ella atlimir í einum serstovni undir Sameindu Tjóðum. Føroyar lúka hesa treyt sum atlimir í egnum navni í trimum serstovnum undir Sameindu Tjóðum. Teir eru Altjóða Sjóferðslufelagsskapurin *(International Maritime Organization - IMO)*, Altjóða Mat- og Landbúnaðarfelagsskapurin *(Food and Agriculture Organization - FAO)*

og Felagsskapur Sameindu Tjóða fyri Útbúgving, Vísindi og Mentan *(United Nations Educational, Scientific and Cultural Organization - UNESCO)*.

Í løtuni hava sum áður nevnt tvey lond eygleiðarastøðu í egnum navni í Sameindu Tjóðum. Tey eru Vatikanið og Palestina. Tað fyrra er sjálvstøðugt, og tað seinna er ósjálvstøðugt.

# Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi

*Halgir Winther Poulsen,*
*Løgfrøðingur*

Tann 10. desember 1948 samtykti aðalfundur Sameindu Tjóða Heimsyvirlýsingina um mannarættindi *(The Universal Declaration of Human Rights)*. Sama dag tók aðalfundurin undir við, at hetta var ein søgulig hending, ið fór at stuðla undir heimsfriðin og frígera menniskju frá kúgan.

Aðalfundurin heitti á limalondini um at almannakunngera yvirlýsingina og breiða kunnleikan um hana út so víða sum gjørligt, serliga í skúlum og øðrum undirvísingarstovnum. Aðalskrivarin varð samstundis biðin um at hava umsorgan fyri, at yvirlýsingin varð kunngjørd á flest møguligum málum.

Aðalfundurin ásannaði, at hetta bert var byrjanin til eina altjóða mannarættindalóggávu, og heitti tí á Búskapar- og Almannaráðið (*The Economic and Social Council*) um at halda fram við arbeiðinum at orða eitt uppskot til ein bindandi sáttmála um mannarættindi við útinningarreglum.

Við hesum samtyktunum varð skjøtul settur á tað umfatandi og á mangan hátt kollveltandi arbeiðið, ið ST síðan hevur staðið fyri, og sum hevur ført til ein hóp av altjóða sáttmálum um mannarættindi, eitt arbeiði, ið støðugt heldur fram, og sum hevur til endamáls at tryggja rættindi teirra, sum á ymsan hátt eru við undirluta.

Dagurin 10. desember hevur síðan 1950 verið hildin um allan heimin sum Altjóða mannarættindadagur.

**Frá Stovningarsáttmála Sameindu Tjóða til Heimsyvirlýsingina**

Tann 6. januar 1941 helt amerikanski forsetin, Franklin Roosevelt, eina røðu í amerikonsku kongressini, har hann eggjaði til stuðul í bardaganum móti Nazi-Týsklandi, og har hann ímyndaði sær ein heimsfrið, ið bygdi á fýra grundleggjandi frælsi: talu- og trúarfrælsi, frælsi frá neyð og frælsi frá ótta. Seinni sama ár, tann 14. august, kunngjørdu Roosevelt og Churchill í sonevnda Atlantsskjalinum teirra hugmynd av heiminum eftir, at bardagin var lokin, ið skuldi byggja á somu grundleggjandi virði. Tann 1. januar 1942 váttaðu 24 lond, ið nevndu seg Sameindu Tjóðirnar, at tey tóku undir við Atlantsskjalinum, og at tey tóku undir við bardaganum móti "Hitlerismuni". Frá juni 1942 til mars 1945 tóku 19 lond afturat undir við hesi váttan. Tað vóru hesi virði, ið gjørdust grundstovnurin í fyrireikingunum av tí heimsstovni, ið skuldi standa fyri nýskipan av heiminum eftir bardagalok.

Frá 21. august til 7. oktober 1944 samráddust umboð fyri USA, Stórabretland, Sovjettsamveldið og Kina um komandi heimsstovnin og komu ásamt um grundleggjandi reglurnar, ið vórðu sendar sameindu londunum til umhugsunar. Næsti fundurin varð hildin í Jalta í februar 1945, har samtykt varð at boða til nýggjan fund í San Francisco tann 25. apríl 1945 til fyrireiking av stovningarsáttmála Sameindu Tjóða. Á hesum fundinum møttu umboð fyri 50 lond, ið á ymsan hátt høvdu tikið lut í stríðinum móti Týsklandi og Japan. Tann 26. juni 1945 skrivaðu tey undir stovningarsáttmála Sameindu Tjóða (*The Charter of the United Nations*).

***Stovningarsáttmálin og mannarættindi***

Á fundunum at fyrireika stovnanina av Sameindu Tjóðunum (ST) og skriva stovningarsáttmála møttu, umframt stjórnarumboðini, fleiri hundrað felagsskapir og privatfólk, ið kravdu, at mannarættindareglur skuldu vera ein partur av sjálvum stovningarsáttmálanum. Hetta varð kortini ikki eftirlíkað, men í staðin varð í sjálvum skjalinum víst til mannarættindi, og tann 15. februar 1946 stovnaði Búskapar- og Almannaráðið eina Mannarættindakommissión (*Commission on Human Rights*).




*Mannarættindakommisiónin á fundi í Geneve*

ST stovningarsáttmálin er ein altjóða sáttmáli, ið er løgfrøðiliga bindandi fyri limaríkini. Hesi vóru við stovnan 50 í tali og eru nú 192.

Í stovningarsáttmálanum eru hesar reglur um mannarættindi:

Sambært formælinum (*the Preamble*) er eitt av endamálunum hjá Sameindu Tjóðum at "endurvátta trúnna á undirstøðulig mannarættindi, sóma og virðið hjá tí einstaka menniskjanum, javnrættindi hjá monnum og kvinnum og hjá øllum tjóðum, stórum sum smáum".

Í 13. grein er m.a. ásett, at "Aðalfundur Sameindu Tjóða skal seta í verk kanningar og gera tilmæli til at fremja altjóða samstarv um búskaparlig, sosial, mentunarlig, undirvísingarlig og heilsulig viðurskifti, og stuðla fremjingina av mannarættindum og undirstøðuligum frælsi fyri øll, uttan mun til ættarslag, kyn, mál ella átrúnað".

55. grein er soljóðandi: "Við tí endamáli at skapa ta trygd og vælferð, sum er ein fortreyt fyri friði og vinalag millum tjóðir grundaðar á virðing fyri grundregluni um javnrættindi og sjálvsavgerðarrætt fólkanna, skulu Sameindu Tjóðirnar fremja:

a. hægri livistandard, arbeiði fyri øll og fortreytir fyri fíggjarligari og sosialari framgongd og framburði,
b. loysnir av altjóða fíggjarligum, sosialum, heilsuligum og líknandi trupulleikum, og
c. almenna virðing fyri mannarættindum og at tey verða hildin, eins og undirstøðuligum frælsi fyri øll, uttan mun til ættarslag, kyn, mál ella átrúnað".

Sambært 62. grein er ein av uppgávunum hjá Búskapar- og Almannaráðnum at "koma við tilmælum, sum hava til endamáls at fremja virðing fyri mannarættindum og undirstøðuligum frælsi fyri øll, og at tey verða hildin". Ráðið skal eisini, sambært 68. grein, skipa nevndir fyri búskapar- og almannamál og nevndir at fremja mannarættindi.

Sambært 76. grein er ein av høvuðsuppgávunum hjá umsjónarskipanini fyri hjálond at "eggja til virðing fyri mannarættindum og undirstøðuligum frælsi fyri øll, uttan mun til ættarslag, kyn, mál ella átrúnað, og at eggja til viðurkenning av, at øll heimsins fólk eru bundin hvørt at øðrum".

**Heimsyvirlýsingin – søgulig lýsing**

Mannarættindakommissiónin, ið sum nevnt er tann einasta ST nevndin, ið er beinleiðis nevnd í Stovningarsáttmálanum, fekk til uppgávu at fyrireika eina altjóða lóggávu um mannarættindi. Nevndin hevði 18 limir og helt sín fyrsta fund

í byrjanini av 1947. Ein arbeiðsnevnd varð sett til at fyrireika arbeiðið.

Nógv tilfar var at taka av. Uppskot vóru komin frá fleiri londum og mannarættindafelagsskapum úr øllum heiminum. Fyrst mátti støða takast til løgfrøðiliga skapið. Umboð fyri fleiri lond vildu hava ein løgfrøðiliga bindandi sáttmála, meðan onnur heldur vildu hava eina yvirlýsing, ið ikki var formliga bindandi. Nevndarformaðurin Eleanor Roosevelt loysti hendan knútin við at fáa semju um, at skrivast skuldu bæði ein yvirlýsing og ein sáttmáli. Hetta varð samtykt.

Í desember 1947 var arbeiðsnevndin komin so langt áleiðis, at eitt uppskot kundi sendast til limaríkini til viðmerkingar. Nevndin møttist aftur í mai 1948 at viðgera tær innkomnu viðmerkingarnar. Tann 18. juni var Mannarættindakommissiónin liðug við arbeiðið og sendi uppskotið til Búskapar- og Almannaráðið. Eftir at limalondini høvdu havt høvi at koma við fleiri viðmerkingum, var uppskotið sent Aðalfundi Sameindu Tjóða. Uppskotið varð viðgjørt í einari serligari nevnd, sum eftir at hava viðgjørt 168 broytingaruppskot á 81 fundum, tann 6. desember 1948 samtykti at senda uppskotið til aðalfundin til endaliga støðutakan.

Eftir drúgva viðgerð samtykti Aðalfundur Sameindu Tjóða Heimsyvirlýsingina seint á kvøldi tann 10. desember 1948. Atkvøtt varð fyrst um tær 30 greinirnar, grein fyri grein. At enda varð øll yvirlýsingin samtykt við 48 atkvøðum fyri og ongari ímóti. 8 atkvøddu ikki, og umboð fyri tvey limalond vóru ikki møtt.

Tað var ikki nøkur løtt uppgáva, Mannarættindakommissiónin hevði fingið. Tí var tað eitt bragd at fáa hesa heimsyvirlýsing samtykta ”sum felags mið fyri øll fólk og allar tjóðir”, sum staðfest í formælinum.

Tá Heimsyvirlýsingin varð samtykt av aðalfundi Sameindu Tjóða var vanliga uppfatanin, at talan var um eina løgfrøðiliga óbindandi samtykt. At sjálvt um Heimsyvirlýsingin hevði stóran týdning, sum altjóða viðurkendi karmurin um tey rættindi, einstaka menniskjað hevur krav um mótvegis myndugleikunum, so var talan ikki um løgfrøðiliga bindandi altjóða rætt.

Tó vóru eisini tey, ið førdu fram, at ST limalondini við at ganga undir stovningarsáttmálan, ið er bindandi altjóða sáttmáli, eisini góðkendu mannarættindini, ið eru staðfest í sáttmálanum. Tí eigur Heimsyvirlýsingin at skiljast sum góðkenda tulkingin av, hvørji hesi rættindi eru. Sambært hesi fatan er Heimsyvirlýsingin eins bindandi fyri limaríkini, sum sjálvur stovningarsáttmálin er.

Ein triðja fatan, sum nógv rættarlærd taka undir við, er, at hóast Heimsyvirlýsingin, tá hon varð samtykt, ikki var bindandi, hevur hon við tíðini fingið bindandi støðu sum altjóða siðvenjurættur, av tí at hon øll hesi árini er vorðin alment viðurkend bæði av altjóða samfelagnum og í tjóðarrætti hjá flestøllum heimsins londum.

Eftir at yvirlýsingin var samtykt, helt arbeiðið við at skapa formliga bindandi altjóða reglur um mannarættindi fram. Upprunaliga var ætlanin at skipa hesar reglur í ein sáttmála, men úrslitið gjørdist tveir sáttmálar, ein um borgaralig og politisk rættindi, og ein um búskapar-, almanna-, og mentanarrættindi. Hesir sáttmálar vóru í høvuðsheitum endaliga orðaðir í 1955, men ikki samtyktir av aðalfundi Sameindu Tjóða fyrr enn tann 16. desember 1966. Báðir sáttmálarnir fingu gildi í 1976, tá 35 lond høvdu tikið undir við teimum, sum var ásetta treytin fyri gildiskomu. Meðan vanliga enska heitið á altjóða sáttmálum er *Conventions*, hava hesir báðir sáttmálarnir fingið tað heldur hátíðarliga heitið *Covenants*. (Semingar á føroyskum).

## Mannarættindi – hvussu skulu tey skiljast?

Heimsyvirlýsingin og teir báðir semingarnir mugu sigast at vera eitt gjøgnumbrot í arbeiðinum at orða og tryggja hesi rættindi, bæði í tjóðskaparligum og altjóða samanhangi. Tó hava hugmyndir um rættindi hins einstaka djúpar søguligar røtur.

Tær tríggjar heimsumfevnandi religiónirnar hava allar íbornar tankar um virðið av tí einstaka menniskjanum, ið peika sama veg sum nútímans

mannarættindahugsjónir, men hinvegin skerst ikki burtur, at søgan hevur nógv dømi um vantandi tollyndi mótvegis teimum, ið vórðu skýrd trúarvillingar av ymiskum grundum. Tey blóðigu trúarstríðini bera ikki júst boð um virðing fyri hugsanar- og talufrælsi.

Tann beinleiðis orsøkin til, at ST setti mannarættindi ovarlaga á dagsskránna, var fasistisk-nazistiski yvirgangurin og fólkadrápini undir heimsbardaganum. Tað var skelkandi, at tílíkur yvirgangur skuldi gerast veruleiki júst í Europa, hvørs søga annars kann vísa á nógv dømi um humanistar sum John Locke, Jean-Jacques Rosseau, Thomas Paine og aðrar, ið, eins og amerikanarin Thomas Jefferson, viðgjørdu viðurskiftini millum einstaklingin og myndugleikarnar og vóru undangongumenn í stríðnum fyri rættindum einstaklingsins. Søgulig grundvallarskjøl sum enska Bill of Rights frá 1689, amerikanska frælsisyvirlýsingin frá 1776 og franska yvirlýsingin um rættindi menniskjans og borgarans frá 1789 mugu nevnast í hesum sambandi.




*Elenor Roosevelt við einum eintaki av heimsyvirlýsingini 1. november 1949*

Tað er einki at taka seg aftur í, at Heimsyvirlýsingin var eitt ómetaliga stórt frambrot í teirri longu søgugongd, ið førdi við sær støðugt størri undirtøku fyri tí sjónarmiði, at tað einstaka menniskjað hevur virði í sær sjálvum og eigur at verða vart móti yvirgangi bæði frá myndugleikum og øðrum. Løgfrøðiliga sæð er yvirlýsingin tað mest umfevnandi mannarættindaskjalið, ið hevur fingið almenna undirtøku frá altjóða samfelagnum, umboðað av teimum tjóðum, ið sum limir í ST hava váttað stovningarsáttmálan.

Tað ber tí helst til at siga, at tey rættindi, ið lýst eru í Heimsyvirlýsingini, eru tey, ið koma næst í huga, tá spurt verður, hvat galdandi mannarættur er í dag.

**Heimsyvirlýsingin, ein gjøgnumgongd**

Ætlanin er ikki at skipa tey rættindi, ið yvirlýsingin staðfestir, í nakra stigskipan eftir týdningi. Øll mannarættindi eru eins týdningarmikil, og tað ber ikki til at siga, at hesi ella hasi rættindi kunnu vit vera fyriuttan, bert vit hava onnur rættindi, sum vit kanska í løtuni meta ómissandi.

Hinvegin ber illa til at gjøgnumganga yvirlýsingina uttan at hava onkra skipan at ganga eftir. Vit kunnu t.d. velja at skipa rættindi, ið natúrliga "hoyra saman", í bólkar, sum verða viðgjørdir undir einum.

***Javnrættur og mismunur***

Grein 1 sigur, at "øll menniskju eru født fræls og jøvn til virðingar og mannarættindi. Tey hava skil og samvitsku og eiga at fara hvørt um annað í bróðuranda."

Stór ósemja var um hesa greinina. Gjørt varð m.a. galdandi, at talan var um óítøkiligar orðingar av hugspekiligum og átrúnaðarligum slag, sum ikki hoyrdu heima í einum skjali, ið var ætlað at stovna verulig rættindi, ið kundu handhevjast. Hinvegin varð ført fram, at tað var alneyðugt, at Sameindu Tjóðirnar av nýggjum boðaðu mannaættini hesar grundreglur, ið høvdu verið nærum týndar av fasismunnar andstyggiligu læru.

Ósemja var eisini um orðingina. Upprunaliga orðingin var: "*All men are born free and equal* ....". Bodil Begtrup úr Danmark, sum umboðaði nevndina fyri kvinnurættindum, skeyt upp, at hetta varð broytt til: "*All human beings are born free and equal*....", og hon varð stuðlað av einum øðrum kvinnuligum umboði úr India. Úrslitið gjørdist ikki frægari enn, at samtykt varð ein viðmerkingum um, at orðið "*men*" sipaði til "*all human beings*".

Næstu ferð bar betur til. Í januar 1948 kom nevndin fyri kvinnurættindi við tveimum broytingaruppskotum, nevniliga at "*men*" varð broytt til "*human beings*" og at "*like brothers*" varð broytt til "*in a spirit of brotherhood*". Eisini varð skotið upp, at orðini "*and sisters*" varð skoytt uppí orðini " *like brothers*", men hetta varð hildið óneyðugt til at fyribyrgja mismuni vegna kyn.

Úrslitið gjørdist, at endaliga orðingin av grein 1 varð: "*All human beings are born free ... and should act towards one another in the spirit of brotherhood".*

Grein 2, 1. petti ljóðar:"Øll hava krav um rættindi og frælsi, sum eru nevnd í hesi yvirlýsing, uttan mun til ættarslag, húðarlit, kyn, átrúnað, politiska ella aðra sannføring, tjóðskaparligan ella samfelagsligan uppruna, ognarviðurskifti, burð ella aðra støðu."

Í royndum eru tey ringastu mannarættindabrotini ofta grundað á mismun av ymiskum slagi. Hetta er ein søgulig sannroynd, og støðan er tann sama í dag. Henda greinin, har bann verður sett fyri øllum tílíkum mismuni, er tí av grundleggjandi týdningi fyri allar mannarættindareglur. Samsvarandi orðingar eru at finna í so gott sum øllum mannarættindasáttmálum, ið gjørdir eru síðan Heimsyvirlýsingin varð samtykt.

***Lív, frælsi og trygd***

Hetta eru rættindi, ið so at siga verja um okkara likamligu tilveru. Teirra millum eru rættur til lív, frælsi og persónliga trygd (3. grein), frælsi frá píning ella vanæruligari viðferð (5. grein), og rættur til frítt at fara (13. grein).

Rætturin til lív, frælsi og persónliga trygd hevur nært samband við forboðið móti píning og vanæriligari viðferð ella revsing. Hesar reglurnar eru settar sum verja fyri einstaka menniskjað móti yvirgangi og tilvildarligari viðferð frá myndugleikunum. Tað land, ið ikki hevur lógir, ið banna manndrápi ella veita sínum myndugleikum undantak frá revsing fyri manndráp, lýkur ikki sínar skyldur. Tveir umstríddir spurningar mugu verða nevndir í hesum sambandi. Annar er fosturtøka, har gjørt

kann verða galdandi, at lív byrjar við gitnaði, og at fostrið sostatt hevur somu verju sum fullborið lív. Av mannarættindasáttmálum er tað bert tann amerikanski, ið ásetir, at lívið skal verða vart "vanliga frá gitnaði". Flestu lond í Europa loyva fosturtøku við ávísum treytum.

Hin spurningurin er deyðarevsing, ið framvegis er í gildi í 60 londum, meðan 137 lond hava avtikið hesa revsing, annaðhvørt í lóg ella í verki. Hóast Heimsvirlýsingin ikki beinleiðis setir forboð fyri deyðarevsing, skuldi tað verið rímiligt at hildið, at rætturin til lív sambært 3. grein skuldi vart einstaklingin móti at verða tikin av døgum av landsins myndugleikum. Hetta er tó ikki vanlig hugsan. Altjóða semingurin um borgaralig og politisk rættindi hevur í grein 6 reglur, ið hava til endamáls at avmarka deyðarevsing mest møguligt, men bannar hinvegin ikki deyðarevsing.

Rætturin til persónliga trygd og frælsi frá píning ella vanæriligari viðferð hava samband við rættartrygd og verju móti tilvildarligari handtøku, fongsling og revsing. Hetta eru rættindi, ið verða hildin at vera sjálvsøgd í einum vælskipaðum rættarsamfelagi, og sum eru gjøllari staðfest í revsilóg og rættargangslóg.

Hjá tí kúgaða er evsta loysnin at rýma av landinum. Av somu grund er tað ikki óvanligt at myndugleikarnir í tílíkum londum royna at forða fólki at fara. Frælsi til frítt at búsetast og fara innan landamark, eins og at fara av landinum og koma heimaftur, er tryggjað í 13. grein.

Hóast talan ikki er um álvarslig brot á hesi rættindi, eru tvær lógir galdandi í Føroyum, ið helst eru á markinum.

Sambært lógini um "hegn og markfred" frá 1937 fært tú bót, gongur tú í haga, har tú ikki ert eigari. Somuleiðis skal tann, sum hevur landsjørð í festi, hava bústað sín á somu oyggj, sum festið er. Hetta er ásett í løgtingslóg um landsjørð frá 2007. Hesar reglur lúka neyvan treytirnar í grein 29 í Heimsyvirlýsingini um avmarkingar av rættindum, ið skulu vera ásettar í lóg "við tí í hyggju at tryggja viðurkenning av og virðing fyri frælsi og rættindum hjá øðrum, og til

tess at lúka rættvís krøv um siðalag, alment skil og vælferð almenningsins í fólkaræðissamfelag." Í minsta lagi átti tað ikki at verið lógarbann fyri, at gingið kann verða á friðarligan hátt á tí helminginum av jørðini, ið er fólksins ogn.

## *"Føði og klæði, hús og heim"*

Næst eftir lívi, frælsi og trygd hava menniskju tørv á føði, innivist, familju og heilsu. Grein 25 sigur, at "Ein og hvør hevur rætt til lívsumstøður, ið tryggja honum og hansara heilsu og vælveru, har uppi í mat, klæði, bústað og heilsurøkt og almennar tænastur og rætt til trygd við møguligum arbeiðsloysi, sjúku, óarbeiðsføri, missi av maka, aldri ella aðrari skerjing av vinnumøguleikum orsakað av umstøðum, sum hann ikki hevur ræði á.
Møður og børn hava krav um serliga umsorgan og hjálp. Øll børn, annaðhvørt tey eru fødd í hjúnalagi ella uttan, njóta somu almannavernd".




*Heimleysar kvinnur og børn á Busian Evacitaion Centre í Filipinunum*

Tey flestu kunnu óivað skjótt semjast um, at hesi orð, skrivað fyri seksti árum síðan, mugu hava tykst teimum flestu samtíðarmenniskjum sum veruleikafjarir dreymar um ein fullkomnan heim og lítið hevði felags við samtíðar heimin, sum enn lá í skeljasori aftaná heimsbardagan. Vit, sum lesa hesi somu orð í dag, mugu tíverri ásanna, at hóast rímiliga væl veit við um okkara leiðir, er gerandisdagurin hjá meirilutanum av heimsins borgarum eins fjarur frá hesi glæstrimynd, sum hann var, tá hon varð málað.

Tey rættindi, ið eru staðfest í grein 25, eru kjarnin í tí partinum av mannarættindunum, ið vanliga verða nevnd búskapar- og almannarættindi. Upprunauppskotið kom frá amerikonskum mannarættindafelagsskapum, og breið semja var í Mannarættindakommissiónini um orðingina. Seinni tóku ósemjur seg upp, serliga millum sosialistisku londini eystanfyri og tey liberalistisku vestanfyri, m.a. um, hvønn leiklut ríkismyndugleikarnir skuldu hava í at tryggja fíggjargrundarlagið undir sosialu skipanunum.

Skyldurnar hjá tí almenna eru heldur gjøllari lýstar í altjóða semingunum um búskapar-, almanna- og mentanarrættindi frá 1966, har tað er ásett í 2. grein, at londini binda seg til at gera alt, tey megna, til at tey rætttindi, ið semingurin fevnir um, verða so líðandi framd til fulnar við øllum nýtiligum ráðum. Harafturat binda londini seg treytaleyst til ikki at gera mismun av nøkrum slag, tá ræður um at fremja rættindini.

***Arbeiði, løn og ogn***

Grein 23 ásetir, at øll hava rætt til arbeiði, til frítt at velja starv, hóskandi arbeiðslíkindi og vernd fyri arbeiðsloysi. Somuleiðis uttan mismun rætt til somu løn fyri sama arbeiði og rætt at vera limur í fakfelag. Grein 17 verjir rættin til at eiga ogn, sum ikki má verða ognartikin tilvildarliga, og í 24. grein er ásett, at øll hava rætt til hvíld og frítíð við løn og rímiliga avmarking av arbeiðstíðini.

Grein 23 staðfestir nakrar arbeiðsrættarligar grundreglur. Søguliga hevur rættur til arbeiði, sum ein mannarættur, sín uppruna í ídnaðarsamfelagnum. Tey flestu munnu minnast ein av fyrstu søgunum í bíbliuni um syndafallið, har Gud boðaði Adami, at hann sum revsing fyri sínar syndir í framtíðini skuldi vinna sær breyðið í sveitta og strevi. Frá at vera ein revsing er arbeiðið vorðið ein rættur í nútímans samfelagnum, ein rættur, sum kortini ikki stendur øllum í boði.

Kravið um somu løn fyri sama arbeiði hevur sín uppruna í Versailles sáttmálanum frá 1919, ið formliga endaði fyrra heimsbardaga.

Í Føroyum vórðu javnstøðuviðurskifti lógarskipað við javnstøðulógini frá 1994, ið setir arbeiðsgevara bann fyri at gera mismun á løntakarum vegna kyn. Somuleiðis er ásett, at kvinnur og menn skulu hava eins løn fyri sama arbeiði. Sett er javnstøðunevnd at ansa eftir, at lógin verður hildin, og at virka sum kærunevnd.

Rætturin at skipa fakfeløg er ein av grundreglunum hjá altjóða arbeiðarafelagsskapinum *(International Labour Organization - ILO)* og hevur verið av avgerandi týdningi fyri at vinna arbeiðsfólki sømilig kor. Eitt er rætturin at vera limur í fakfelag, annað er skylda til tess. Tað hevur verið vanligt, at arbeiðstakara- og arbeiðsgevarafeløg gera avtalur sínamillum um bert at arbeiða hjá ella taka fólk í arbeiði frá organiseraðum arbeiðsgevarum og feløgum, sonevndar eksklusivavtalur. Mannarættindadómstólurin í Strassburg segði í 2006 dóm um, at tílíkar avtalur vóru brot á grein 11 um felagsfrælsi í europeiska mannarættindasáttmálanum. Í Danmark varð lógin um felagsfrælsi broytt, og eru tílíkar avtalur við ávísum undantøkum ógildugar. Í Føroyum er eingin lóg svarandi til donsku lógina um felagsfrælsi, og ikki er óvanligt, at sáttmálar á føroyska arbeiðsmarknaðinum hava reglur um eksklusivavtalur.

Hóast ognarrætturin var tryggjaður í flestu vesturlendsku grundlógunum áðrenn 1948, var stór ósemja undir fyrireikingini av Heimsyvirlýsingini um ognarrættin. Hesin rættur fekk ikki innivist í teimum báðum ST-semingunum um mannarættindi frá 1966, og ymiskt er, hvørja støðu ognarrætturin hevur í seinni altjóða sáttmálum. Hetta hevur sínar grundir í stríðnum millum ta sosialistisku og ta liberalistisku hugsjónina. Hjá okkum er ognarrætturin vardur í grundlógini og tí europeiska mannarættindasáttmálanum.

## *Rættvísar lógir og rættargangur*

Í einum samfelagi, ið virðir mannarættindi í lóggávu, hevur hvør borgari rætt at vænta, at lógin viðurkennir hansara rættindi og viðger hann javnbjóðis við allar aðrar, sama hvussu stórt vald teir hava. Hann hevur somuleiðis krav um rættvísa rættarviðgerð av óheftum og uttanveltaðum dómarum. Tílík støða er ikki sjálvsøgd í øllum londum, hvørki søguliga ella í dag.

Grein 6 viðurkennir øll menniskju sum persónar fyri lógini. Grein 7 sigur, at øll eru jøvn fyri lógini og hava rætt til somu rættarvernd uttan mismun. Grein 9 ásetir, at eingin skal verða tilvildarliga handtikin, settur í varðhald ella gjørdur útlagin. Í grein 10 er staðfest, at øll hava sannan javnrætt til rættvísa og almenna rættarviðgerð fyri óheftum og óvildugum dómstóli. Grein 11 tryggjar, at eingin er sekur, fyrr enn dómur er sagdur eftir rættvísa rættarviðgerð sambært lóg, ið var galdandi, tá brotið varð gjørt.

Í mannarættindahøpi eru tað serliga reglurnar í revsilóggávuni, ið hava týdning. Ein persónur, ið verður handtikin, skal hava at vita, hvat hann ella hon er skuldsettur fyri, og verða settur fyri ein dómara innan ávísa tíð. Mannarættindakommissión Sameindu Tjóða hevur sagt, at henda freistin ikki má vera longri enn nakrar fáir dagar. Hjá okkum er freistin ásett í grundlógini til 24 tímar.

Óheftir dómstólar eru av størsta týdningi fyri rættartrygdina. Í hesum liggur, at dómstólarnir skulu vera skipaðir í lóg, og at dómararnir eru ópartískir, eisini tá ræður um mál millum borgarar og tað almenna. Dómsviðgerðir eiga at vera almennar uttan í ávísum undantaksførum, ið skulu vera ásett í lóg. Tann ákærdi skal hava rætt at møta persónliga og saman við verja. Sakarmál eiga at verða avgreidd innan rímiliga tíð, og dómar skulu altíð vera sagdir á almennum rættarfundi.

## *Frítt at trúgva, hugsa og tala*

Hugsanar- og trúarfrælsið er soleiðis lýst í grein 18: ”Øll hava rætt til hugsanar-, samvitsku- og trúarfrælsi. Hesin rættur fatar eisini um frælsi at skifta átrúnað ella sannføring, og frælsi til annaðhvørt einsamallur ella í felag við onnur og alment ella einskilt at inna trúgv sína í frálæru, tilbiðing, gudstænastu og halgihaldi.”

Søgan yður av dømum um forfylging av teimum, ið høvdu aðra hugsan ella trúgv enn meirilutin. Alt ov ofta hevur tað víst seg, at fekk ein minniluti vald, gloymdi hann skjótt sína fortíð og misnýtti sína nývunnu valdsstøðu móti

øðrum minnilutum. Tað var kortini sjáldan hugsanin ella trúgvin sjálv, ið voldi trupulleikar, men heldur rætturin at skipa seg sum serligan bólk og at boða sína trúgv alment.

Hjá okkum er trúarfrælsið tryggjað í grundlógini. Ásett er eisini, at eingin kann missa borgarlig ella politisk rættindi orsakað av sínari trúgv.

Grein 19 sigur, at "øll hava rætt til frælst at hava sínar áskoðanir og bera tær fram; hesin rættur fevnir um hugsanarfrælsi uttan uppílegging og tað, at søkja sær, fáa og breiða út upplýsingar og hugsanir ígjøgnum hvønn miðil, sum vera skal, og óheft av landamarki."

Í Europa gongur stríðið fyri frælst at fáa og lata upplýsingar aftur til 17. øld og er staðfest í fleiri av teimum klassisku frælsisskjølunum, eitt nú í Onglandi, Fraklandi og USA.

Tað um okkara leiðir so hátt metta fjølmiðlafrælsið er eisini vart í grein 19. Hetta frælsið er tó ikki óavmarkað. Sambært grein 12 eigur eingin at vera fyri æruskemd ella útspilling, og øll eiga rætt til lógarvernd fyri slíkum ágangi. Hesi viðurskifti eru gjølllari lýst í reglunum um ærumeiðing í revsilógini.

Grein 26 ljóðar soleiðis:

1. Øll hava rætt til útbúgving. Útbúgvingin skal vera ókeypis, ið hvussu er á byrjanar- og undirstøðustigi. Undirvísing á byrjanarstigi skal vera skyldubundin. Tøknilig og yrkislig útbúgving skal standa øllum í boði, og øll skulu eftir førimuni hava somu atgongd at hægri útbúgving.
2. Undirvísingin skal miða ímóti at fullmenna persónleika einstaklingins og at stimbra virðingina fyri mannarættindum og frælsi. Hon skal fremja fatan, tolsemi og vinalag millum tjóðir, fólkasløg og trúarbólkar, og skal fremja virki Sameindu Tjóða fyri at varðveita friðin.
3. Foreldur hava fyrsta rætt at velja, hvat slag av undirvísing skal verða givin børnum teirra.

Hesi høgu mál, sum ST setti í 1948, sýna, hvønn týdning útbúgving var mett at hava í endurreisn av einum heimi, ið var lagdur í oyði undir krígnum. At henda stevnan var tikin í álvara, sæst av, at undirvísingar- vísinda- og mentanarstovnurin UNESCO *(United Nations Educational, Scientific and Cultural Organization)* varð stovnaður longu í 1946. Endamálsorðingin í grein 26,2 ber dám av, at undirvísingin skuldi medvirka til ein betri heim.

At langt er enn á mál, sæst m.a. av, at víða hvar í teimum fátækaru londunum er talið á teimum, ið ikki duga at lesa. heilt upp móti helminginum av fólkinum, og at málið hjá UNESCO eftir meira enn seksti ára arbeiði ikki er hægri enn, at øll børn skulu fáa undirvísing í 2015.

Í grein 27 er ásett, at øll hava rætt til frítt at taka lut í mentanarlívi í samfelagnum, at njóta list og eiga lut í framburði vísinda og ágóðum teirra. Mentan stóð ovarlaga á dagsskránni hjá ST. Sambært stovningarsáttmálanum var altjóða mentanarsamstarv eitt av endamálunum, og altjóða samstarv um mentan og undirvísing varð mett at vera ein av fortreytunum fyri friðarligum og vinarligum viðurskiftum tjóðanna millum.

Í 1966, 20 ára stovningarárið, samtykti aðalfundurin hjá UNESCO eina yvirlýsing um meginreglur fyri altjóða samstarvi. Grein 1 er soljóðandi:
1. Í hvørjari mentan finnast tign og virði, sum eiga at verða vird og varðveitt;
2. Hvør tjóð hevur rætt og skyldu at menna sína mentan;
3. Í teirra ríka fjølbroytni og margfeldni og í teirra sínamillum ávirkan eru allar mentanir ein partur av mannaættarinnar felags arvi.

### *Felagsskapur, samstarv og fólkaræði*

Grein 20 sigur, at øll hava rætt til frítt og á friðarligan hátt at koma saman og taka seg saman í felagsskapir, meðan eingin kann verða noyddur at vera limur í felag. Hesin rættur er, saman við grein 19 um talufrælsi, kjarnin í teimum politisku rættindunum, men er eisini ein fortreyt fyri eitt nú átrúnaðarligum virksemi. Rætturin at skipa fakfeløg sambært grein 23 er viðgjørdur frammanfyri.

Fólkaræði ella demokrati hevur søguliga sín uppruna í stjórnarskipanini í Athen fyri 2500 árum síðani, og sum vardi í 250 ár. Her stýrdi fólkið veruliga sær sjálvum, væl at merkja vaksnir menn og ikki konufólk og trælir. Tá tankar um fólkastýri komu framaftur í Europa og Amerika í 18. og 19. øld, var talan um annað slag av fólkastýri. Hildið var nú, at "fólkið" var ikki ført at stýra sær sjálvum, og tí varð hugtakið "umboðandi fólkastýri" skapt. Nú skuldu teir (legg merki til "teir") bestu og klókastu stýra, valdir av fólkinum. Ein tann kendasta lýsingin av fólkastýri sum stjórnarskipan man vera tann hjá Abraham Lincoln í røðuni, hann helt í Gettysburg í november 1863 eftir eitt tað blóðugasta slagið í amerikanska borgarakrígnum. Her talar hann um *government of the people, by the people, for the people...".* Veruliga støðan var tó tann, at fólkið í Amerika í úti við hundrað ár hevði verið stýrt, ikki av sær sjálvum, men av teimum útvaldu.

Undir seinna heimsbardaga vóru fólkastýri og sjálvsavgerðarrættur kjarnuorð í politisku krígsførsluni. Hetta sæst aftur bæði í Stovningarsáttmálanum og Heimsyvirlýsingini, har grein 21 fyrst staðfestir, at øll hava rætt til at taka lut í stjórn landsins, annaðhvørt beinleiðis ella gjøgnum frítt vald umboð, og atgongd til almenn størv. Síðan verður sagt, at "fólksins vilji skal vera støði undir stjórnarinnar valdi; hesin vilji skal verða borin fram við ávísum millumbilum og við rættiligum valum við almennum og javnbjóðis valrættti, ið skulu verða framd við loyniligari atkvøðugreiðslu ella samsvarandi frælsum valháttum."

Hetta ljóðar í okkara hugaheimi sum ein endamálsorðing í einari vallóg, men vert er at hava í huga, at annað og meira skal til í einum veruligum fólkastýri. Tað er helst ikki av tilvild, at hesar reglurnar um frí val við almennum valrætti standa so at siga goymdar burtur miðskeiðis í Heimsyvirlýsingini. Eitt veruligt demokrati hevur sum fortreyt javnrættindi, borgaralig rættindi og grundleggjandi almannarættindi, eins og skyldur mótvegis samfelagnum.

**Framtíðin**

Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi er tað fyrsta altjóða viðurkenda savn av reglum, settar til verju av einstaklingum og minnilutum móti mismuni og

yvirgangi, framdum av stjórnarvaldi og øðrum yvirvaldi. Støðan í heiminum aftaná ein tann mest oyðandi bardagan í mannasøguni var uttan iva ein høvuðsgrund til, at londini kundu semjast so frægt, sum tey gjørdu í arbeiðinum at leggja støði undir eina nýggja og tryggari heimsskipan. At mannarættindi fingu so stóran leiklut í hesum arbeiði, var tó ikki minni teimum nógvu felagsskapum og einstaklingum fyri at takka, sum skoraðu á stjórnarumboðini við sínum krøvum.

Tá talan er um vald, gongur ofta soleiðis, at valdsmisnýtsla spyrst burturúr. Vald má tí seta mark fyri valdi, sum sagt hevur verið. Í einum fólkastýri er tað bert fólkið sjálvt, ið kann seta neyðugu mørkini. Torførari er at skipa neyðuga eftirlitið við valdinum, tá ræður um altjóða viðurskifti. Tað ber kortini til í ávísan mun, um tað eydnast at skapa eina altjóða fólkahugsan, ið kann seta krøv til valdið við nóg stórari styrki. Teir mongu mannarættindafelagsskapirnir, ið virka í heiminum í dag, eru helst besta trygdin fyri, at tey mannarættindi, ið vórðu lýst í Heimsyvirlýsingini, og sum seinni eru orðað í nógvum altjóða sáttmálum, verða vird av teimum, sum sita við valdinum.

Tann dómstólurin, sum í einum fólkastýri kann standa móti valdsmisnýtslu, hevur vantað í altjóða høpi inntil fyri kortum. Her er kortini broyting komin í, og er henda broyting størsta frambrotið í stríðnum at tryggja mannarættindi og byggja verju móti yvirgangi og valdsmisnýtslu. Síðan Altjóða revsidómstólurin fór at virka tann 1. juli 2002 kunnu einaræðisharrar og yvirgangskroppar ikki longur kenna seg tryggar fyri ikki at verða revsaðir fyri brotsverk síni. Hetta man, sum frá líður, fara at roynast sum eins stór hending, sum tá Heimsyvirlýsingin varð samtykt tann 10. desember 1948.

# Altjóða rættur og staðfesting av altjóða sáttmálum

*Birita Ludvíksdóttir*
*Løgfrøðingur, LLM í altjóða rætti*

## Altjóða rættur

Longu rómverjar skynaðu ímillum fólkarætt, *jus gentium*, og borgarligan rætt, *jus civile*. Skilnaðurin hevur verið viðkomandi síðani, men menningin av altjóða rætti tók serliga dik á seg í 19. øld, og síðani í 20. øld við Fólkasamgonguni *(League of Nations)* og øðrum altjóða felagsskapum, so sum altjóða arbeiðarafelagsskapinum (*International Labour Organization - ILO)*, sum skumpaðu undir menningina av altjóða rætti og skapaðu nógv av tí grundstøði, ið vit byggja nýggjari altjóða rætt á. Eftir annan veraldarbardaga fingu vit Sameindu Tjóðir, ið hava ment altjóða rætt á fleiri ymiskum økjum. Í hesari bók fara vit bert at viðgera ein part av tí altjóða rætti, sum Sameindu Tjóðir hava staðið fyri innan mannarættindaøkið.

### *Altjóða rættur í mun til tjóðarrætt*

Altjóða rættur er galdandi fyri fleiri fullveldistjóðir og er vanliga ikki beinleiðis galdandi fyri einstakar borgarar í einum landi. Aðalfundur Sameindu Tjóða er ikki eitt parlament, sum t.d. Løgtingið. Altjóða dómstólurin í Haag *(The International Court of Justice*) kann bert viðgera mál um ósemjur millum ríki, ikki millum einstaklingar í einari tjóð, sum t.d. Føroya Rættur. Altjóða sáttmálar áleggja myndugleikum í limaríkjum skyldu til at fáa ávís viðurskifti í rættlag. Tá ið eitt limaríki staðfestir ein altjóða sáttmála, er sáttmálin bindandi fyri myndugleikarnar í limaríkinum. Tey rættindi, ið verða ásett í altjóða sáttmálum verða bert beinleiðis galdandi fyri borgaran, um tey verða skrivað inn í tjóðarlóggávu.

Tjóðarrættur, ella nationalur rættur, harafturímóti verður staðfestur í lóggávu, sum bert er galdandi fyri eina tjóð og er beinleiðis galdandi fyri borgararnar í tí einstaka landinum. Á henda hátt skilir tjóðarrættur seg frá altjóða rætti. Í Føroyum er tjóðarrættur staðfestur í løgtingslógum og kunngerðum v.m. Hesar

reglur eru beinleiðis bindandi fyri bæði borgarar og myndugleikar í landinum. Reglurnar áleggja borgarum og myndugleikum skyldur, men geva samstundis borgarum og myndugleikum rættindi.

Dømi:
Fleiri studentaskúlanæmingar samlast framman fyri Løgtinginum fyri at mótmæla, at teir skulu ganga á skúlanum í Hoydølum. Hetta er heilsuskaðiligt siga teir. Mótmælisgongan er friðarlig. Knappliga kemur løgreglan og handtekur øll.

Einum slíkum máli kunna studentaskúlanæmingarnir fara beinleiðis í Føroya Rætt við, tí teirra rættur til friðarligt mótmæli er beinleiðis tryggjaður í tjóðarlóggávu, nevniliga í grundlógini og í "anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention."

Rætturin til friðarligt mótmæli er eisini tryggjaður í ST-mannarættindasáttmálunum, ið kann ávirka tulkingina av tjóðarlóggávu, men var ongin tjóðarlóggáva galdandi, var trupult hjá Føroya Rætti at brúka altjóða ásetingina.

**Altjóða sáttmálar**

Altjóða sáttmálar eru ein av keldunum í altjóða rætti. Fleiri aðrar keldur eru í altjóða rætti, og eru hesar m.a. altjóða siðvenja og dómar sagdir av altjóða dómstólum, sum t.d. Altjóða dómstólinum í Haag. Altjóða rættur kann eisini stava frá serfrøðingaummælum og heimsumfatandi góðtiknum standardum fyri menniskjansligari atferð. Í hesari bók fara vit bert at savna okkum um tær reglur, ið eru ásettar í altjóða sáttmálum.

Ein altjóða sáttmáli er ein avtala millum fleiri ríki ella altjóða felagsskapir. Øll ríki, sum staðfesta sáttmálan, góðtaka at halda tær skyldur, ið verða ásettar í sáttmálanum. Eitt ríki, sum ikki heldur sínar skyldur sambært sáttmálanum, verður hildið til svars fyri at hava brotið sáttmálan.
Altjóða sáttmálar hava ymisk heiti. Hvørt heitið er altjóða sáttmáli *(convention)*,

semingur ella sáttmáli *(covenant)* ella valfrí protokol *(optional protocol)*, er innihaldið tað sama, nevniliga at limaríki binda seg til í felag at halda tær skyldur, ið eru ásettar í sáttmálunum. Øðrvísi er við heitinum yvirlýsing *(declaration)*, sum ikki verður mett sum eitt bindandi skjal, sí niðanfyri í greinini um Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi.

### *ST-sáttmálar*

Sameindu Tjóðir hava staðið fyri sáttmálum á nógvum ymiskum økjum. T.d. kann nevnast, at sáttmálar eru tilevnaðir viðvíkjandi altjóða ósemjum, rúsevnum, havrætti, umhvørvisrætti, hernaðarrætti og mangt annað. Í hesari bók fara vit tó bert at savna okkum um teir sáttmálar, ið eru gjørdir á mannarættindaøkinum.

Í Stovningarsáttmála Sameindu Tjóða verður ásett, at tær skyldur, sum limaríkini átaka sær í ST-sáttmálum, ganga fram um allar tær skyldur, sum ríkini annars hava í sáttmálum við onnur ríki.

ST-sáttmálarnir um mannarættindi eru vanliga bygdir upp soleiðis: Fyrst er eitt formæli *(præamble),* síðani koma reglurnar um rættindi og skyldur, og til síðst reglur um eftirlit og fyrisitingarlig viðurskifti.

Í formælinum skriva limaríkini, hvat endamálið við sáttmálanum er, og hvat limaríkini ynskja at arbeiða fram ímóti við hesum sáttmála.

Í kapitlunum um rættindi og skyldur, verða skrivað niður øll tey rættindi og skyldur, ið myndugleikar og borgarar hava eftir sáttmálanum.

Í kapitlunum um eftirlit og fyrisitingarlig viðurskifti verða reglur ásettar um eftirlitið við sáttmálanum. Tað er soleiðis, at fyri at sáttmálin kann virka nøktandi, er neyðugt, at onkur hevur eftirlit við, at reglurnar í sáttmálanum verða fylgdar. Til hetta verður vanliga sett ein ST-eftirlitsnevnd. Ein slík nevnd verður sett til at hava eftirlit við hvørjum einstøkum sáttmála, tvs. ein eftirlitsnevnd til Barnarættindasáttmálan, ein til ST-sáttmálan móti píning o.s.fr.

### *Serligt um samanseting og uppgávur hjá ST-eftirlitsnevndum*

Stór krøv verða sett til teir persónar, ið verða valdir at umboða sítt ríki í einari eftirlitsnevnd. Til ein ST-sáttmála um mannarættindi skulu hesir persónar vanliga vera serfrøðingar innan tað einstaka sáttmálaøkið. Teir skulu hava stóra vitan og drúgvar royndir innan økið, og harumframt verður sett krav um, at teir skulu vera høgt virdir millum fólk. Eisini verður atlit tikið til, at serfrøðingarnir koma frá ymsum limaríkjum og ymsum heimspørtum, soleiðis at umboðanin í nevndini er jøvn geografisk, og at nevndin er samansett av ymsum siðmentanum og lógarskipanum. Vanliga er eisini krav um, at bæði kvinnur og menn skulu vera í nevndini.

Limaríkini hava skyldu til at lata inn frágreiðingar til eina ST-eftirlitsnevnd viðvíkjandi hvørjum einstøkum sáttmála. Fyrsta frágreiðing skal latast inn, stutt eftir at sáttmálin er komin í gildi. Henda frágreiðing er vanliga ein drúgv útgreining av viðurskiftunum í limaríkinum í mun til tey rættindi, ið eru ásett í sáttmálanum.  Síðani skulu smærri frágreiðingar latast ST-eftirlitsnevndini vanliga 4. hvørt ár.

Tá ið ein eftirlitsnevnd hevur móttikið frágreiðingar frá limaríkjunum, lesur nevndin frágreiðingina ígjøgnum og kemur við tilmælum og uppskotum til limaríkið, um hvussu ríkið betur kann útinna tær treytir, ið eru ásettar í sáttmálanum. Er eftirlitsnevndin í iva um okkurt, kann nevndin krevja fleiri upplýsingar frá limaríkinum. Letur ríkið ikki Sameindu Tjóðum frágreiðingina innan eina ávísa ásetta freist, t.d. 3 mánaðir, kann nevndin fara á eftirlitsvitjan í limaríkinum. Á einari eftirlitsvitjan kann nevndin kanna ymisk viðurskifti í limaríkinum, t.d. umstøðurnar í fongslum í limaríkinum. Myndugleikar í limaríkjum kunnu vera við í einari slíkari eftirlitsvitjan. Letur limaríkið eftirlitsnevndini frágreiðing áðrenn eftirlitsvitjan, verður eingin vitjan framd. Limaríkið og Sameindu Tjóðir skulu syrgja fyri, at frágreiðingarnar eru atkomuligar hjá øllum.

Umframt frágreiðingar frá limaríkjum lata eisini felagsskapir í limaríkjunum frágreiðingar til ST um umstøðurnar á ymsu mannarættindaøkjunum í

limaríkinum. Hesar frágreiðingar verða nevndar skuggafrágreiðingar *(shadow reports)*. Sum dømi kann nevnast, at Barnabati hevur latið inn skuggafrágreiðing til barnarættindanevndina hjá ST um umstøðurnar hjá børnum í Føroyum.

Eftirlitsnevndirnar skulu við jøvnum millumbilum senda frágreiðing um sítt virksemi til Aðalfundin *(the General Assembly)* hjá Sameindu Tjóðum, umframt til Búskapar- og almannaráðið *(the Economic and Social Council)*. Frágreiðing verður send við tilmælum, atfinningum og uppskotum um, hvussu støðan kann betrast.

### *Valfríar protokollir*

Umframt at góðkenna ein altjóða sáttmála kunnu limaríkini eisini velja at góðkenna eina valfría protokoll til sáttmálan. Ein protokol er eitt uppískoyti til ein sáttmála. Limaríkini kunnu sjálvi velja, um tey ynskja at góðkenna protokollina. Tað kunnu vera fleiri protokollir til ein sáttmála.

Ein valfrí protokoll á mannarættindaøkinum er vanliga uppbygd á sama hátt sum ein ST-sáttmáli. Tað vil siga, at protokollin hevur eitt formæli, ein part, ið snýr seg um rættindi, og ein part, ið snýr seg um eftirlitið við, at limaríkini fylgja reglunum í protokollini.

Her verða ofta tey rættindi ásett, ið Sameindu Tjóðir vita, at fleiri av limaríkjunum hava ilt við at góðtaka. Tað vil siga, at um limaríkini kunnu góðtaka tey rættindi, ið eru ásett í sáttmálanum, staðfesta tey sáttmálan. Síðani kann tað taka langa tíð, og tað krevur aloftast hugburðsbroyting, áðrenn limaríkini kunnu góðtaka valfríu protokollirnar.

Í einari protokoll til sáttmálan kann verða ásett, at borgarar í limaríkjunum kunnu senda klagu beinleiðis til eina ST-eftirlitsnevnd. Slíkar protokollir eru gjørdar til fleiri av teimum ST-sáttmálum, ið vit viðgera í hesi bók. Tað styrkir støðuna hjá borgaranum, at hann hevur møguleika fyri at klaga beinleiðis til Sameindu Tjóðir. Tá ið ST-eftirlitsnevndin tekur eina klagu upp frá einum borgara, skal hon

senda klaguna til ummælis hjá limaríkinum. Ríkið kann koma við viðmerkingum til málið. Tá ið nevndin er komin til eina niðurstøðu, verður skriv sent pørtunum við uppskotum og tilmælum um, hvussu støðan kann betrast fyri tann einstaka borgaran. ST-eftirlitsnevndin kann ikki áleggja myndugleikunum at betra viðurskiftini hjá borgaranum, men kann bert mæla limaríkinum til, hvat skal gerast fyri at betra um støðuna.

**Mannagongd, tá ið altjóða sáttmálar og valfríar protokollir verða settir í gildi**

Sama mannagongd er galdandi fyri ígildissetan av altjóða sáttmálum *(conventions)*, altjóða semingum ella sáttmálum *(covenants),* og av valfríum protokollum *(optional protocols).*



© UN Photo/Paulo Filgueiras

*Ein ST- sáttmáli verður undirritaður*

Fyrsta stigið til at seta ein sáttmála í gildi í einum limaríki er, at hann verður undirritaður. Enska orðið fyri hetta er: "signature". Hetta inniber, at uttanríkismálaráðharrin ella umboð fyri stjórnina í limaríkinum undirrita sáttmálan vegna sítt land.

At eitt limaríki undirritar sáttmálar, merkir ikki, at ríkið hevur bundið seg til sáttmálan. Ein slík undirritan er eitt politiskt stig, sum ger tað møguligt hjá limaríkinum at arbeiða víðari við at fáa sáttmálan settan í gildi í ríkinum.

***Staðfesting***

Tá ið sáttmálin er undirritaður, fara stjórnirnar í teimum einstøku limaríkjunum í

gongd við at fáa sáttmálan staðfestan. Enska orðið er "ratification".
Ein sáttmáli verður staðfestur í tveimum stigum.

- Fyrsta stigið er, at tær einstøku stjórnirnar leggja sáttmálan fyri lóggevandi valdið (vanliga parlamentið) í limaríkinum til samtyktar.
- Tað næsta stigið er, at stjórnirnar í teimum einstøku limaríkjunum boða aðalskrivaranum í Sameindu Tjóðum frá, at ríkið vil staðfesta sáttmálan. Tað formella staðfestingarskjalið verður á enskum kallað: *"The Instrument of Ratification".*

Staðfestingarmannagongdin kann taka drúgva tíð. Stjórnirnar í hvørjum einstøkum limaríki skulu fyrst gera eitt stórt fyrireikingararbeiði, soleiðis at sáttmálin kann verða lagdur fyri lóggevandi valdið til støðutakan. Tá ið sáttmálin verður lagdur fyri lóggevandi valdið, er drúgv umrøða av, hvørt hesin sáttmálin skal setast í gildi í limaríkinum.

Samtykkir lóggevandi valdið, at sáttmálin skal setast í gildi í limaríkinum, verður henda staðfesting fráboðað aðalskrivaranum í Sameindu Tjóðum við, at formelt staðfestingarskjal verður sent Sameindu Tjóðum.

Í stovningarsáttmála Sameindu Tjóða er ásett, at sáttmálar skulu verða skrásettir hjá Sameindu Tjóðum fyri at fáa gildi, ella fyri at limaríki skulu hava møguleika fyri at leggja málið fyri Altjóða dómstólin í Haag.

Limaríki kann eisini eftirfylgjandi staðfesta ein sáttmála, hóast ríkið ikki hevur undirritað sáttmálan. Í hesum førinum er enska orðið fyri staðfesting: *"Accession"*.




*Forsetin í Eysturríki letur ST- skjalið, tað sonevnda "Instrument of Ratification"*

### *Fyrivarni*

Tá ið altjóða sáttmálar verða staðfestir, kunnu limaríkini sum oftast taka fyrivarni fyri ávísum pørtum av sáttmálanum. Hetta verður ásett í teimum einstøku sáttmálunum. Í summum sáttmálum er tað tó ásett, at limaríkini ikki kunnu taka fyrivarni. At taka fyrivarni vil siga, at limaríkini boða Sameindu Tjóðum frá, at tey ynskja at staðfesta sáttmálan, men at tey tó ikki ynskja, at ávísir partar av sáttmálanum skulu verða galdandi fyri ríkið.

Fyrivarni kann verða tikið:

- Innihaldsliga, ella
- Territorialt

Innihaldsligt fyrivarni er t.d., tá ið eitt limaríkið boðar frá, at tað ikki ynskir, at ein ávís áseting ella grein í sáttmálanum skal verða galdandi fyri ríkið.

Territorialt fyrivarni merkir, at limaríkið ikki ynskir, at sáttmálin skal fevna um ávís geografisk øki í ríkinum.

Dømi: Danmark tekur territorialt fyrivarni fyri Føroyar, tá ið Danmark boðar Sameindu Tjóðum frá, at sáttmálin ikki skal verða galdandi fyri Føroyar.

Tá ið Danmark samtykkir ein sáttmála uttan fyrivarni fyri Føroyar, er hesin sáttmáli galdandi í Føroyar.

Tað sæst av sjálvum staðfestingarskjalinum, hvørt Danmark hevur tikið territorialt fyrivarni fyri Føroyar ella ikki.

### *Gildiskoma og setan úr gildi*

Í hvørjum einstøkum ST-sáttmála á mannarættindaøkinum eru reglur um, nær ein sáttmáli kemur í gildi. T.d. kann vera ásett, at sáttmálin kemur í gildi 30

dagar eftir, at 20 limaríki hava staðfest hann. Frá hesum degi verður sáttmálin galdandi í teimum ríkjum, ið hava staðfest hann.

Tá ið limaríki eftir hetta staðfesta sáttmálan, kemur hann vanliga í gildi í tí landinum t.d. 30. dagin eftir, at Sameindu Tjóðir hava fingið boð um, at hann er staðfestur.

Er tað soleiðis, at eitt limaríki ikki longur ynskir at vera partur av einum ávísum ST-sáttmála, kann ríkið boða Sameindu Tjóðum frá hesum, og eftir hetta er ríkið ikki longur partur av sáttmálanum. Enska heitið fyri hetta er: *"Denunciation".* Ofta eru reglur um hetta í teimum einstøku sáttmálunum.

### *Fremjan Innlendis*

Tá ið sáttmálin er staðfestur og settur í gildi í einum limaríki, hava limaríkini skyldu til at fremja sáttmálan í tjóðarlóggávu. Tað merkir, at limaríkini skulu skriva tey rættindi, ið standa í sáttmálanum inn í lóggávuna, ið er galdandi í ríkinum. Tá ið hetta er gjørt, hevur sáttmálin beinleiðis virknað fyri borgarar og myndugleikar í limaríkinum. Verður brot framt á hesi rættindi, kann borgarin leggja málið fyri tjóðardómstólin og krevja sín rætt.

Um sáttmálin ikki verður framdur í tjóðarlóggávu, kann borgarin ikki beinleiðis nýta síni rættindi yvirfyri myndugleikunum, t.d. kann borgarin ikki kæra eina avgerð, ið er í stríð við ein sáttmála, ella hann kann heldur ikki leggja eitt mál fyri Føroya rætt, ið er í stríð við ein ST-sáttmála. Eru rættindini hinvegin staðfest í tjóðarlóggávu, kann hann gera tað.

Dømi: Nógv av teimum rættindum, ið eru ásett í ST-barnarættindasáttmálanum, eru longu skrivað inn í føroysku barnaverndarlógina. Á henda hátt hava børn og foreldur beinleiðis rættindi, ið tey kunnu gera beinleiðis galdandi í Føroyum. Hetta hevði ikki verið møguligt, um rættindini bert vóru staðfest í sáttmálanum. Sí nærri niðanfyri í greinini um ST-barnarættindasáttmálan.

# Føroyar og altjóða sáttmálar

## *Heimastýrið*

Føroyar eru partur av danska ríkinum. Í 1948 fingu vit heimastýri og gjørdust við hesum ein sjálvsstýrandi tjóð í danska ríkinum. Í lógini verða tey málsøki, ið Føroyar kunnu yvirtaka, reksað upp. Løgtingið og Landsstýrið hava lóggevandi og útinnandi valdið á teimum økjum, ið eru yvirtikin eftir Heimastýrislógini. Uttanríkismál eru ikki partur av teimum málsøkjum, ið Føroyar kunnu yvirtaka eftir Heimastýrislógini.

Sambært Uttanríkispolitisku heimildarlógini frá 2005 kann Landsstýrið samráðast við onnur lond og gera altjóða sáttmálar um málsøki, ið Føroyar hevur yvirtikið. Men tá ið tað snýr seg um sáttmálar, sum eisini skulu fevna um Danmark, ella sum skulu samráðast við til dømis Sameindu Tjóðir, kann Føroyar ikki sjálvstøðugt gerast partur av sáttmálunum. Yvirfyri Sameindu Tjóðum umboðar danska stjórnin Føroyar og hevur sostatt heimild til at innganga ST-sáttmálar vegna Føroyar.

Tó skulu ST-sáttmálar og aðrar altjóða semjur, sum krevja fólkatingssamtykt, og sum nerta við serlig føroysk áhugamál, leggjast fyri Løgtingið, áðrenn tær verða settar í gildi í Føroyum, *(sí § 7 í Heimastýrislógini)*. Danmark kann seta eina tíðarfreist á, nær Føroyar skulu svara eini áheitan frá donsku stjórnini hesum viðvíkjandi. Danmark kann víkja frá at hoyra Føroyar, um talan er um eitt átroðkandi mál, men tá skal Danmark hoyra Føroyar sum skjótast, eftir at sáttmálin hevur verið fyri á Fólkatingi.

## *Undirritan*

Tá ið talan er um, at ein ST-sáttmáli skal setast í gildi í Føroyum, er tað Danmark, sum undirritar okkara vegna. Hetta av tí at Danmark, sum omanfyri nevnt, umboðar okkum yvir fyri Sameindu Tjóðum.

***Sáttmálin verður lagdur fyri Fólkatingið***

Vanliga er tað danska Uttanríkismálaráðið ella tað málaráðið, ið hevur málsøkið um hendi, ið ger tað fyrireikandi arbeiðið við at fáa ein sáttmála settan í gildi í Danmark. Ein arbeiðsbólkur verður settur við umboðum frá ymsu aðalráðunum, áhugafelagsskapum v.m., ið hava vitan, royndir og taka avgerðir viðvíkjandi tí ítøkiliga sáttmálanum. Arbeiðsbólkurin kannar og útgreinar, hvørjar avleiðingar eru av sáttmálanum fíggjarliga, viðvíkjandi lóggávu o.ø. Álit verður skrivað, ið verður sent til hoyringar hjá relevantum pørtum.

Tá ið arbeiðið er liðugt, verður uppskot lagt fyri Fólkatingið um at samtykkja sáttmálan. Eftir viðgerð í Fólkatinginum verður uppskotið um at seta í gildi sáttmálan antin samtykt ella felt.

***Sáttmálin verður lagdur fyri Løgtingið***

Tá ið danska stjórnin umhugsar at staðfesta ein altjóða sáttmála, skal danska stjórnin, sum omanfyri nevnt, spyrja Føroyar, um vit ynskja, at hesin sáttmáli skal setast í gildi í Føroyum.

Landsstýrið ummælir heimastýrisins vegna teir sáttmálar, sum danska stjórnin leggur fyri heimastýrið, *(sí § 53 í Stýrisskipanarlógini).* Er talan um sáttmála, ið hevur minni týdning, kann Landsstýrið boða donsku stjornini frá, at tikið verður undir við, at sáttmálin verður settur í gildi í Føroyum. Hetta uttan at spyrja Løgtingið.




*Tinghúsið*

Er talan um týdningarmiklan sáttmála ella ein sáttmála, sum krevur luttøku frá Løgtinginum fyri at verða útintur, skal Landsstýrið tó leggja sáttmálan fyri Løgtingið, *(sí § 52 í Stýrisskipanarlógini).*

Í løtuni hava vit í Føroyum eitt uttanríkisráð, ið stendur á odda fyri hesum arbeiðinum. Áðrenn hetta var tað løgmaður, ið hevði altjóða økið undir sær.

Fyrireikingararbeiðið fer vanliga fram á sama hátt sum í Danmark. Landsstýrið skal meta um hvørjar avleiðingar sáttmálin hevur fyri Føroyar, herundir hvørjar løgtingslógir v.m. skulu gerast ella broytast, fyri at hesin sáttmálin kann verða útintur. Tíðum verður ein arbeiðsbólkur settur til hetta arbeiði. Arbeiðsbólkurin skrivar álit. Síðani verður eitt uppskot til samtyktar lagt fyri Løgtingið. Slík uppskot skulu bert hava 2 viðgerðir í løgtinginum, meðan vanlig lógaruppskot skulu hava 3 viðgerðir í Løgtinginum, *(sí kap. III Tingmál í Tingsskipan Føroya Løgtings)*.

Løgtingslógir mugu ikki ganga ímóti einum altjóða sáttmála, sum er galdandi í Føroyum, *(sí § 55 í Stýrisskipanarlógini).*

Uppskot til samtyktar verður borið løgtinginum av avvarðandi landsstýrismanni, nú landsstýrismanninum í uttanríkismálum. Løgmaður og tingmaður kunnu eisini leggja fram uppskot. Aftaná 3 yrkadagar verður uppskotið lagt fram í Løgtinginum. Uppskotið kann fáa 1. viðgerð 2. yrkadagin eftir framløgu. Við 1. viðgerð verður uppskotið umrøtt í síni heild. Broytingaruppskot kann verða fráboðað og umrøtt. Vanliga verður uppskotið síðani beint í nevnd. Altjóða sáttmálar verða vanliga beindir í Uttanlandsnevndina. Uttanlandsnevndin viðger uppskotið til samtyktar, skrivar nevndarálit, og síðani er 2. viðgerð í Løgtinginum. 2. viðgerð kann verða 3. yrkadagin eftir, at 1. viðgerð er endað, tó ikki fyrr enn 2. dagin eftir, at eitt møguligt nevndarálit er lagt fram. Tá ið uppskot er til 2. viðgerð, verður tað umrøtt í síni heild, einstakar greinir, broytingaruppskot og nevndarálit verða umrødd. Eftir umrøðuna verður atkvøtt, og tingið samtykkir ella fellur uppskotið.

Verður uppskotið samtykt, boðar løgmaður donsku stjórnini frá hesum, og at

Føroyar ynskja at verða partur av sáttmálanum. Danmark kann síðani staðfesta sáttmálan uttan at taka fyrivarni fyri Føroyar.

Verður uppskotið felt í Løgtinginum, eigur Fólkatingið at samtykkja sáttmálan við territorialum fyrivarni fyri Føroyum. Hetta tó bert, um tað er møguligt at taka territorialt fyrivarni í tí einstaka sáttmálanum.

### *Fráboðan til Sameindu Tjóðir*

Danska stjórnin boðar síðani Sameindu Tjóðum frá, at Danmark hevur staðfest sáttmálan uttan fyrivarni fyri Føroyar. Hetta verður gjørt við, at formella staðfestingarskjalið *"The Instrument of Ratification"* verður sent aðalskrivaranum í Sameindu Tjóðum.

Hevur Danmark longu staðfest sáttmálan við territorialum fyrivarni fyri Føroyar, boðar danska stjórnin Sameindu Tjóðum frá, at fyrivarni viðvíkjandi Føroyum skal strikast.

### *Gildiskoma*

ST-sáttmálin kemur síðani í gildi í Føroyum eitt ávíst tíðarskeið, vanliga 30 dagar eftir, at Sameindu Tjóðir hava fingið boð um, at hann er staðfestur.

# ST-mannarættindasáttmálarnir frá 1966

*Birita Ludvíksdóttir*
*Løgfrøðingur, LLM í altjóða rætti*

## Søgan um sáttmálarnar

Eftir at Sameindu Tjóðir høvdu samtykt Heimsyvirlýsingina um mannarættindi tann 10. desember 1948, helt arbeiðið fram við at skapa bindandi altjóða reglur á økinum.

Í byrjanini var stór ósemja um, hvørt Sameindu Tjóðir skuldu gera ein altjóða mannarættindasáttmála ella tveir. Tey, sum talaðu fyri at gera ein sáttmála, førdu fram, at tað var eingin klárur skilnaður ímillum teir ymisku bólkarnar av rættindum. Tað var heldur ikki møguligt at seta nøkur av hesum rættindum í bás sum havandi størri týdning enn onnur.

Tey, sum talaðu fyri at gera tveir sáttmálar, førdu fram, at borgarlig og politisk rættindi áttu at verða beinleiðis galdandi og vard av dómstólunum. Hetta vóru jú rættindi hjá einstaklingum ímóti ólógligum og órættvísum gerðum í limaríkjunum. Búskapar-, almanna- og mentanarrættindi áttu hinvegin ikki at verða beinleiðis galdandi, men áttu at verða vard so líðandi, sum limaríkini høvdu fíggjarliga og fyrisitingarliga orku til tað.

Endin av hesum orðaskifti varð, at avgerð varð tikin um at gera tveir sáttmálar: ein um borgarlig og politisk rættindi, og ein um búskapar-, almanna-, og mentanarrættindi.

Hví var so neyðugt at gera tveir altjóða sáttmálar um mannarættindi, tá ið Sameindu Tjóðir longu høvdu Heimsyvirlýsingina um mannarættindi? Svarið uppá henda spurning finst partvíst í formælinum til báðar sáttmálarnar. Har verður staðfest, at hugsjónin um frælsar menniskjur, ið njóta borgarligt og politisk frælsi og eisini frælsi frá ótta og neyð, ikki kann fremjast, uttan at skaptar verða

slíkar umstøður, at ein og hvør fær notið síni borgarligu og politisku rættindi, eins væl og síni búskapar-, almanna-, og mentanarrættindi.

Í hesum liggur, at Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi ikki einsamøll kundi føra til, at tey niðurfestu rættindi vórðu framd í limaríkjunum. Av tí, at tað í Heimsyvirlýsingini ikki vóru ásetingar um, hvussu ásettu rættindini skuldu fremjast í limaríkjunum, var neyðugt at áseta reglur um hetta í meira bindandi sáttmálum.

Í teimum báðum sáttmálunum eru tí ikki bert ásetingar um mannarættindi, men har eru eisini ásetingar um, hvussu sáttmálarnir skulu fremjast í limaríkjunum. Limaríkini binda seg til at virða ásettu rættindini og at tryggja borgarum í limaríkjunum hesi rættindi m.a. í lóggávu. Harumframt eru eftirlitsnevndir settar á stovn. Mannarættindanevndin og Nevndin fyri búskapar-, almanna-, og mentanarrættindum skulu hava eftirlit við, at ásetingarnar í sáttmálunum um borgarlig og politisk, og búskapar-, almanna-, og mentanarrættindi verða fylgdar. Hesar ásetingar gera, at ásettu mannarættindini fáa størri slagkraft kring allan heimin.

Teir báðir sáttmálarnir um mannarættindi vóru samtyktir á ST-aðalfundi í desember 1966, og eru teir saman við Heimsyvirlýsingini hornasteinurin undir øllum mannarættindaarbeiði hjá Sameindu Tjóðum.

Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi og hesir báðir sáttmálarnir við tilhoyrandi protokollum verða saman kallað: *"The International Bill of Human Rights"*, ella altjóða mannarættindalógin á føroyskum.

## Borgarlig og politisk rættindi

Í *The International Covenant on Civil and Political Rights (ICCPR)* eru ásetingarnar um borgarlig og politisk rættindi.

Hvat eru so borgarlig og politisk rættindi? Borgarlig rættindi eru til fyri at

tryggja tí einstaka menniskjanum eitt ávíst rásarúm í privatlívinum og samfelagslívinum. Dømi um borgarlig rættindi eru framsøgufrælsi og trúarfrælsi hjá tí einstaka og rætturin til familjulív og privatlív. Politisk rættindi eru til fyri at tryggja, at borgarar kunnu taka lut í tí samfelag, tey liva í. Dømi um politisk rættindi eru sjálvsavgerðarrætturin, rætturin at savnast á friðarligan hátt, t.d. í mótmælisgongu, ella rætturin til frítt at fara upp í felag saman við øðrum, t.d. fakfelag.




*Fólk í London komin saman at mótmæla. Tiltakið er liður í globala átakinum "Frælst Myanmar"*

*Grein 1*

Grein 1 í báðum mannarættindasáttmálunum frá 1966 eru eins orðaðar. Í greinini verður ásett, at øll fólk hava sjálvsavgerðarrætt, og við hesum rætti kunnu tey frítt avgera teirra politisku støðu og frítt fremja teirra búskaparligu, sosialu og mentanarligu menning. Øll fólk kunnu, til sítt egna gagn, frítt ráða yvir sínum náttúruríkidømi og tilfeingi. Í greinini verður heitt á øll limaríki um at virka fyri sjálvsavgerðarrættinum.

Nógv stríð hevur verið um hesa áseting, bæði politiskt og løgfrøðiliga, og

ósemjan er framvegis stór um veruliga týdningin av hesi áseting. Tíðum hevur sjálvsavgerðarrættur føroyinga verið umrøddur. Danska stjórnin hevur viðurkent okkara rætt til at nýta egið mál og okkara rætt til at hava egna mentan. Tá ið føroyska fólkið í 1946 atkvøddi fyri, at Føroyar skuldu verða ein sjálvstøðug tjóð, tók danska stjórnin tó ikki hesa fólkaatkvøðu til eftirtektar. Danska stjórnin upploysti Løgtingið og skrivaði út nýval. Í 1948 varð avtala í staðin gjørd ímillum føroysku og donsku myndugleikarnar um at stovna eina heimastýriskipan fyri Føroyar. Við heimastýrislógini hava føroyingar við tíðini yvirtikið fleiri málsøki, og hava nú bæði fíggjarliga, lóggevandi og umsitingarliga valdið á týðandi málsøkjum. Í 2005 var avtala gjørd ímillum landsstýrið og donsku stjórnina um yvirtøkur av fleiri málsøkjum og ávísar uttanríkispolitiskar heimildir. Henda avtala er síðani staðfest við lóg. Sigast kann tí, at Føroyar í dag í stóran mun avgera og fremja egna búskaparliga, sosiala og mentanarliga menning. Tó hava vit ikki enn tikið fullveldi.

Fleiri danskir forsætisráðharrar hava úttalað, at Føroyar skulu gerast sjálvstøðug tjóð, tá ið fólkið í Føroyum ynskir tað. Í sambandi við fyrispurning til forsætisráðharran, (F67 frá 2001) samtykti danska Fólkatingið, at:

> "Folketinget tilkendegiver, at det er den færøske befolkning, der afgør Færøernes fremtidige tilknytningsforhold til Danmark. Det gælder såvel et ønske om at etablere en suveræn stat som et ønske om at udvikle samarbejdet inden for rigsfællesskabet."

Í sambandi við umrøðu í Fólkatinginum av uppskoti til samtyktar um at viðurkenna sjálvsavgerðarrættin hjá Føroya fólki (B107 frá 2002), segði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, at hansara stjórn hevði somu áskoðan sum fráfarna stjórnin viðvíkjandi einum føroyskum fullveldi. Harumframt segði hann m.a. soleiðis:

> "Jeg vil afslutningsvis nævne et enkelt forhold. Det siger sig selv, at en eventuel færøsk udtræden af riget vil skulle ske i overensstemmelse med grundloven. Grundlovens § 19 kræver, at regeringen og Folketinget

> giver sin tilslutning til indskrænkninger i rigets område. Det er bare sagt for en fuldstændigheds skyld, men i praksis vil det være sådan, at kommer der en ønske fra færøsk side om suverænitet, så bliver det sådan."

Í síðstu donsku frágreiðingini til ST um borgarlig og politisk rættindi, frá november 2007, er ein yvirlýsing frá landsstýrinum um politisku og løgfrøðiligu støðu Føroya. Í yvirlýsingini verður søguliga gongdin lýst, og staðfest verður, at Føroyar hava sjálvsavgerðarrætt sambært altjóða lóg.

*Grein 3*
*Grein 3* í sáttmálanum ásetur rættin til javnstøðu ímillum kvinnur og menn. Hendan áseting er galdandi fyri allar hinar ásetingarnar í sáttmálanum.

*Grein 6 til 11*
Í greinunum 6 til 11 eru høvuðsásetingarnar um verju av lívi, frælsi og trygd hjá tí einstaka. Í *grein 6* verður rætturin til lív ásettur. Rættur til lív merkir tó ikki, at talan er um eitt forboð ímóti deyðarevsing. Eina slíka áseting høvdu fleiri limaríki í ST ikki kunnað góðtikið. Í staðin eru strangar ásetingar um, nær eitt limaríki, ið ikki enn hevur avtikið deyðarevsing, kann fremja deyðarevsing. Í greinunum eru serlig forboð ímóti píning, ikki góðkendum læknaligum royndum, trældómi og tvungnum arbeiði. Talan er ikki um tvungið arbeiði, um ein persónur skal í hertænastu, ella um ein persónur skal tæna landinum, av tí at neyðstøða ella vanlukka hóttir lív og vælferð í samfelagnum. Rættindi hjá einstaklingum í sambandi við frælsi og persónliga trygd eru eisini fevnd av hesum greinum. T.d. eru ásetingar um, at eingin skal verða tilvildarliga handtikin ella settur í varðhald.

Í november 2007 boðaði Danmark ST frá, at deyðarevsing viðvíkjandi borgarligum revsimálum varð tikin av við lóg í Føroyum í 1930. Tó var deyðarevsing í hernaðartíðum formelt loyvd í Føroyum til 2003, tá ið nýggj hernaðarlóggáva varð sett í gildi. Sambært frágreiðingini til ST var seinasti deyðadómur útinntur í Føroyum í 1707.

*Grein 12 og 13*
*Greinirnar 12 til 13* snúgva seg um rættin at flyta antin inn ella út av einum limaríki, ella at flyta inni í limaríkinum, og rættin at velja sær bústað í einum limaríki. Serligar reglur verða ásettar um, nær limaríki kunnu útvísa ein útlending.

*Grein 14 til 16*
Greinirnar 14 til 16 snúgva seg um, hvussu ein persónur skal viðfarast av dómsvaldinum. *Grein 14* tryggjar rættin til rættvísan rættargang bæði í revsimálum og borgarligum málum. Ásett verður, at øll eru líka fyri dómstólunum, og at ein og hvør, ið er ákærdur fyri lógarbrot, hevur rætt til at verða taldur sakleysur, til hann er funnin sekur eftir lógini. Serligar ásetingar eru um, hvørji minsturættindi ein hevur í revsimálum. Eftir *grein 15* kunnu borgarar ikki revsast fyri eina gerð, ið ikki var revsiverd, tá ið hon var framd. Dømi um hetta er, at ein persónur kann ikki revsast fyri at hava roykt inni á einum skúla í Føroyum, áðrenn lóg um tiltøk at minka um royking kom í gildi í Føroyum. Í *grein 16* verður ásett, at øll hava rætt til at verða viðurkend sum persónar fyri lógini. Hetta merkir, at øll hava rætt til at verða vard av lógunum í einum landi, uttan mun til hvar tey eru stødd. Hóast borgarar í einum limaríki, sambært lóggávuni, kunnu hava betri rættindi enn ikki-borgarar, skal rættarskipanin tó viðurkenna øll, eisini ikki-borgarar, sum “persónar fyri lógini”.

*Grein 17 til 22*
Greinirnar 17 til 22 áseta rættin til frítt at trúgva, hugsa og tala uttan uppílegging. Í *grein 17* verður ásett, at eingin eigur at verða fyri tilvildarligari ella ólógligari uppílegging í persónligu viðurskifti síni, familju, heim ella brævaskifti. *Grein 18* ásetur rættin til hugsanar- og trúarfrælsi, herundir frælsi til at hava ella velja sína trúgv ella sannføring. *Grein 19* ásetur rættin til áskoðanarfrælsi og talufrælsi. Hesin rættur fevnir um frælsi til at leita sær, fáa og geva alskyns upplýsingar og hugmyndir uttan mun til landamark, í munnligum, skrivligum ella prentaðum líki v.m. *Grein 21* ásetur rættin til frítt at koma saman á friðarligan hátt, t.d. í mótmælisgongu, og *grein 22* ásetur rættin frítt at fara upp í felag saman við øðrum, t.d. fakfelag. Legg til merkis, at tá ið tað í hesum greinum verður skrivað:

"uttan uppílegging", so er talan um ólógliga uppílegging. Uppílegging, ið er innanfyri lógarinnar karmar, er í lagi.

*Grein 23 og 24*

*Greinirnar 23 og 24* viðurkenna tað serliga, ið familjan hevur at siga fyri tann einstaka, og áseta ymisk rættindi viðvíkjandi hjúnabandi, t.d. at eitt par ikki kann giftast, uttan at bæði samtykkja av fríum vilja. Greinirnar áseta eisini rættindi hjá børnum.

*Grein 25 til 27*

*Grein 25* ásetur rættin hjá einum og hvørjum at luttaka í politikki, herundir rættin at atkvøða, rættin at verða valdur, at val skulu verða við jøvnum millumbili við javnbjóðis valrætti og loyniligari atkvøðugreiðslu. Greinin ásetur eisini rættin til at luttaka í almennum málum.

Í g*rein 26* verður ásett, at øll eru jøvn fyri lógini og hava rætt til somu lógarvernd, uttan at nakar mismunur verður gjørdur. Lógin skal tí banna ein og hvønn mismun og tryggja øllum javna og munagóða vernd fyri mismuni av øllum slag, so sum vegna ættarslag, húðarlit, kyn, mál, átrúnað, politiska ella aðra áskoðan, tjóðskaparligan ella samfelagsligan uppruna, ognir, barnsburð ella aðra støðu. Mannarættindanevndin hevur lagt stóran dent á at kanna, um limaríkini útinna krøvini í hesi grein, soleiðis at lóggávan í limaríkjunum svarar til greinina.

*Grein 27* ásetur, at persónar, ið hoyra til ein minnilutabólk, tað verið seg etniskan, religiøsan ella málsligan minnilutabólk, hava rætt til, saman við hinum í bólkinum, at nýta og praktisera teirra egnu mentan, trúgv ella mál. Henda grein skal skiljast sum verjandi ein bólk av fólkum, heldur enn bara at verja ein einkultan persón.

Í frágreiðingini til ST verður sagt, at einasti stóri etniski og málsligi minniluti í Føroyum eru danir. Sambært heimastýrislógini er ikki loyvt at gera mun á dønum og føroyingum, og danir kunnu nýta sítt móðurmál í Føroyum.

### *Gildiskoma*

Sáttmálin um borgarlig og politisk rættindi var klárur at undirrita í New York tann 19. desember 1966. Danmark undirritaði sáttmálan tann 20. mars 1968 og staðfesti sáttmálan tann 6. januar 1972. Av tí at Danmark ikki tók territorialt fyrivarni fyri Føroyum, er sáttmálin eisini galdandi í Føroyum. Sáttmálin kom í gildi tann 23. mars 1976, tá ið 35 lond høvdu staðfest sáttmálan. Í dag hava 160 limaríki staðfest sáttmálan.

Øll Norðurlond staðfestu sáttmálan í 70-árunum, og tað er ikki so løgið, tí Norðurlond eru kend fyri at seta mannarættindi høgt. Heldur ikki kann tað undra nakran, at eitt land sum Kina bert hevur undirritað sáttmálan, men ikki enn hevur bundið seg til sáttmálan við at staðfesta hann.

### *Hvørjar skyldur hava limaríkini ?*

Í grein 2 í sáttmálanum er ásett, at limaríkini binda seg til at fremja neyðug tiltøk við lóggávu ella á annan hátt at tryggja tey rættindi, sum eru staðfest í sáttmálanum, um hesi ikki longu eru framd. Hesi rættindi skulu tryggjast uttan mismun av nøkrum slag so sum vegna ættarslag, húðarlit, kyn, mál, átrúnað, politiska ella aðra áskoðan, uppruna í tjóð ella samfelagsstætt, ognarviðurskifti, barnsburð ella aðra støðu.

Fyri Føroyar merkir hetta, at tá ið vit er vorðin partur av sáttmálanum, hevur Føroya løgting skyldu til at seta í gildi lógir, ið tryggja tey rættindi, ið eru staðfest í sáttmálanum. Hetta tó bert um hesi mannarættindini ikki longu eru galdandi í Føroyum, t.d. kann nevnast at fleiri av mannarættindunum eru niðurfeld í grundlógina.

Eftir grein 2 binda limaríkini seg eisini til at tryggja øllum borgarum, hvørs rættindi sambært hesum sáttmála eru brotin, rætt til munagóða rættarverju, og tryggja, at tann, sum krevur slíka rættarverju, skal fáa sítt mál roynt fyrisitingarliga hjá dómsvaldinum ella hjá lóggávuvaldinum.

Til dømis skal ein føroyingur, um hann verður forðaður í at hava sína egnu trúgv, ella um hann er fyri ólógligari uppílegging í sítt privatlív, hava møguleika fyri at kæra málið til eina kærunevnd ella annan myndugleika í almennu fyrisitingini, ella skal viðkomandi hava møguleika fyri at leggja málið fyri rættin.

***Mannarættindanevndin***

Eftir hesum sáttmála varð ein Mannarættindanevnd *(Human Rights Committee)* sett á stovn, (sí kap. 4 í sáttmálanum).

Mannarættindanevndin hevur 18 limir. Nevndin er vald fyri 4 ár í senn og fær samsýning frá Sameindu Tjóðum. Aðalskrivari Sameindu Tjóða veitir nevndini starvsfólk, skrivstovu, soleiðis at nevndin kann gera sítt arbeiði til fulnar.

Limirnir í nevndini verða valdir við loyniligari atkvøðugreiðslu. Tað verður sett sum krav til limirnar, at teir skulu vera borgarar í einum av limaríkjunum, teir skulu vera høgt í metum millum fólk, og teir skulu hava viðurkendan serkunnleika í mannarættindum. Nakrir av nevndarlimunum skulu helst vera løgfrøðingar. Nevndin skal samansetast soleiðis, at tað er eitt javnt landafrøðiligt býti av nevndarlimum, og nevndarlimirnir skulu umboða ymsar mentanir og tær mest týðandi rættarskipanirnar, ið eru í Sameindu Tjóðum.

Av teimum 18 limunum, ið sita í Mannarættindanevndini í dag, eru 5 limir úr Europa. 13 av limunum í nevndini eru menn, og 5 av limunum eru kvinnur.

***Hvørjar uppgávur hevur Mannarættindanevndin ?***

Nevndin hevur til uppgávu at hava eftirlit við, at limaríkini halda sínar skyldur sambært sáttmálunum. Hetta verður framt við, at nevndin viðger frágreiðingar frá limaríkjunum, klagur frá limaríkjum og sendir út almennar viðmerkingar til limaríkini. Mannarættindanevndin viðger eisini klagur frá einstaklingum. Niðanfyri verður greitt nærri frá hesum uppgávum.

*Frágreiðingar*
Limaríkini hava skyldu til at geva frágreiðingar um tey tiltøk, tey hava gjørt til at fremja tey rættindi, sum eru staðfest í sáttmálanum, og um tey framstig, sum eru gjørd til, at fólk fær notið hesi rættindi. Eisini skulu limaríkini upplýsa um teir trupulleikar, tey hava við at fremja henda sáttmála.

Fyrsta frágreiðing skal latast inn innan eitt ár eftir, at sáttmálin hevur fingið gildi í tí einstaka limaríkinum. Eftir hetta skal frágreiðing latast, tá ið Mannarættindanevndin biður um tað.

Tá ið Mannarættindanevndin hevur móttikið eina frágreiðing frá einum limaríki, kannar nevndin frágreiðingina. Tá ið nevndin er liðug við viðgerð sína, sendir nevndin sína frágreiðing og almennu viðmerkingar aftur til limaríkið. Nevndin kann eisini senda Búskapar- og Almannaráðnum *(The Economic and Social Council)* hesar viðmerkingar saman við avritum av frágreiðingum, sum hon hevur fingið frá limaríkjunum. Limaríkini kunnu síðani venda aftur við viðmerkingum sínum til nevndina.

Sum øll limaríki skal Danmark við jøvnum millumbili lata inn frágreiðing til ST viðvíðkjandi sáttmálanum. Síðstu ferð, Danmark lat inn frágreiðing hesum viðvíkjandi, var í november 2007. Í frágreiðingini greiðir Danmark frá, hvussu støðan er viðvíkjandi borgarligum og politiskum rættindum í landinum. Á bls. 6-10 er frágreiðing um føroysk viðurskifti. Sambært frágreiðingini uppfylla føroyingar flestu krøvini í hesum sáttmálanum. Útgreinandi fundir um frágreiðingina hava verið millum umboð frá ST og umboð frá Danmark og Føroyum, men Mannarættindanevndin er í skrivandi løtu ikki komin við sínum endaligu viðmerkingum til frágreiðingina. Áhugavert verður at síggja, hvørjar viðmerkingar nevndin fer at hava til frágreiðingina.

*Klagur frá limaríkjum um limaríki ella "Interstate-complaints"*
Eitt limaríki kann senda klagu til Mannarættindanevndina um, at eitt annað limaríki ikki heldur seg til sínar skyldur sambært sáttmálanum. Mannarættindanevndin tekur bert eitt slíkt mál upp, um allir aðrir møguleikar fyri at loysa trætuna

eru troyttir. Tekur nevndin málið upp til viðgerðar, fyrireikar hon fyrst málið. Í fyrireikingararbeiðinum hava avvarðandi limaríkini skyldu til at lata nevndini allar tær upplýsingar, ið nevndin biður um. Tá ið málið verður viðgjørt í nevndini, hava limaríkini rætt til at verða umboðað. Nevndin roynir fyrst at finna eina semju millum partarnar. Verður semja gjørd, skrivar nevndin eina frágreiðing um faktum og niðurstøðu í málinum. Er semja ikki møgulig, ger nevndin bert eina frágreiðing um faktum í málinum og tey skrivligu sjónarmið og upprit, ið eru førd fram. Frágreiðingin verður send avvarðandi limaríkjum.

*Almennar viðmerkingar ella vegleiðingar*
Umframt hetta sendir Mannarættindanevndin eisini limaríkjunum almennar vegleiðingar ella viðmerkingar um ymisk evni, sum nevndin metir eru av týdningi fyri borgarlig og politisk rættindi (sí grein 40, stk. 4).

*Klagur frá einstaklingum*
At enda kann Mannarættindanevndin ikki minst viðgera klagur frá einstaklingum, um einstaklingar halda seg hava verið fyri broti á tey rættindi, ið eru staðfest í sáttmálanum.

Tá ið ein einstaklingur sendir inn klagu til Mannarættindanevndina, skal nevndin senda klaguna til hoyringar hjá limaríkinum, áðrenn støða verður tikin til klaguna. Limaríkið hevur síðani skyldu til innan seks mánaðir at leggja fyri nevndina skrivliga frágreiðing í málinum. Limaríkið skal eisini upplýsa Mannarættindanevndini, hvat limaríkið hevur gjørt fyri at bøta um støðuna, ið klagað verður um.

Hetta, at einstaklingar kunnu senda klagu beinleiðis til Sameindu Tjóðir, hevur stóran týdning fyri, hvørja ávirkan konventiónin hevur fyri tann einstaka borgaran í limaríkinum. Mannarættindanevndin kann átala stjórnir í limaríkjunum fyri at hava framt brot á tey rættindi, ið eru staðfest í sáttmálanum um borgarlig og politisk rættindi. Nevndin hevur tó ikki møguleika fyri at áleggja limaríkinum at broyta støðu ella gjalda endurgjald til viðkomandi. Men tað, at stjórnir alment kunnu fáa átalu frá ST, ið verður almannakunngjørd fyri øllum limaríkjunum,

hevur ávirkan. Einki limaríki ynskir at verða hongt út sum eitt land, ið ikki yvirheldur mannarættindi. Ein slík neilig umrøða kann ganga út yvir umdømið hjá limaríkinum. Tí vilja flestu lond royna at halda seg til og broyta siðvenju soleiðis, at tey ikki fáa átalu frá ST.

Rætturin hjá einstaklingum at klaga til Mannarættindanevndina stendur ikki í sjálvum sáttmálanum, men er staðfestur í eini valfríari protokol til sáttmálan, ið varð skrivað í 1966. Danmark undirritaði protokollina tann 20. mars 1968, og staðfesti protokollina tann 6. januar 1972. Av tí at einki territorialt fyrivarni varð tikið fyri Føroyar, er protokollin galdandi í Føroyum. 110 limaríkir hava í dag staðfest hesa protokollina. Protokollin kom í gildi tann 23. mars 1976, tá ið 10 limaríkir høvdu staðfest hana. Tað vil siga, at føroyingar eisini hava møguleika fyri at senda inn klagu til Mannarættindanevndina, um hildið verður, at brot er framt á tey rættindi, ið eru staðfest í sáttmálanum.

### *Ein roynd verður gjørd at avtaka deyðarevsing*

Í 1989 varð valfrí protokol nr. 2 til sáttmálan um borgarlig og politisk rættindi veruleiki. Í Protokollini verður staðfest, at eingin skal verða avrættaður í einum limaríki, sum hevur staðfest hesa protokollina. Limaríkini skulu eisini taka øll neyðug stig til at taka av deyðarevsing í sínum landi.

Danmark undirritaði hesa protokollina tann 13. februar 1990, og staðfesti protokollina tann 24. februar 1994. Av tí at einki territorialt fyrivarni varð tikið fyri Føroyar, er protokollin galdandi í Føroyum.



©Amnesty International

*22 ára gamla iranska Delara Darabi varð avrættað 1. mai 2009. Iran er eitt av londunum, sum loyvir deyðarevsing.*

Bert 64 limaríki hava enn staðfest hesa protokollina. Valfría protokollin kom í gildi tann 11. juli 1991, tá ið 10 limaríki høvdu staðfest hana. Nevnast kann, at øll Norðurlond staðfestu hesa protokollina tíðliga í 90-árunum. Av tí at Norðurlond ikki fremja deyðarevsing, var eingin trupulleiki hjá teimum at staðfesta hesa protokollina.

Verri er við einum landi sum t.d. Kina. Av tí at Kina ikki hevur staðfest sáttmálan, hevur Kina heldur ikki staðfest protokollina, og hetta verður neyvan gjørt í bræði. Kina gongur nevniliga inn fyri deyðarevsing. Sambært keldum hjá Amnesty International vóru 1010 fólk avrættað í Kina í 2006. Hetta eru 63% av øllum avrættingum í heiminum. Sambært kinesiskum serfrøðingum liggur veruliga talið væl hægri á uml. 7.500 - 8.000 fólk. Í alt 68 brotsgerðir kunnu í Kina føra til deyðarevsing. Tveir triðingar av hesum eru ikki-harðligar brotsgerðir, so sum skattasvik, mutur og narkotikabrotsgerðir. Í 2007 varð tó avgjørt, at Hægstirættur í Kina skuldi góðkenna allar deyðarevsingar. Hetta fer vónandi at føra til eina betring í Kina, men enn er langt eftir á mál.

**Búskapar-, almanna- og mentanarrættindi**

Rætturin til at liva eitt virðiligt lív kann ikki vinnast, um tey grundleggjandi rættindini til arbeiði, mat, bústað, heilsu, útbúgving og mentan ikki eru nøktandi og líka atkomulig fyri øll í einum samfelag. Á hesum grundarlagi hava Sameindu Tjóðir tilevnað altjóða sáttmálan um búskapar-, almanna-, og mentanarrættindi *(The International Covenant on Economic, Social and Cultural Rights (ICESCR)*.

Ítøkiligu rættindini í hesum sáttmála eru ásett í greinunum 6-15. Í *grein 6* verður rætturin til arbeiði staðfestur. Hetta er arbeiði, ið einstaklingar hava valt ella átikið sær av fríum vilja. Fyri fólk flest er arbeiði ein ómetaliga týdningarmikil partur av lívinum, bæði sosialt og sum ein inntøkukelda, sum tryggjar teimum virðiligar liviumstøður. Rætturin til arbeiði er grundleggjandi fyri, at borgarin kann nýta eksistensiel rættindi, so sum at keypa mat, klæði og bústað. Rætturin er eisini avgerandi fyri at tryggja borgaranum tign og sjálvræði.

*Grein 7* ásetur rættin til eina minstuløn fyri arbeiði. Lønin eigur at vera rímilig og tryggja, at borgarin kann liva virðiligt. Eisini tryggjar greinin borgarum rættvísar og góðar arbeiðsumstøður.

Í *grein 8* viðurkenna limaríkini rættin hjá einum og hvørjum at stovna ella gerast limur í fakfelag. Einstaklingar hava eftir hesum rætt til ikki at verða tvingaðir til at vera við í einum ávísum fakfelag. Rætturin til kollektivar samráðingar, rætturin til verju ímóti upploysn ella avtøku og rætturin til at fara í verkfall er eisini fevndur av hesi grein. Hesi rættindi eru grundleggjandi, um rættindini fyri arbeiðstakarar og onnur skulu verða framd.

Í *grein 9* viðurkenna limaríkini rættin hjá einum og hvørjum til almannatrygd, herundir almannatrygging. Eitt stórt tal av limaríkjunum í Sameindu Tjóðum hava ikki eitt nøktandi sosialt trygdarnet til at verja borgarar, ið eru eldri, bera brek, hava vánaliga heilsu ella aðrar umstøður, sum gera, at tað ikki er møguligt hjá teimum at vinna sær pening til virðilig lívskor. Samstundis leggja fleiri ST-limaríki ábyrgdina av almannatrygd yvir á privata sektorin. Hesum stúrir Nevndin fyri búskapar-, almanna- og mentanarrættindum fyri. Nevndin leggur tí serligan dent á at biðja limaríkini upplýsa, hvørt tey hava nøktandi skipanir viðvíkjandi læknaviðgerð, peningaveitingum við sjúku, arbeiðsloysi og barsil, veitingum til eldri og fólk, ið bera brek, og familjuveitingum.

Í *grein 10* viðurkenna limaríkini, at mest møgulig vernd og hjálp verður veitt familjuni. Greinin verjir familjuna, møður og børn. Til dømis er rætturin til at giftast av fríum vilja eisini fevndur av hesi grein. Ein kann tí undrast á, at Sameindu Tjóðir ikki gera meira við tey lond, ið fremja tvangsgiftu. Møður skulu hava serliga verju áðrenn og eftir føðing. Hetta biður eftirlitsnevndin limaríkini upplýsa um. Eftirlitsnevndin hevur tó ikki lagt nógva orku í at kanna umstøður viðvíkjandi familjurættindum, men nevndin hevur harafturímóti lagt dent á at kanna umstøður hjá børnum, t.d. til barnaarbeiði og til liviumstøður hjá børnum.

Í *grein 11* viðurkenna limaríkini rættin til sømilig lívskor fyri einstaklingin og

familjuna, herundir nóg mikið av mati, klæðum og hóskandi bústað. Limaríkini binda seg til at arbeiða fram ímóti alla tíðina at betra um hesi lívskor. Eftirlitsnevndin hevur lagt stóran dent á hesa grein, serliga viðvíkjandi rættinum til hóskandi bústað. Í einari viðmerking til sáttmálan sigur Eftirlitsnevndin, at tað ikki er nøktandi bert at hava tak yvir høvdið eftir hesi grein. Ein og hvør eigur at hava rætt til at búgva eitt stað, har tað er trygt, friðarligt og virðiligt.

Í *grein 12* viðurkenna limaríkini rættin hjá einum og hvørjum til at njóta likamliga og andliga heilsu á best møguliga hátt. Øll skulu hava líka rætt til heilsutænastu. Hetta merkir ikki, at ein hevur rætt til at vera sunnur og frískur. Hetta merkir, at limaríkini skulu tryggja teirra borgarum hægst møguligan standard av heilsu, tað vil siga í tann mun limaríkini megna at fíggja heilsuverkið.



©Kevin HIll

*Meira enn ein hálv millión kvinnur doyggja óneyðugt hvørt ár í sambandi við barnsburð. 95% av teimum eru fátækar og koma úr menningarlondum*

Í *grein 13 og 14* viðurkenna limaríkini rættin hjá einum og hvørjum til útbúgving. Hesar báðar greinirnar áleggja limaríkjunum undirvísingarskyldu og ókeypis skúlagongd fyri øll børn í barnaskúlanum. Harumframt hava øll børn og ung líka rætt til útbúgving og rætt til frítt at velja útbúgving v.m. Rætturin til undirvísing er ein grundleggjandi partur av at kunna nýta síni mannarættindi, og útbúgving styrkir um mannarættindi og grundleggjandi demokratiskar meginreglur. Hetta hava Sameindu Tjóðir langt síðani viðurkent og avgjørdu tí, at 1995-2004 skuldi

verða *The United Nations Decade for Human Rights Education*. Eftirlitsnevndin hevði eina almenna umrøðu av hesum evni í 1994.

Í *grein 15* viðurkenna limaríkini rættin hjá einum og hvørjum til at taka lut í mentanarlívi v.m. Hóast hesi rættindi kunnu tykjast einki at hava við mannarættindi at gera, so eru hesi av grundleggjandi týdningi fyri líkaviðgerð, framsøgufrælsi, rættin til at móttaka og geva kunning, og rættin til fulla menning av sínari persónligheit.

### Gildiskoma

ST-sáttmálin um búskapar-, almanna- og mentanarrættindi varð klárur at undirrita í New York tann 16. desember 1966. Danmark undirritaði sáttmálan tann 20. mars 1968 og staðfesti sáttmálan tann 6. januar 1972. Sáttmálin kom í gildi tann 3. januar 1976, tá ið 35 lond høvdu staðfest sáttmálan. Í dag hava 157 limaríkir staðfest sáttmálan. Sáttmálin varð lýstur sum galdandi fyri Føroyar tann 8. apríl 1999.

### Skyldur hjá limaríkjum

Í grein 2 í sáttmálanum er ásett, at limaríkini binda seg til, bæði hvør sær og við millumtjóðasamstarvi, at gera alt, sum tey megna, til at tey rættindi, sum eru ásett í hesum sáttmála, so líðandi verða framd til fulnar við øllum nýtiligum ráðum, m.a. við lóggávu.

Føroyar hava ikki, sum partur av hesum sáttmála, skyldu til her og nú at tryggja borgarum sínum øll tey rættindi, ið eru nevnd í sáttmálanum. Til dømis hava Føroyar ikki skyldu til beinanvegin at tryggja øllum einligum forsyrgjarum rættindi til búskaparliga og sosialt at verða líkastillað við aðrar borgarar í Føroyum, men Føroyar binda seg til at gera alt, ið landið megnar, fyri at geva hesum samfelagsbólki búskaparlig og sosial rættindi. Hetta hava vit bundið okkum til at gera so líðandi, alt eftir hvørja fíggjarorku vit hava, og hvørja orku vit hava í Landsstýri og Løgtingi at tilevna slíka lóggávu.

Føroyar nýtast heldur ikki, sum limaríki, at gera lóggávu á øllum økjum. Tað ber eisini til at tryggja borgarum búskapar-, almanna-, og mentanarrættindi við at veita pening til eitt ávíst endamál ella gera ætlanir á ávísum økjum. T.d. kann ætlan gerast, ið tryggjar, at eldri fólk fáa tilboð um virðiligan bústað á røktarheimi. Samstundis verður fíggjarætlan gjørd, ið greinar, nær landið fíggjarliga er ført fyri at veita hesa tænastu. Verður henda ætlan fylgd, uppfylla vit við tíðini ávísar skyldur í sáttmálanum.

Júst henda áseting, um at limaríkini bert so líðandi skulu tryggja ásettu rættindini í tjóðarlóggávu, vísir høvuðsmunin ímillum teir báðar sáttmálarnar frá 1966. Krav verður sett um, at borgarlig og politisk rættindi so vítt gjørligt skulu verða gjøgnumførd beinanvegin, meðan búskapar-, almanna- og mentanarrættindi skula verða gjøgnumførd so líðandi, tá ið limaríkini er før fyri tí.

Hetta stillar samstundis tey rættindini, ið verða staðfest í sáttmálanum fyri búskapar-, almanna-, og mentanarrættindi verri enn tey rættindi, ið verða staðfest í ST-sáttmálanum fyri borgarlig og politisk rættindi, men orsøkin til tað er, at borgarlig og politisk rættindi ikki bera so stóran kostnað við sær, har búskapar-, almanna- og mentanarrættindi eru sera kostnaðarmikil at seta í verk. Tað er tí ikki møguligt hjá nógvum ST-londum at seta hesi rættindi í verk beinanvegin. Tey hava stutt sagt ikki fíggjarligu orkuna til tað.

Hóast hetta er grein 2 í sáttmálanum av alstórum týdningi fyri, at ásetingarnar í sáttmálanum verða framdar í verki í limaríkjunum.

### *Nevndin fyri búskapar-, almanna- og mentanarrættindum*

Eftir ásetingunum í sáttmálanum er tað Búskapar- og Almannaráðið, ið hevur eftirlitið við, at sáttmálin verður fylgdur (sí kap. 4 í sáttmálanum). Av tí, at Ecosoc ikki hevði nóg nógva orku til at røkja sína eftirlitsuppgávu, stovnaði ráðið Nevndina fyri búskapar-, almanna- og mentanarrættindum *(The Committee on Economic, Social and Cultural Rights, (CESCR)* til at hava eftirlit við sáttmálanum. Nevndin

varð stovnað í 1985 og hevði sín fyrsta fund í 1987. Nevndin hittist áleið tvær ferðir um árið og fundast tá í einar tvær til tríggjar vikur.

Í nevndini eru 18 limir, sum eru serfrøðingar við góðkendari servitan á mannarættindaøkinum. Limirnir í nevndini eru óheftir og arbeiða við støði í teirra persónliga førleika og ikki sum umboð fyri stjórnir. Í løtuni eru 14 menn og 4 kvinnur í nevndini. 5 av teimum 18 limunun eru úr Europa, tó er eingin limur úr Norðanlondum.


©UN Photo/Paulo Filgueiraas

*Búskapar- og Almannaráðið á fundi*

Búskapar- og Almannaráðið velur limirnar í nevndini fyri fýra ár í senn. Limirnir kunnu verða afturvaldir. Nevndin er sostatt ein nevnd undir Búskapar- og Almannaráðnum og fær sín formliga myndugleika frá ráðnum. Valið av nevndarlimum fer fram á loyniligari atkvøðugreiðslu eftir lista av serfrøðingum, ið limaríkini hava innstillað. Limirnir skulu umboða ymisku heimspartarnar, soleiðis at sessirnir verða javnt geografiskt býttir. Harumframt skulu limirnir umboða ymisku sosialu og løgfrøðiligu skipanirnar í heiminum.

### *Hvørjar uppgávur hevur nevndin ?*

Uppgávan hjá nevndini er at hava eftirlit við, at limaríkini halda sínar skyldur sambært sáttmálanum. Hetta verður framt við, at nevndin viðger frágreiðingar frá limaríkjunum, og við, at nevndin sendir út almennar viðmerkingar ella vegleiðingar til limaríkini. Niðanfyri verður greitt frá hesum uppgávum.

*Frágreiðingar*
Limaríkini hava skyldu til at lata frágreiðingar um tey tiltøk, tey hava sett í verk, og tey framstig, ið tey hava gjørt fyri at fremja tey rættindi, ið eru staðfest í sáttmálanum. Í frágreiðingini kunnu limaríkini vísa á viðurskifti og trupulleikar, ið hava havt ávirkan á, at limaríkini ikki er komin á mál við at fremja sáttmálan í verki.

Fyrsta frágreiðing skal latast Sameindu Tjóðum tvey ár eftir, at limaríkið hevur staðfest sáttmálan, og hereftir skal frágreiðing latast 5. hvørt ár. Nevndin kannar frágreiðingarnar frá limaríkjunum og ger sínar viðmerkingar og tilmæli til frágreiðingarnar. Viðmerkingarnar verða niðurfeldar í skjalið: *Concluding Observations* og verða sendar limaríkjunum.

Sum øll limaríki skal Danmark lata inn frágreiðing til Sameindu Tjóðir viðvíkjandi sáttmálanum um búskapar-, almanna- og mentanarrættindi. Fjórða og síðsta frágreiðing, ið Danmark læt viðvíkjandi hesum sáttmálanum, var tann 28. apríl 2003. Tíverri stendur ikki nógv um Føroyar í hesari frágreiðing. Bert ein stutt frágreiðing um, hvussu er statt við sjálvsavgerðarrætti føroyinga. Einki verður skrivað um, hvussu annars er statt í Føroyum viðvíkjandi búskapar-, almanna- og mentanarrættindum.

Í skjalinum: *Concluding Observations* frá desember 2004 frá nevndini fær Danmark ymiskar viðmerkingar, men eingin viðmerking er til, at frágreiðing ikki er um serlig føroysk viðurskifti.

*Almennar viðmerkingar ella vegleiðingar*
Í 1988 avgjørdi eftirlitsnevndin at fara undir at gera almennar viðmerkingar ella vegleiðingar viðvíkjandi ymiskum týdningarmiklum evnum innan búskapar-, almanna- og mentanarrættindi. Hetta fyri at hjálpa limaríkjunum at gera rættindini í sáttmálanum virkin í teirra egna ríki.

Í apríl 1996 hevði nevndin gjørt 6 slíkar vegleiðingar. Hesar vóru: Vegleiðing um frágreiðingar frá limaríkjum, um altjóða tekniska hjálp, um innihaldið av

skyldunum hjá limaríkjunum, um rættin til hóskandi bústað, um persónar, ið bera brek, og um búskapar-, almanna- og mentanarrættindi hjá eldri fólki.

*Kunning til Búskapar- og Almannaráðið*
Eftirlitsnevndin skal við jøvnum millumbilum kunna Búskapar- og almannaráðið um sítt virksemi. Nevndin skal í stuttum kunna ráðið um tær frágreiðingar, ið nevndin hevur fingið frá limaríkjum, og um hvørjar viðmerkingar nevndin hevði til frágreiðingarnar. Eisini skal nevndin kunna ráðið um almenn viðurskifti, t.d. skal kunnast um teir almennu trupulleikar, ið limaríkini hava við at uppfylla treytirnar í sáttmálanum.

## *Skjótt fáa einstaklingar møguleika at klaga til nevndina*

Enn er ikki møguligt hjá einstaklingum at senda inn klagu til nevndina fyri búskapar-, almanna- og mentanarrættindum, men hetta verður væntandi møguligt skjótt.

Leingi hevur verið arbeitt við at tilevna eina nýggja valfría protokol til nevndina fyri búskapar-, almanna- og mentanarrættindum. Ein protokol, ið skal gera tað møguligt hjá einstaklingum at senda inn klagu til eftirlitsnevndina. Tann 18. juni 2008 varð teksturin til nýggju valfríu protokollina góðtikin av ST-Mannarættindaráðnum, og tað sær tí út til, at protokollin skjótt er klár at undirrita, og síðani kann hon staðfestast av ST-limaríkjunum.

Tá ið henda protokol kemur í gildi, verður tað møguligt hjá einstaklingum at senda inn klagu viðvíkjandi t.d. teirra bústaðarumstøðum, mati, atgongd til reint vatn og teirra rættindum til heilsu og útbúgving. Stórur tørvur er á, at tað ber til hjá einstaklingum at klaga, serliga í teimum fátøku pørtunum av heiminum.

At einstaklingar hava møguleika at senda klagu til Sameindu Tjóðir, hevur stóra ávirkan á, hvønn týdning hesin sáttmálin fær fyri tann einstaka borgaran í einum limaríki. Tá fer at bera til hjá nevndini at átala stjórnir fyri ikki at halda seg til reglurnar í sáttmálanum í konkretum førum. Einki limaríki ynskir at verða

hongt út fyri brot á mannarættindi, og tí er góður møguleiki fyri, at limaríkini fara at rætta seg eftir átalunum frá nevndini fyri búskapar-, almanna- og mentunarrættindum.

**Samanumtikið**

Við Heimsyvirlýsingini um mannarættindi skrivaðu alheimsins lond undir upp á hugsjónirnar um altjóða mannarættindi, rættindini hjá einstaklingum til borgarlig, politisk, búskapar-, almanna-, og mentanarrættindi. Við Mannarættindasáttmálunum frá 1966 gjørdist møguligt at fremja hesar hugsjónir í verki, við tað at limaríkini bundu seg til at tryggja borgarum í teirra egnu ríkjum hesi rættindi, og við tað at Mannarættindanevndin fekk til uppgávu at hava eftirlit við, at limaríkini hildu sínar skyldur sambært sáttmálunum.

*The International Bill of Human Rights* er hornasteinurin í mannarættindaarbeiðinum hjá Sameindu Tjóðum og hevur síðani verið nýtt sum eitt amboð til at fremja mannarættindi kring allan heim. Saman við Heimsyvirlýsingini hava sáttmálarnir frá 1966 verið fyrimynd fyri eina ørgrynna av altjóða og regionalum mannarættinda-sáttmálum. Teirra millum eru ST-sáttmálin um forboð ímóti pínning og ST-sáttmálarnir um kvinnu- og barnarættindi, og arbeiði fyri mannarættindum heldur á fram. Nýggjast er sáttmálin um rættindi teirra brekaðu, sum í maj 2009 varð samtyktur í Løgtinginum.

# CEDAW – menniskjarættindi fyri kvinnur

*Kristianna W. Poulsen*
*Cand. mag., MSc*
*Forkvinna í Javnstøðunevndini*

*Tað munnu vera nógv, sum ikki vita, at tað finst ein ST-sáttmáli, sum serliga viðvíkir rættindum hjá kvinnum, og sum Føroyar hava skyldu til at halda. Talan er um CEDAW – Convention on Elimination of Discrimination Against Women. Hesin sáttmálin, eisini nevndur Kvinnurættindasáttmálin, áleggur limaríkjunum at avtaka allan mismun móti kvinnum og at fremja javnstøðu millum kvinnur og menn á øllum økjum í samfelagnum.*

## Yvir 20 ár við Kvinnurættindasáttmálanum í Føroyum

Sáttmálin varð samtyktur og kom í gildi í Danmark í mai 1983. Danmark staðfesti sáttmálan uttan at taka territorialt fyrivarni fyri Føroyar.

Sambært løgtingssamtykt frá 31. mars 1987 samtykti Løgtingið, at sáttmálin var komin í gildi í Føroyum. Síðani hetta hevur sáttmálin verið rættarliga bindandi fyri landið. Myndugleikar og allir almennir stovnar í Føroyum hava sostatt í samfull 21 ár havt skyldu til at lóggeva, fyrisita og sum heild at virka í samsvari við sáttmálan, sum áleggur limaríkjunum at virka fyri at avtaka mismun móti kvinnum á øllum økjum í samfelagnum.

Kvinnurættindasáttmálin er ikki í síni heild framdur sum føroysk lóggáva, men kann hava týdning fyri tulking av ásetingum í javnstøðulóg og øðrum lógum um sama evni.

## Kvinnurættindasáttmálin – næstan 30 ár á baki

Sáttmálin varð samtyktur á aðalfundi Sameindu Tjóða í 1979. Hetta var úrslitið av

ágrýtnum arbeiði og virksemi í Sameindu Tjóðum, har kvinnur úr øllum heiminum høvdu ein týdningarmiklan leiklut.

Í 1946 varð Nevndin fyri Støðuna hjá Kvinnum (*Commission on the Status of Women*) stovnað. Henda nevndin skuldi fyrireika viðmæli og frágreiðingar til Búskapar- og almannaráðið fyri at fremja kvinnurættindi á politiskum, búskaparligum, borgaraligum, sosialum og útbúgvingarligum økjum. Nevndin fyri Støðuna hjá Kvinnum gjørdi eitt stórt arbeiði, bæði við at gera kanningar og við at gera sáttmálar um kvinnurættindi, sum Sameindu Tjóðir samtyktu. Fyrst í sjeytiárunum gjørdist tað greitt, at hetta arbeiði ikki var nøktandi, og at mismunur móti kvinnum ikki kundi verða burturbeindur við verandi sáttmálum og samtyktum. Tí mælti Nevndin fyri Støðuna hjá Kvinnum til, at árið 1975 skuldi vera Altjóða Kvinnuár fyri at minna ST-limaríkini á, at nýggj og økt tiltøk vóru neyðug fyri at loysa teir løgfrøðiligu og praktisku spurningarnar, sum stóðust av vantandi javnstøðuni millum kyn. Nevndin kom eisini fram til, at eitt nýtt, løgfrøðiliga bindandi tól fyri menniskjarættindi fyri kvinnur var neyðugt. Eftir drúgva viðgerð og drúgt kjak, bæði í Nevndini fyri Støðuna hjá Kvinnum og í Sameindu Tjóðum varð Kvinnurættindasáttmálin samtyktur í Sameindu Tjóðum hin 18. desember í 1979.


©UN Photo/Paulo Filgueiraas

*Altjóða kvinnudagurin 2008*

Sáttmálin kom í gildi sum ein altjóða sáttmáli 3. september 1981, eftir at 20

lond høvdu staðfest hann. Í 1989, á 10 ára degnum, høvdu næstan 100 lond tikið undir við sáttmálanum. Á heysti 2007 høvdu 185 ST-limaríkir staðfest sáttmálan. Tilsamans eru 192 limaríki í Sameindu Tjóðum.

Tey 7 ST-limaríkini, sum ikki hava staðfest sáttmálan, eru Iran, Nauru, Palau, Qatar, Somalia, Sudan og Tonga. Talan er um antin islamisk lond (Iran, Qatar, Somalia og Sudan) ella smá lond í Stillahavinum (Nauru, Palau og Tonga).

**Sáttmálin**

Sáttmálin er eitt grundleggjandi altjóða rættarligt amboð fyri at verja menniskjarættindi. Í sáttmálanum eru ásetingar fyri, hvørji borgararættindi, politisk, búskapar-, almanna- og mentanarrættindi hjá kvinnum eiga at verða vird og hildin av limaríkjunum.

Tað er bannið móti mismuni, sum er snúningsdepilin innanfyri tey virkisøki, sum sáttmálin fevnir um. Í grein 1 í sáttmálanum verða mismunur og øki, sum lógin fevnir um, lýst sum: "*ein og hvør munur, útilokan ella avmarking við teirri avleiðing ella við tí endamáli at gera verri ella at seta til síðis meginregluna um, at kvinnur á jøvnum føti við menn, hóast hjúnastøðu, skulu hava viðurkent, hava ella útinna menniskjarættindi og grundleggjandi frælsisrættindi á politiskum, fíggjarligum, sosialum, mentanarligum, borgarligum og á øllum øðrum økjum*".

Sum skilst, er talan um sera víðgangandi ásetingar um javnstøðu millum kyn.

Tá ið lond staðfesta ST-kvinnurættindasáttmálan, binda tey seg til at átaka sær eina røð av tiltøkum fyri at steðga øllum mismuni mótvegis kvinnum. Millum hesi tiltøk eru:

- at taka grundregluna um javnstøðu millum menn og kvinnur við í landsins lógarverk, at seta úr gildi allar lógir, sum gera mismun og at seta í gildi hóskandi lógir, ið banna mismuni mótvegis kvinnum;

- at seta á stovn nevndir og aðrar almennar stovnar at tryggja, at kvinnur verða væl vardar móti mismuni; og
- at tryggja, at allur mismunur mótvegis kvinnum, framdur av persónum, fyritøkum ella virkjum, verður burturbeindur.

Sáttmálin er grundarlagið undir at fremja javnstøðu millum kvinnur og menn við at tryggja kvinnum javnbjóðis atgongd og javnbjóðis møguleikar í politikki, og í sambandi við útbúgving, heilsu og arbeiði.

Limaríkini játta at taka stig til øll neyðug tiltøk, eisini lóggávu og fyribils tiltøk, til at fremja endamál sáttmálans, so at kvinnur kunnu fáa øll menniskjarættindi umframt grundleggjandi frælsi.

**2 bólkar av greinum**

Sáttmálin er samansettur av formæli og 30 greinum.

Til ber at bólka greinirnar í ein bólk við greinum, sum snúgva seg um, á hvørjum økjum javnstøða millum kyn skal fremjast, og í ein bólk við greinum, ið áseta mannagongdir fyri, hvussu sáttmálin skal haldast. Til fyrra bólkin hoyra grein 1 til 16 og grein 24. Hesar greinir áseta skyldurnar hjá londunum í sambandi við, at londini hava játtað at banna mismuni vegna kyn og hava játtað at arbeiða fyri meginregluni um javnrættindi.

Grein 1 til 5 og grein 24 hava verið nevndar kjarnu-greinirnar. Grein 1 lýsir, hvussu mismunur skal skiljast í sáttmálanum. Greinirnar 2 til 5 tilskila, á hvørjum økjum sáttmálin er galdandi, og hvørji stig limaríki eiga at taka fyri at fremja sáttmálan innlendis. Grein 24 ásetir, at limaríkini skulu taka øll neyðug stig fyri at røkka rættindunum, ið eru ásett í sáttmálanum.

Harumframt eru greinir, sum fevna um ásetingar um ymisk virkisøki í lívinum hjá kvinnum (greinir 6 til 16). Tær snúgva seg um trafficking og prostitusjón (grein 6), um kvinnur í politikki og almennum lívi (grein 7), um kvinnur í altjóða størvum

(grein 8), um tjóðskap (grein 9), um kvinnur og atgongd til útbúgving (grein 10), um kvinnur og atgongd til arbeiðsmarknað (grein 11), um kvinnur og heilsu (grein 12), um kvinnur og búskap og sosialt lív (grein 13), um kvinnur, búsettar í útjaðaraøkjum (grein 14), og um kvinnur og lógarverk (grein 15). Greinirnar, sum snúgva seg um mannagongdir (17 til 23, 25 til 30), lýsa bygnað og arbeiði hjá CEDAW-nevndini *(The Committee on the Elimination of Discrimination against women)*, skylduna hjá limaríkjum at lata inn frágreiðing, mannagongdir í sambandi við atgongd til sáttmálan, umframt fyrivarni.

## Fyrivarni

Kvinnurættindasáttmálin er millum teir ST-sáttmálar, sum flest limaríkini í Sameindu Tjóðum hava tikið undir við. Fatanin av, at kvinnur og menn skulu hava eins góð rættindi er partur av einum modernaðum, demokratiskum hugsanarhátti. Fleiri av teimum londum, sum hava tikið undir við sáttmálanum, hava kortini ikki eina demokratiska stýrisskipan, sum gevur kvinnum og monnum javnbjóðis rættindi til luttøku á øllum økjum. Eitt dømi um hetta er Saudi Arabia, har kvinnur í stóran mun ikki sleppa at taka lut í tí almenna lívinum. Eisini í øðrum londum, sum formliga hava eins rættindi fyri kvinnur og menn, hevur siðvenja, so sum átrúnaður og mentan, við sær, at mismunur verður gjørdur mótvegis kvinnum.

Tað ber til hjá limaríkjunum at staðfesta sáttmálan við fyrivarni, t.e. ein formlig fráboðan um, at landið ikki fatar ein ella fleiri partar av sáttmálanum sum bindandi. Fyrivarni kunnu bert takast, um hesi fyrivarni ikki eru ósambærilig við endamálið í sáttmálanum, sum er at beina burtur allan mismun vegna kyn (grein 28). Eingin annar altjóða sáttmáli um menniskjarættindi hevur elvt til so nógv fyrivarni, ið lond hava tikið fyri kvinnurættindasáttmálanum. Onkur av hesum fyrivarnum eru ikki grundleggjandi í mun til yvirskipaða endamálið við sáttmálanum. Onnur fyrivarni eru so breitt og veikt orðað, at tað er trupult at gera av heilt námeiniliga, hvørjum londini taka fyrivarni ímóti.

Eitt lutfalsliga stórt tal av limaríkjum hava tikið týðandi fyrivarni í mun til grundleggjandi greinir, m.a. ásetingar um javnstøðu innan familjulóggávu,

løgfrøðilig rættindi og borgaraskap. Summi lond hava enntá tikið fyrivarni mótvegis sera týdningarmiklu grein 2, sum fevnir um grundleggjandi viljan hjá londum at beina burtur alt slag av mismuni mótvegis kvinnum. Í grein 2 verður ásett, at limaríkir fordøma alt slag av mismuni móti kvinnum og játta at arbeiða fyri at beina burtur mismun móti kvinnum. Eisini er ásett í grein 2, at limaríkini skulu innlima prinsippið um javnstøðu millum kvinnur og menn í grundlóg ella aðra, hóskandi lóggávu, skulu samtykkja løgfrøðilig ella onnur amboð fyri at banna øllum mismuni móti kvinnum, skulu fremja hóskandi atgerðir fyri at beina burtur allan mismun móti kvinnum, útintur av persónum, stovnum ella fyritøkum, umframt aðrar ásetingar um, hvussu limaríki skulu syrgja fyri at beina burtur allan mismun móti kvinnum.




*Gentur í Gharnata skúlanum í Basra, Irak*

Nøkur lond taka fyrivarni í sambandi við ávísar greinir við teirri grundgeving, at national lóggáva, siðvenja, átrúnaður ella mentan ikki eru samsvarandi við ætlanir og endamál í sáttmálanum, og tey rættvísgera sostatt fyrivarni á hendan hátt.

Nógv lond í muslimska partinum av heiminum taka fyrivarni í tann mun, at Kvinnurættindasáttmálin er í stríð við Sharia, sum er islamisk lóg. Eitt dømi er Saudi Arabia, sum staðfesti sáttmálan í ár 2000. Saudi Arabia tekur fyrivarni, um so er, at nøkur mótsøgn er millum sáttmálan og reglur í islamiskari lóggávu. Serligt fyrivarni verður tikið í sambandi við stk. 2 í grein 9, sum er soljóðandi:

Limaríkini skulu geva kvinnum javnbjóðis rættindi við menn viðvíkjandi tjóðskapi hjá børnum teirra. Eisini tekur Saudi Arabia serligt fyrivarni í sambandi við stk. 1 í grein 29. Henda greinin snýr seg um, hvussu eitt møguligt stríð millum 2 limaríki um ásetingar í sáttmálanum skal loysast. Um eitt land krevur tað, skal málið verða avgjørt av gerðarrætti. Tilsamans 38 lond taka fyrivarni í sambandi við grein 29 í sáttmálanum. Talan er um lond úr øllum heiminum, eisini Vesturheiminum. Á leinkju aftast í tekstinum ber til at síggja, hvørji fyrivarni verða tikin av teimum einstøku londunum.

Eisini taka flestu muslimsku limaríkini fyrivarni móti grein 16, sum ásetir javnbjóðis rættindi fyri kvinnur og menn í sambandi við hjúnaband og familjuviðurskifti og rættindi í mun til børnini. Hetta útbreidda fyrivarni mótvegis grein 16 hevur samband við muslimskar lógir, sum ikki góðtaka eins rættindi millum kvinnur og menn í familjuviðurskiftum.

Orsøkin til, at so nógv lond, har Sharia-lóggáva er í gildi, ynskja at taka undir við sáttmálanum er partvís, at nógv lond í vesturheiminum seta tað sum treyt við menningarhjálpina, at móttakaralandið hevur tikið undir við sáttmálanum, og at menningarhjálpin eisini verður brúkt til at fremja betri rættindi fyri kvinnur (Ketscher 2006).

Tilsamans 77 lond taka ymisk fyrivarni. Teirra millum er einki Norðurland, men fleiri lond í Europa, so sum Stóra Bretland, Frakland og Týskland. Til dømis er eitt fyrivarni hjá Fraklandi, at grein 9 í sáttmálanum, sum snýr seg um rættindi í mun til tjóðskap, ikki skal ganga fram um ásetingar í franskari lóggávu um tjóðskap.

Bæði CEDAW-nevndin og ein røð av limaríkjum, eitt nú Danmark og Svøríki, eru av teirri áskoðan, at nógv fyrivarni ganga ímóti ætlan og endamáli við teimum greinum, sum fyrivarni verður tikið fyri (Schopp-Schilling 2007).

## Valfría Protokollin

Sameindu Tjóðir samtyktu í 1999 eina sonevnda valfría protokol sum ein liður í at styrkja ST-kvinnurættindasáttmálan í limaríkjunum. Henda protokol gevur einstaklingum ella bólkum av einstaklingum rætt til at kæra til CEDAW-nevndina, um eitt limaland fremur brot á sáttmálan. Hesin møguleiki at kæra er so nýggjur, at enn er ikki talan um nakra siðvenju á økinum, tí at treytin fyri at leggja mál fyri CEDAW-nevndina er, at málið hevur verið fyri landsins egnu dómstólar, eisini at málið er kært so nógv, sum til ber (landsins egnu rættarinstansir eru úttømdir).

Tað er ikki obligatoriskt at góðkenna hesa valfríu protokollina. Danmark ratifiseraði protokollina í 2000.

Av teimum 185 londunum, sum hava staðfest kvinnurættindasáttmálan, hava 88 lond higartil tikið undir við teirri protokollini. Tað ber ikki til at taka fyrivarni fyri ásetingum í protokollini.

## CEDAW-nevndin

Fyri at hava eftirlit við, hvussu limaríkini halda sáttmálan, er ein eftirlitsnevnd sett sambært grein 17 í sáttmálanum, tann sonevnda CEDAW-nevndin. Henda nevndin hevur tilsamans 23 limir úr øllum heiminum. Ásett er, at limirnir skulu hava høgan moral og førleika. Limirnir eru tilnevndir av limaríkjunum og sita í 4 ár í senn. Limirnir hava ymiskan fakligan førleika, og nevndin eigur tískil at vera skikkað til at vísa á nógv ymisk sløg av mismuni, ið verður framdur móti kvinnum.

Í sáttmálanum eru mannagongdir ásettar, sum CEDAW-nevndin skal brúka til at hava eftirlit við, at sáttmálin verður hildin.

## Frágreiðing

Ein mannagongd er, at hvørt limaríki regluliga skal lata CEDAW-nevndini skrivligar frágreiðingar um, hvørji løgfrøðilig, rættarlig, fyrisitingarlig og onnur stig, limaríkið hevur tikið fyri at halda sáttmálan. Frágreiðingarnar verða vanliga latnar nevndini 4. hvørt ár, ella so ofta, sum nevndin áleggur hvørjum einstøkum landi at lata inn frágreiðing. Nevndin eftirmetir frágreiðingina og sendir ávísa limalandinum skrivligar spurningar, um hon metir hetta vera neyðugt. Síðani verður ein fundur millum nevndina og umboð fyri ávísa limaríkið, har frágreiðingin og svarini til møguligar spurningar frá nevndini verða umrødd. Harnæst tekur CEDAW-nevndin samanum og ger niðurstøðu og viðmerkingar, har víst verður á bæði jalig og neilig viðurskifti í sambandi við, hvussu ávísa limaríkið fremur sáttmálan innlendis, umframt at viðmæli verða gjørd um, hvat meira eigur at verða gjørt. Um limaríkið ikki ger nakað við hesi viðmæli, kann CEDAW-nevndin bert áleggja limaríkinum at taka atlit til hesi viðmæli. Heimild er ikki til at seta í verk atgerðir móti limaríkinum.

Avvarðandi myndugleikarnir í limaríkjunum hava í ein ávísan mun lyndi til at gera støðuna viðvíkjandi javnstøðu millum kyn betri, enn hon í veruleikanum er. Av teirri orsøk spæla kvinnufelagsskapir, sonevndir ikki-stjórnarfelagsskapir *(Non Governmental Organizations ella NGO's)* ein týdningarmiklan leiklut í at koma við eini sonevndari skuggafrágreiðing, sum gevur eina fjølbroyttari mynd av støðuni.

## Eftirmeting

4. hvørt ár verða sendinevndir úr limaríkjunum innkallaðar til ST-høvuðsborgina í New York til eftirmetingar. Til eftirmetingarnar skulu limaríkini svara spurningum frá CEDAW-nevndini um, hvussu sáttmálin verður framdur í limaríkjunum. Eftirmetingarnar taka eisini støði í frágreiðingunum.

## Beinleiðis og óbeinleiðis mismunur

Kvinnuræ ttindasáttmálin fevnir um beinleiðis eins væl og óbeinleiðis mismun vegna kyn. Beinleiðis mismunur hevur við sær, at tilvísing til kyn er ein formligur partur av rættargrundarlagnum. Eitt dømi um hetta er mismunur mótvegis kvinnum, ið eru við barn, har ein arbeiðsgevari vísir beinleiðis til tað, at ein kvinna er við barn, sum orsøk fyri ikki at seta hana í starv.

Óbeinleiðis mismunur er, at ein áseting, sum í sínum formi er kynsneutral, í veruleikanum hevur eina avleiðing, sum ger annað kynið verri fyri. Eitt dømi er, at frávera frá arbeiði orsakað av skyldum mótvegis familjuni hevur ta avleiðing, at viðkomandi persónur ikki verður sett/ur í betri starv, ikki fær lønarhækkan osfr. Hóast rætturin til fráveru er galdandi fyri bæði mammur og pápar, eru tað einamest kvinnurnar, sum nýta henda rætt. Av hesi orsøk kunnu tær verða fyri óbeinleiðis mismuni.

Einans ósakligur mismunur er bannaður. Sakliga grundaður mismunur kann verða framdur. Tildømis er tað ikki ólógligt, at kvinnur fáa serlig rættindi, tá ið tær eru við barn og í sambandi við barnsburð. Hesin mismunur kann grundast sakliga orsakað av teirri likamligu strongd, sum tað at vera við barn, at eiga barnið og at geva barninum bróst hevur við sær fyri kvinnur. Í grein 4, stk. 2 verður móðurskapur nevndur sum dømi um at seta í verk serlig tiltøk, ið ikki skulu fatast sum diskriminerandi.

Undantikið í sambandi við, at kvinnur eru við barn, og at tær eiga, er beinleiðis mismunur vegna kyn sjáldsamur nú á døgum, av tí at lógarverkið í londum um okkara leiðir í høvuðsheitum er formliga kynsneutralt. Tað, sum í roynd og veru hevur týdning, verður sostatt tann óbeinleiðis mismunurin, sum verður gjørdur.

Sáttmálin gevur í ávísan mun limaríkjunum møguleika at samtykkja “fyribils serligar fyriskipanir við tí endamáli at fremja veruliga javnstøðu millum menn og kvinnur”, sí grein 4. Í hesum sambandi er talan um positiva serviðgerð av kvinnum.

## Harðskapur móti kvinnum

Í Kvinnurættindasáttmálanum er orðið harðskapur ikki beinleiðis nevnt. Men grein 21 í sáttmálanum gevur CEDAW-nevndini heimild til at gera tilmæli um viðkomandi evni og spurningar, sum stinga seg upp í sambandi við frágreiðingar og aðrar upplýsingar frá limaríkjunum í sambandi við fremjan innlendis (implementering) av sáttmálanum.

Nevndin ásannaði, at harðskapur móti kvinnum, nevndur kyns-grundaður harðskapur, var ein álvarsligur trupulleiki kring allan heim, og at neyðugt var við formligum ásetingum, um sáttmálin skuldi vera nóg fevnandi. Í 1992 gjørdi CEDAW-nevndin eitt tilmæli, sum snúði seg um harðskap móti kvinnum. Í hesum sambandi skrivar nevndin, at *kyns-grundaður harðskapur er eitt slag av mismuni, sum álvarsliga forðar kvinnum í at hava rættindi og frælsi á jøvnum føti við menn.*




*Kvinnur í Nepal, sum stuðla menniskjarættindum*

Neyvan er nakað land í heiminum, sum megnar at avtaka harðskap móti kvinnum; heldur ikki Føroyar. Í 2007 vóru tilsamans 300 áheitanir til Kvinnuhúsið, og 17 kvinnur og 14 børn gistu á Kreppumiðstøðini. Eins og undanfarin ár var harðskapur orsøkin til flestu áheitanirnar. Í flestu førum er harðskapurin framdur av núverandi ella fyrrverandi manni, sambúgva ella vaksnum synum. Kvinnan kennir ofta mannin, sum fremur harðskapin. Harðligir menn koma frá øllum

samfelagsstættum og finnast í øllum aldursbólkum, og teir telja bæði væl lærdar menn í høgum størvum eins og menn við ongari útbúgving og uttan arbeiði. Hetta mugu kvinnur í Føroyum tíverri eisini sanna, sum upplýsingar frá Kvinnuhúsinum siga okkum.

## Vanahugsan og eintáttaðar fatanir av kynsleiklutum

Í roynd og veru er vantandi javnstøða fyri kvinnur mangan tengd at vanahugsan og fordómum, ið hava samband við siðvenju og fatanina av, hvørja støðu menn og kvinnur hava og eiga at hava í samfelagnum. Ein týdningarmikil liður í arbeiðinum at fremja javnstøðu millum kyn er at vera tilvitað um hesa vanahugsan og at royna at bróta niður slíkar siðbundnar fatanir av kynsleiklutum.

Í grein 5 í sáttmálanum verður hesin spurningurin umrøddur. Grein 5 fevnir um eina áseting, ið bindur limaríkini til at taka hóskandi stig til at: "*broyta sosiala og mentanarliga atburðarmynstrið hjá monnum og kvinnum við tí endamáli at avtaka fordómar, vanar og allan annan atburð, sum hvílir á teirri fatan, at tað eina kynið er meira ella minni vert enn hitt kynið, ella á fastlæstar kynsleiklutir.*"

Ført hevur verið fram, at júst henda ásetingin er í ferð við at menna seg til eina av teimum týdningarmestu ásetingunum í sáttmálanum. Henda ásetingin hevur eitt dynamiskt perspektiv, sum røkkur longri enn tey meira passivu forboðini móti mismuni, hóast hesi sjálvsagt eisini eru av stórum týdningi (Ketscher 2006).

## Kvinnurættindasáttmálin og virksemi í Føroyum

Í juni 2002 luttók føroyskt umboð fyri fyrstu ferð í donsku sendinevndini, sum fór til eftirmetingar av kvinnurættindasáttmálanum í ST-høvuðsborgini í New York. Grønlendskt umboð var eisini við í sendinevndini. Bæði føroyska og grønlendska umboðið høvdu orðið fyri stutt at leggja fram um, hvat almennu myndugleikarnir gjørdu fyri at halda sáttmálan. Tá var tað Almanna- og heilsumálaráðið, sum

hevði javnstøðumál um hendi. Føroyska umboðið var við sum partur av donsku sendinevndini. Eisini í 2006 var eitt føroyskt umboð við til eftirmetingar, sum partur av donsku sendinevndini. Tá var tað Vinnumálaráðið, sum hevði javnstøðumál um hendi.

Í 2004 lótu Føroyar Sameindu Tjóðum sína fyrstu frágreiðing viðvíkjandi sáttmálanum sum viðheft skjal í donsku frágreiðingini nummar 5 og 6. Í frágreiðingin, sum er 14 síður long, er ein gjøgnumgongd av, hvussu greinirnar 1 til 16 í sáttmálanum verða hildnar í Føroyum. Greitt verður frá lógarverki í mun til javnstøðu, frá tali av kvinnum í leiðarastørvum, í politikki, frá arbeiðinum hjá Javnstøðunevndini, og frá ymsum heilsutilboðum, ið eru viðkomandi fyri javnstøðu fyri at nevna dømi um innihald.

Javnstøðunevndin og Kvinnufelagasamskipan Føroya fingu tilboð um at gera viðmerkingar til frágreiðingina. Í sínum viðmerkingum ger Kvinnufelagasamskipan Føroya vart við, at veruleikin ikki er so idylliskur, sum frágreiðingin vil vera við. Harumframt nevnir Kvinnufelagasamskipanin undirvísingartilfar, kvinnur í politikki og korini hjá útlendskum kvinnum, sum flyta til Føroya, sum mál, ið áttu at verðið betrað.

Í 2006 luttók umboð fyri Føroya landsstýri fyri aðru ferð í einari eftirmeting av sáttmálanum. Eisini sendi CEDAW-nevndin í 2006 út viðmerkingar um, hvussu sáttmálin verður hildin í Danmark og í Føroyum, *(concluding comments of the Committee of the Elimination on Discrimination against Women, 2006)*.

Í hesum viðmerkingum verður funnist at ymiskum viðurskiftum í Føroyum. Nevndin harmast um, at tað finnast so fáar upplýsingar um, hvussu Kvinnurættindasáttmálin verður hildin í Føroyum, og heitt verður á limaríkið um at syrgja fyri, at neyvar upplýsingar verða at fáa um, hvussu sáttmálin verður hildin á øllum økjum í føroyska samfelagnum. Eisini vísir CEDAW-nevndin á ta avmarkaðu luttøkuna hjá kvinnum í politikki í Føroyum. Harumframt heitir nevndin á Danmark, umframt á Føroyar og Grønland, um at syrgja fyri at breiða út vitanina um endaligu viðmerkingarnar fyri at kunna politikarar, starvsfólk í

umsitingini, kvinnufelagsskapir umframt vanlig fólk um tey stig, sum eru tikin fyri at tryggja formlig og verulig javnrættindi fyri kvinnur.

Í 2008 lata Føroyar so sína aðru frágreiðing viðvíkjandi sáttmálanum sum viðheft skjal í donsku frágreiðingini nummar 7. Javnstøðunevndin hevur fingið høvi at gera viðmerkingar til almennu, føroysku frágreiðingina, eina sonevnda *skuggafrágreiðing*. Javnstøðunevndin heldur, at frágreiðingin sum heild er merkt av, at hagtøl og upplýsingar annars um javnstøðu millum kyn og um mál, sum viðvíkja kvinnum, ikki finnast ella eru sera avmarkað. Millum aðrar viðmerkingar í skuggafrágreiðingini hjá Javnstøðunevndini eru, at almennu myndugleikarnir eiga at taka stig til at fáa javnari kynsbýti í almennum ráðum og nevndum og í størvum innan leiðslu. Tiltøk eiga at verða sett í verk fyri at minka um munin á inntøku millum kvinnur og menn, og føroysku myndugleikarnir eiga at gera meira fyri at ávirka og broyta vanahugsan og siðbundnar fatanir í mun til kynsleiklutir.

Í 2010 kunnu Føroyar aftur vænta sær viðmerkingar frá CEDAW-nevndini. Áhugavert verður at vita, um nevndin heldur, at føroysku myndugleikarnir hava gjørt nakað munagott fyri at syrgja fyri, at Kvinnurættindasáttmálin verður framdur í verki í Føroyum.

## Kvinnurættindasáttmálin og føroysk viðurskifti

Í Føroyum hevur løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn verið í gildi síðani 1994. Henda lógin hevur til endamáls at beina burtur allan mismun vegna kyn, soleiðis at kvinnur og menn fáa eins møguleikar á øllum økjum samfelagsins. Javnstøðulógin skal beina burtur allan mismun vegna kyn, bæði yvirskipað og á arbeiðsmarknaðinum, í sambandi við barnsburð og í undirvísingarverkinum. Eisini gevur lógin fólki møguleika at kæra, um tey hava verið fyri mismuni vegna kyn. Sambært javnstøðulógini skal javnstøðunevndin hava eftirlit við, at lógin verður hildin. Eisini kunnu fólk, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, kæra til javnstøðunevndina.

Í viðmerkingunum til lógina verður víst til sáttmálan, og at tað er í samsvari við henda sáttmála, at lógaruppskotið um javnstøðu millum kynini verður lagt fram. Sum heild ber til at siga, at javnstøðulógin yvirskipað fevnir um fleiri av teimum økjum, sum sáttmálin hevur ásetingar um. Men sáttmálin áleggur eisini limaríkjunum at arbeiða meginregluna um javnstøðu millum kyn inn í grundlógina ella aðra hóskandi lóggávu (grein 2). Við javnstøðulógini sum undantak er hetta neyvan gjørt í Føroyum, tó at hetta uppáhald er bygt á gitingar høvundans heldur enn kanningar.

## Og frameftir?

Í Føroyum er økið javnstøða millum kyn eitt nýtt virkisøki, um vit samanbera við okkara grannalond. Í Norðurlondum komu lógir, ið høvdu ásetingar um eins løn til menn og kvinnur fyri sama arbeiði, og um javnstøðu millum kyn annars, í gildi miðskeiðis í sjeytiárunum. Samanborið við onnur Norðurlond hava vit í Føroyum ikki siðvenju fyri at gera nakað nevnivert burturúr at fremja javnstøðu millum kyn. Seinastu árini hava tó ávísar broytingar verið at hómað, og í dag verða spurningar, sum viðvíkja javnstøðu, javnan umrøddir í almenna rúminum.

Vit fingu javnstøðulógina í 1994, og 14 ár eftir var orðið javnstøða fyrstu ferð at síggja í einum samgonguskjali. Hetta var samgonguskjalið hjá sonevndu CHE-samgonguni við Javnaðarflokkinum, Miðflokkinum og Tjóðveldi eftir løgtingsvalið í januar 2008. Her varð ført fram, at samgongan skuldi arbeiða fyri at fremja javnstøðu. Eisini í samgonguskjalinum hjá ABC-samgonguni við Fólkaflokkinum, Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum frá september 2008 stendur at lesa, at virkað verður fyri javnstøðu á arbeiðsmarknaðinum, í politikki og í samfelagnum annars. Í 21. øld og nærum 22 ár eftir, at Føroya løgting samtykti Kvinnurættindasáttmálan, tykist føroyska samfelagið at hava fingið eyguni upp fyri, at javnstøða millum kyn hevur samfelagsligan týdning.

Higartil hevur sáttmálin ikki verið brúktur í rættarsiðvenju í Føroyum. Hví so er, er ilt at siga. Kanska er tað tí, at kunnleikin til, at sáttmálin hevur verið rættarliga

bindandi fyri Føroyar í nærum 22 ár, er sera avmarkaður. Og løgfrøðiligur vani og praksis er møguliga ein onnur orsøk til, at so er. Tí sum allur annar vani elvir hesin vani eisini til at varðveita siðbundnar fatanir av atburði.

Tað veruliga samfelagsliga gagnið av, at Føroya løgting í 1987 samtykti CEDAW, er treytað av, at kunnleikin til sáttmálan verður betri, og at sáttmálin verður brúktur av kvinnufelagsskapum, politikarum, sakførarum, nevndum, dómstólum og myndugleikunum yvirhøvur, serliga innan almenna fyrisiting. Allir hesir aktørar koma regluliga, onkrir kanska hvønn dag, í samband við øki, sum eru fevnd av sáttmálanum, og sum tískil hava týdning fyri spurningin um javnstøðu millum kyn í føroyska samfelagnum.

# Sáttmáli Sameindu Tjóða móti píning

*Annika Sølvará*
*Cand.Mag. í enskum og søgu*

Píning (á enskum *torture*) er eitt aldagamalt amboð, sum valdshavar hava nýtt, og enn nýta, til tess at fáa fólk at gera eftir boðum ella at fáa upplýsingar um onnur.

Í Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða frá 1948 varð ásett, at “eingin skal verða píndur ella harðliga, ómenniskjaliga ella vanæruliga viðfarin ella revsaður”. Bæði áðrenn heimsyvirlýsingin varð samtykt og aftaná, hevur píning verið nýtt í nógvum av heimsins londum, eingin heimspartur undantikin.

Flestu av heimsins londum hava nú bundið seg til ikki at nýta píning, men hinvegin arbeiða miðvíst fyri at fyribyrgja píning. Hetta hava tey bundið seg til í ST-sáttmálanum móti píning, sum varð samtyktur á ST-aðalfundinum í New York tann 10. desember 1984 og fekk gildi tann 26. juni 1987, eftir at tjúgu lond høvdu staðfest hann. Higartil hava 146 lond staðfest sáttmálan og sostatt bundið seg til at halda hann.

Sáttmálin er úrslit av eini breiðari semju um, at tað var neyðugt við bindandi avtalum landanna millum til tess at arbeiða miðvíst fyri at steðga og fyribyrgja píning.

Hóast sáttmálan eru tað enn alt ov nógvir tilburðir av píning kring heimin. Lond, felagsskapir og einstaklingar arbeiða áhaldandi við at steðga og fyribyrgja píning og hjálpa teimum, sum hava verið fyri hesi vanæruligu viðferð. Millum hesar felagsskapir er Amnesty International.

**Alment um píning**

Gjøgnum øldir varð píning hildin at vera eitt bæði neyðugt og fult lógligt amboð til at útvega upplýsingar og at fáa fólk at viðganga seg sek. Eitt nú undir sponsku inkvisitiónini vóru nágreiniligar reglur fyri, hvussu píning skuldi verða nýtt móti fólkum, ið vóru undir illgruna at vera trúarvillingar. Hóast tað er alment prógvað, at píning er eitt sera vánaligt amboð at fáa til vega álítandi upplýsingar, verður píning framvegis brúkt av løgreglu og hervaldi í nógvum londum.

Nú sum fyrr rakar píning ofta tilvildarlig og ósek fólk. Tey verða handtikin á gøtuni, á arbeiðsplássinum ella heima. Onkuntíð er handtøkan uttan nakra ávísa orsøk, aðrar tíðir tí tey hava aðra trúgv, sannføring ella etniskan uppruna enn valdsharrarnir. Orsøkirnar eru ofta manglandi útbúgving og vánalig løn til herin, løgregluna og aðrar myndugleikar og manglandi fyribyrgjandi arbeiði frá stjórnum og myndugleikum. Píning verður harafturat ofta nýtt í vápnaðum bardøgum.




© Amnesty International

*Myndin er frá tiltaki, sum Amnesty International í Luksemburg skipaði fyri á altjóða degnum móti píning*

Píning verður ofta brúkt sum politiskt amboð at hjálpa valdsharrunum at varðveita valdið í landinum. Við at kúga tey sterkastu mótstøðufólkini eydnast tað valdsharrum at halda mótstøðuni niðri. Píning rakar ofta tilvildarliga, og tað er við til at økja óttan millum fólk, sum ikki kunnu kenna seg trygg.

Píning verður oftast framd av herfólki og løgreglufólki. Tað nýtist ikki at vera íborin óndskapur, sum ger fólk til bøðlar. Tey eru ofta vanlig fólk, sum verða kallað inn, upplærd og lønt fyri at pína síni medmenniskju. Fyri mong er hetta eitt arbeiði, sum gevur teimum ráð til at breyðføða familjuna.

Síðan yvirgangsatsóknina móti USA tann 11. september 2001 hevur píning og annar ágangur móti mistonktum fangum vundið uppá seg. Tað er serliga amerikanska stjórnin, ið á ymiskan hátt hevur staðið á odda fyri hesum virksemi, sum m.a. hevur gingið fyri seg í Abu Ghraib fongslinum í Irak og Guantanamo fangaleguni í Cuba.

## Píningarhættir og avleiðingar

Yvirskipað kann píning býtast í tveir hættir: Kropslig og sálarlig píning. Ofta gevur píning ikki varandi kropsligt mein, og tað kann tí eftirfylgjandi vera trupult at prógva, at talan hevur verið um píning. Møgulig merkir á kroppinum eru oftast lekt, tá offrið sleppur úr fangaskapi, og sálarligi skaðin er torførari at prógva.

Vanligastu píningarhættirnir eru:

***Kropsliga:***

- Slag undir iljarnar (falanga)
- Neyðtøka og onnur kynslig misnýtsla
- Ravmagnsstreymur settur til kynsgøgnini og aðrar viðkvæmar kropslutir
- Vatn – t.d. verður høvdið hildið undir vatni, til offrið næstan kvalist, (submarion) ella vatn, sum áhaldandi rakar eitt ávíst stað á kroppinum á offrinum.
- Brenning
- Uppheinging – t.d. verða hendurnar bundnar saman aftan bak, og so verður offrið hongt upp við togi um skøvningarnar
- Likamsløstan av ymsum slagi

***Sálarliga:***

- Avbyrging, ofta í smáum klivum í langa tíð
- Offrið verður noytt at síggja ella hoyra, meðan onnur verða pínd, ofta skyldfólk ella vinir
- Hóttanir – bæði móti offrinum og familju og vinum hjá offrinum
- Falskar avrættingar – bøðlarnir lata sum teir fara at avrætta offrið
- Kynslig eyðmýking
- Manglandi matur og svøvnur
- Óljóð, ljós, myrkur og onnur sansaávirkan

### *Avleiðingar av píning*

Tað kunnu vera nógvar og álvarsligar avleiðingar av píning fyri lívið hjá offrinum. Nógv offur líða av sálarligum skaða orsakaður av píningini (*Post Traumatic Stress Disorder*, PTSD). Nøkur eyðkenni eru:

- Angist
- Minnistrupulleikar
- Svøvntrupulleikar
- Marrur
- Erkvisni
- Øðisherðindi
- Tunglyndi
- Harafturat koma kropsligir skaðar, sum kronisk pína, vantandi likamslutir, niðursett hoyrn, sjón og avlamni

Fólk, ið hava verið pínd, hava ofta skuldarkenslur og skomm, sum kemst av eyðmýkingini, ið tey hava verið fyri. Nógv føla, at tey hava svikið seg sjálvi ella familju og vinir. Tílík eyðkenni eru vanlig sum reaktión uppá ógvusliga og ómenniskjaliga viðferð.

### Altjóða yvirlýsingar og sáttmálar um píning

Millum tær nógvu yvirgangsatgerðirnar, ið Nazi-stjórnin í Týskland framdi móti mótstøðufólki og minnilutum, og sum m.a. vórðu avdúkaðar undir Nürnbergsakarmálinum, var skipað og miðvís píning. Hetta var eisini eitt av teimum mannarættindabrotum, ið varð tikið til viðgerðar, tá ST fór undir sítt virksemi at byrgja fyri, at tílíkt skuldi henda aftur. At altjóða samfelagið hevur

viðurkent, at píning eigur at verða steðgað, sæst av teimum nógvu altjóða samtyktum, ið fordøma píning:

- Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi (1948)
- Europeiski mannarættindasáttmálin (1950/1953)
- Amerikanski mannarættindasáttmálin (1969/1978)
- ST-sáttmálin um borgaralig og politisk rættindi (1966/1976)
- ST-yvirlýsingin um verju móti píning (1975)
- Sáttmálin móti píning og aðrari grimari, ómenniskjaligari ella niðrandi viðferð ella revsing (1984/1987)
- Inter-amerikanski sáttmálin um forðing fyri og revsing av píning (1985/1987), og
- Europeiski sáttmálin um forðing fyri píning og ómenniskjaligari ella niðrandi viðferð ella revsing (1987/1989).

(Árstølini í klombrum vísa, nær viðkomandi sáttmáli varð samtyktur og kom í gildi)

## Sáttmálin móti píning

Sáttmálin móti píning varð samtyktur á ST-aðalfundi í New York 10. desember 1984 og kom í gildi 26. juni 1987, tá 20 lond høvdu staðfest sáttmálan.

Danmark undirritaði sáttmálan 4. februar 1985 og staðfesti hann 27. mai 1987. Eingi fyrivarni vórðu tikin, og tí fekk sáttmálin eisini gildi fyri Føroyar.

Higartil hava 146 lond staðfest sáttmálan.



©UN Photo/Gitika Noyes

*Uttanríkismalaráðharrin í El Salvador staðfestur piningarsáttmálan í 2004.*

## *Innihaldið í sáttmálanum*

Sáttmálin byrjar, eins og aðrir líknandi sáttmálar, við einum formæli, har m.a. verður víst til ST-stovningarsáttmálan, Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi og ST-Yvirlýsingina frá 1975 um píning.

Í grein 1 verður píning skilmarkað á einum løgfrøðiligum máli, ið kann tykjast í so knortlut fyri vanligar lesarar. Týdningurin av einari tilíkari skilmarking eigur tó ikki at verða undirmettur. Í tí einstaka førinum, tá støða skal takast til, um talan hevur verið um píning ella ikki, er neyðugt, at lógarbrotið er skilmarkað á neyvan hátt. Her má havast í huga, at sáttmálin áleggur limaríkinumunum at áseta revsing í teirra innlendis lóggávu fyri píning. Ein grundregla fyri allari revsilóggávu er, at revsiverd lógarbrot skulu vera skilmarkað á greiðan hátt.

Fyri at talan er um píning eftir hesum sáttmálanum, skulu hesar treytirnar vera loknar:

1. Talan skal vera um tilætlaða ("forsætlig") gerð ella gerðir

2. Tað skulu vera umboð fyri almennar myndugleikar, ið fremja brotini, eggja til ella samtykkja í, at onnur fremja tey

3. Talan skal vera um ógvusliga ("severe") pínu ella líðing, likamliga ella sálarliga

4. Endamálið skal vera at fáa viðkomandi at viðganga seg sekan í onkrum lógarbroti, at fáa upplýsingar til vega ella at revsa ella gera mismun móti viðkomandi

5. Pína ella líðing, sum er natúrlig fylgja av t.d. revsidómi, eru ikki fevnd av sáttmálanum. Tó kunnu óvanligir og grimir revsihættir ella avbyrging í longri tíð eftir umstøðunum verða mett sum píning

Allar fimm treytirnar skulu vera loknar, fyri at talan skal vera um píning sambært sáttmálanum.

Tað kann í tí einstaka førinum vera trupult at gera av, um píning er framd í verki, tí tað verður avgjørt við einari meting, har øll tey veruligu viðurskiftini, ið prógv eru førd fyri, verða samanhildin við orðaljóðinum í grein 2 í sáttmálanum, har ólógliga gerðin er skilmarkað. Í Føroyum og Danmark eru tað fyrst og fremst dómstólarnir, sum taka støðu til ákærur um píning. Seinni kann eitt mál kærast til ST nevndina móti píning. Hetta er tó treytað av, at viðkomandi sáttmálaríki staðiliga hevur viðurkent rættin hjá landsins borgarum at kæra til nevndina. Ein onnur treyt er, at borgarin frammanundan hevur roynt allar innlendis kærumøguleikar, sum í flestu førum merkir at royna málið við landsins dómstólar.

Í grein 2 verður staðfest, at øll lond, sum hava bundið seg til sáttmálan, hava skyldu til at seta neyðug tiltøk í verk til tess at forða fyri, at píning verður framd í teirra løgdømum.  Ongar serligar umstøður av nøkrum slag, hvørki krígsstøða ella hóttan um kríggj, politisk órógv ella onnur almenn neyðstøða kunnu brúkast sum umbering fyri ella kunnu rættvísgera píning. Heldur ikki boð frá einum yvirornaðum ella frá einum almennum myndugleika kunnu brúkast at rættvísgera píning. Hesin mannarættur er óreingiligir, mótsett rættinum til talufrælsi og savningarfrælsi, har tað í neyðstøðum kunnu gerast undantøk.

Í grein 3 verður staðfest, at tað er ólógligt hjá londum, sum hava bundið seg til sáttmálan, at útvísa, senda aftur ella útflýggja ein persón, har tað er orsøk til at vænta, at viðkomandi er í vanda fyri at verða píndur. Myndugleikarnir hava skyldu til at kanna gjølla og taka øll neyðug fyrilit í meting av vandanum fyri píning í einum landi, hagar talan kann vera um at senda ein persón.

Í grein 4 er ásett, at øll lond, sum hava bundið seg til sáttmálan, skulu tryggja, at píning er lýst sum brotsverk í landsins lóggávu. Hóskandi revsing skal vera ásett, sum stendur mát við álvaran í brotsverkinum.

Í greinunum 10-13 er skylda áløgd øllum londum, sum hava bundið seg til sáttmálan, at taka útbúgving og kunning um forboðið móti píning við í venjing av øllum starvsfólkum, sum á nakran hátt koma í samband við fólk í varðhaldi ella fangilsi av einhvørjum slag. Londini skulu hava skipað eftirlit við reglum og mannagongd fyri avhoyring og viðferð av fólki í varðhaldi til tess at fyribyrgja píning. Londini hava skyldu til at seta kanning í verk alt fyri eitt, um illgruni er

um, at píning er framd. Londini hava harafturat skyldu at tryggja, at persónur, sum sigur seg hava verið fyri píning, kann kæra og fáa sín kæru viðgjørda hjá skikkaðum myndugleikum. Stig skulu verða tikin til at tryggja, at persónurin ikki verður illa viðfarin ella hóttur orsakað av síni kæru.

Í grein 14 verður staðfest, at londini, sum hava bundið seg til sáttmálan, við lóg skulu tryggja offrum fyri píning endurreisn, rímiligt endurgjald og so fræga uppafturvenjing, sum til ber.

Í grein 17 eru ásetingar um eina óhefta ST-nevnd, sum hevur eftirlit við, at londini, sum hava bundið seg til sáttmálan, liva upp til sínar skyldur. Nevndin og arbeiðið hjá henni verður lýst seinni í greinini.

ST-sáttmálin er sostatt púra greiður:

- Píning er altíð ólóglig
- Myndugleikarnir í sáttmálalondunum hava skyldu at steðga og fyribyrgja píning
- Er illgruni um píning, skulu stig takast at alt fyri eitt at kanna og møguliga steðga hesum
- Tey, sum fremja píning, skulu revsast
- Tey, sum hava verið fyri píning, hava rætt til endurreisn, endurgjald og uppafturvenjing
- Játtanir komnar fram undir píning skulu og kunnu ikki nýtast sum prógv í nøkrum máli
- Altjóða eftirlit er við, hvørt londini liva upp til sínar skyldur.

Tað má tíverri ásannast, at píning framvegis verður framd, eisini í teimum londum, ið hava bundið seg til at halda sáttmálan. Hinvegin kann sigast, at vit við sáttmálanum hava eitt einastandandi amboð til at seta kanningar og tiltøk í verk, um illgruni er um píning. Sáttmálin saman við teimum amboðum, sum eru

sett í verk við honum, er fremsta amboðið at basa og fyribyrgja píning. Størsta uppgávan liggur nú í at brúka sáttmálan og ásetingarnar í honum.

Í londum sum Føroyum er fremsta uppgávan at tryggja, at ásetingar, ið seta forboð fyri píning og áseta revsing fyri møgulig brot, eru í lóggávuni, at kunna um píning, hvat píning er, og hvussu vit kunnu fyribyrgja píning.

**Valfría protokollin til sáttmálan**

Henda valfría protokollin varð samtykt á ST-aðalfundi í New York tann 18. desember 2002.

Danmark staðfesti protokollina 25. juni 2004 og tók tá fyrivarni um, at skjalið fyribils ikki skuldi galda fyri Føroyar. Hetta fyrivarnið varð afturtikið tann 29. august 2005, og er protokollin sostatt eisini í gildi í Føroyum.

Valfría protokollin kom í gildi 22. juni 2006, tá 20 lond høvdu staðfest hana. Í februar 2009 høvdu 62 lond undirritað protokollina, meðan 43 høvdu staðfest hana.

Samtykt varð í hesum skjalinum at seta eina nevnd undir nevndini móti píning (*the Subcommittee on Prevention of Torture and Other Cruel, Inhuman or Degrading Treatment or Punishment*) við 10 limum, ið verða valdir av limaríkjunum, men sum virka óheftir og skulu hava royndir á økinum. Nevndin hevur til uppgávu at vitja fongsul og onnur støð, har fólk sita føst. Nevndin skal eisini koma við tilmælum og ráðum til limaríkini um ábøtur og harafturat samstarva við myndugleikarnar í limaríkjunum og ST um øll viðurskifti av týdningi fyri endamálini við sáttmálanum móti píning.

Limaríkini binda seg til at geva nevndini atgongd til fongsul v.m. og at lata nevndini allar upplýsingar, hon biður um, eins og rætt at tosa í einingi við fangar og onnur avbyrgd. Somuleiðis binda londini seg til at stovna og uppihalda óheftar stovnar og tiltøk at mótvirka píning.

***Arbeiðið hjá nevndini móti píning***

Í sáttmálanum er ásett, at ein óheft nevnd skal hava eftirlit við, at londini, sum hava staðfest sáttmálan, liva upp til sínar skyldur. Nevndin, sum eitur *Committee Against Torture*, stytt CAT, er sett saman av 10 limum, sum verða valdir millum londini eftir serligum reglum. Nevndarlimirnir, sum verða valdir fyri 4 ár í senn við møguleika fyri afturvali, skulu hava høgan moral og hollar førleikar innan mannarættindi. Limirnir eru valdir eftir persónligum eginleikum, teir umboða ikki land sítt ella nøkur seráhugamál.

Uppgávurnar hjá nevndini eru at taka ímóti frágreiðing frá luttakandi londunum. Øll londini hava skyldu til at lata inn eina frágreiðing fjórða hvørt ár um, hvussu ásetingarnar í sáttmálanum verða settar í verk og hildnar. Nevndin kannar frágreiðingarnar og ger sínar niðurstøður og møgulig tilmæli um viðurskifti, sum ikki eru í lagi.

Føroyar verða ikki roknaðar sum ein sjálvstøðugt tjóð, so møgulig óreglulig viðurskifti her høvdu verið tikin við í donsku frágreiðingina. Higartil hava Føroyar ikki verið nevndar í donsku frágreiðingunum.

Nevndin kann eisini kanna mál, reist av persónum, sum meta seg hava verið fyri píning ella vera í vandi fyri at verða pínd. Dømi eru um mál viðvíkjandi Danmark, m.a. hava onkur flóttafólk, sum ikki fáa friðskjól, kært til nevndina, tí tey meta seg vera í vanda fyri at verða pínd, um tey verða send heim aftur.

Nevndin kann harafturat fara á fráboðaða ella ófráboðaða vitjan í einum landi, har væl grundaður illgruni er um, at píning verður framd. Nevndin hevur fulla heimild til at koma framat allastaðir, har hon metir tað neyðugt.

Bent Sørensen, løgfrøðingur, serfrøðingur í píning og fyrrverandi limur í CAT, segði í fyrilestri í Føroyum í apríl 2007, at nevndin hevur sera stóra fyribyrgjandi ávirkan. Vitanin um, at tað finst ein nevnd, sum hevur púra fríar hendur at kanna eina og hvørja skuldseting um píning, hevur verið við til at minka um píning í heiminum.

Harafturat er arbeiðið hjá nevndini ein sera týdningarmikil liður og amboð í arbeiðinum at skjalprógva framda pining og í arbeiðinum at seta tey til svars, sum hava framt píning.

Í protokollini er sum áður nevnt áseting um eina aðra nevnd, sum hevur víðari heimildir enn høvuðsnevndin. Hesar báðar nevndir er millum týdningarmestu amboðini at fyribyrgja og steðga píning og innsavning av upplýsingum og prógvum til rættarsókn móti fólki, sum hava framt píning.


© Kalmar

*Inge Genefke og Bent Sørensen løgfrøðingur og serfrøðingur í píning. Hann er fyrrverandi limur í Committee Against Torture.*

## Føroyar og Danmark

Píning er ikki formliga forboðin við lóg í Danmark og Føroyum. M.a. Amnesty International og Rehabiliterings-og Forskningscentret for Torturofre (RCT) arbeiða fyri at fáa donsku - og harvið helst eisini føroysku - revsilógina broytta, so hon fær eina allýsing av píning og ásetingar um revsing fyri brot á forboðið móti píning.

Vit hava sambært sáttmálanum móti píning skyldu til at hava nationalar lógarásetingar, uttan mun til um píning verður framd ella ikki. Av tí at eingin allýsing ella kriminalisering av píning finst í felags donsk/føroysku revsilóggávuni, ber ikki til at siga við vissu, hvørt píning fer fram í okkara londum. Kærur móti løgregluni, har fólk meina, at tey hava verið fyri píning, verða viðgjørdar sum harðskapsmál orsakað av vantandi lógarásetingunum. Mett verður ikki, at píning sambært allýsingini í ST-sáttmálanum fer fram í Danmark og Føroyum. Hinvegin eru viðurskifti, har fólk verða illa viðfarin á ein hátt, sum fleiri meta verða at líkna við píning. Dømi um hetta eru longu isolatiónsfongslingarnar, sum verða brúktar í danska kongaríkinum, og viðferðin av fólki, sum eru dømd í forvaring ella eru innløgd á psykiatriskum deildum.

Fleiri av flóttafólkunum, sum búgva í Danmark, hava verið fyri píning. RCT metir, at 3. hvørt flóttafólk, sum fær friðskjól, hevur verið fyri píning, áðrenn tey komu til Danmarkar. Tað eru sera fá dømi um fólk, sum hava fingið friðskjól í Føroyum, men her má roknast við, at lutfallið er nakað tað sama.

Ein vanlig orsøk til, at fólk fáa friðskjól, er, at tað er veruligur vandi fyri, at tey verða fyri píning, um tey verða send heim aftur. Tá hevur landið, sum tey eru flýdd til, sambært ST-sáttmálanum ikki loyvi til at senda tey burtur.

# Altjóða sáttmálin um barnarættindi

*Firouz Gaini*
*PhD Antropologi*

*Barnarættindasáttmálin (Convention on the Rights of the Child [CRC]) viðurkennir, at kring allan heim eru børn, ið liva undir serliga torførum umstøðum, og at hesi børnini hava tørv á serligum fyriliti. Eisini tekur sáttmálin atlit til týdningin, ið siðvenjur og mentanarlig virði hava, tá vit hava verju og harmonisku menning barnsins í huga. Altjóða samstarv er alneyðugt, staðfesta londini, fyri at betra um livikorini hjá børnum í øllum londum – serliga í menningarlondum. Børn eru í fyrstu grein í sáttmálanum allýst sum eitthvørt menniskja undir átjan ár, um ikki persónurin verður myndugur fyrr sambært galdandi lóg í landinum. Sáttmálin krevur, at øll lond verja rættindini hjá øllum børnum, óansæð rasu, húðarlit, kyn, mál, trúgv, politiska ella aðra áskoðan, tjóðskaparligan, etniskan ella sosialan uppruna, ognarviðurskifti, avlami, føðing ella aðrar umstøður hjá foreldrum ella verjum hjá barninum.*

## Søgan um barnarættindini

At fáa heimsins lond at semjast um ein almennan sáttmála um grundleggjandi rættindini hjá børnum hevur verið eitt sera tíðarkrevjandi arbeiði. Tað gingu trý áratíggju, frá Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi varð samtykt í New York í desember 1948, til ein arbeiðsbólkur undir mannarættindakommissiónini *(United Nations Commission on Human Rights)* hjá Sameindu Tjóðum fór í holt við at skriva tekstin til sáttmálan um barnarættindi. Men síðan skuldu tíggju ár ganga, áðrenn arbeiðsbólkurin við umboðum úr 43 londum kom á mál, so sáttmálin kundi samtykkjast í París í 1989. Tó gongur søgan um rættindi barnanna longur aftur í tíð.

Fyrsta kenda uppskotið til eina lógfrøðiliga yvirlýsing um barnarættindi varð samtykt í Fólkasamgonguni (*League of Nations*) í Genève í 1924. Felagsskapurin ST avloysti eftir Seinna veraldarbardaga Fólkasamgonguna (1919-1946). Eglatyne Jebb, ið stovnaði felagsskapin Save the Children í 1919, var maðurin aftan fyri 5-punkts yvirlýsingina frá 1924. Longu í 1923 heitti Jebb á almenningin um at "krevja serlig rættindi fyri børn og at arbeiða miðvíst fyri at hesi fáa altjóða viðurkenning". Genève-yvirlýsingin frá 1924 umrøddi sosial, búskaparlig og sálarfrøðilig rættindi. Seinni, í 1959, samtyktu Sameindu Tjóðir eina meira umfatandi 10-punkts yvirlýsing um barnarættindi.

Ein yvirlýsing er ein sonevnd bleyt lóg, ið ikki er løgfrøðiliga bindandi, og sum sostatt ikki altíð elvir til nevniverdar broytingar á mannarættindaøkinum. Ein altjóðasáttmáli er meira bindandi, og tí fóru fleiri lond av álvara at samskifta um sáttmálar um barnarættindi í seinnu helvt av 1970-árunum. Í 1978 skjeyt Pólland upp, at Sameindu Tjóðir skuldu fyrireika ein sáttmála um barnarættindi at samtykkja í sjálvum altjóða barnaárinum. Men tað eydnaðist, sum kunnugt, ikki at samtykkja sáttmálan í 1979. Sáttmálin, ið hevur 54 greinir, varð einmælt samtyktur á aðalfundi Sameindu Tjóða tjúgunda november 1989.

26. januar 1990 byrjaði undirritanartilgondin. Heili 61 lond skrivaðu undir tann fyrsta dagin! Og í september 1990 var barnarættindasáttmálin formliga settur í

gildi. Í 2008 eru einans tvey lond eftir – Somalia og USA – sum ikki hava staðfest sáttmálan. Somalia og USA undirritaðu annars sáttmálan í ávikavist mai 2002 og februar 1995. Í skrivandi løtu er nýggjasta landið, ið hevur staðfest sáttmálan, Montenegro (okt. 2006). Umleið 97 prosent av heimsins børnum liva í londum, ið løgfrøðiliga hava bundið seg til barnarættindasáttmálan. Løgtingið samtykti SBR níggjunda apríl 1992. Danmark staðfesti sáttmálan á sumri 1991. Heimsins mest viðurkenda mannarættindatraktat er ST-sáttmálin um barnarættindi, ið 192 lond hava staðfest.

Barnarættindasáttmálin er sera áhugaverdur. Talan er um tann fyrsta ST-sáttmálan, ið allýsir bæði (a) borgarlig og politisk rættindi og (b) búskapar-, almanna- og mentanarrættindi. Vanliga vóru hesi (a og b) rættindi sundurskild. Sáttmálin hevur fleiri onnur sereyðkenni. Ongin altjóða sáttmáli hevur verið so skjótt staðfestur av teimum flestu londunum í heiminum sum SBR. Við øðrum orðum var sáttmálin rættiliga væl umtóktur. Barnarættindasáttmálin gevur haraftrat ikki-stjórnarfelagsskapum *(non-governmental organizations)* ein gyltan møguleika at geva Nevndini fyri barnarættindum viðmerkingar og frágreiðingar. Ein ikki-stjórnarfelagsskapur er ein politiskt óheftur felagsskapur, uttan búskaparligan vinning fyri eygað, ið virkar á lokalum, nationalum ella altjóða støði. Barnarættindanevndin hjá ST er altjóða myndugleikin, ið kann seta hugskot og tiltøk viðvíkjandi barnarættindum í verk.

## Grundlóg barnsins

Barnarættindasáttmálin hevur eina sjón um eitt samfelag, har børn verða viðurkend sum heil og sjálvstøðug menniskju við serligum rættindum. Børnini hava annan tørv og onnur áhugamál enn vaksin. Børn hava brúk fyri verju. Børn hava tó eisini tilfeingi til virkin at kunna luttaka í samfelagnum og til at spæla ein týðandi leiklut, tá vunnin rættindi skulu staðfestast. Sáttmálin frá 1989 er kollveltandi í mun til eldri sjónarmið um børn og samfelag. Barnarættindasáttmálin, ið verður kallaður “grundlóg barnsins”, bindir londini til at skapa lógarverk, ið hóska til borgarligu, politisku, sosialu, mentanarligu og búskaparligu rættindi barnsins.

Øll lond, sum hava undirritað sáttmálan, hava skyldu til at senda Sameindu Tjóðum umfatandi frágreiðingar, ið nágreiniliga lýsa støðuna hjá børnunum í landinum.

ÍformælinumtilsáttmálanverðurvísttilHeimsyvirlýsinginafrá1948,iðnevnirserligu viðbreknu støðuna hjá børnum. Heimsyvirlýsingin og mannarættindasáttmálarnir frá 1966 umboða kjarnan í altjóða mannarættindavernd. Í Heimsyvirlýsingini stendur t.d.:

- *Grein 16 stk. 3: Húskið er tann natúrliga frumeindin í samfelagnum og hevur rætt til vernd av samfelag og ríki*

- *Grein 25 stk. 2: Møður og børn hava krav um serliga umsorgan oghjálp. Øll børn, annaðhvørt tey eru fødd í hjúnalagi ella uttan, njóta somu almannavernd*

Barnarættindasáttmálin vísir ikki einans til Heimsvirlýsingina, men eisini til samtyktina um barnarættindi, ið aðalfundur Sameindu Tjóða samtykti í 1959, og til mannarættindasáttmálarnir frá 1966 – serliga grein tíggju – frá 1966. Grein tíggju er soljóðandi:

- *Grein 10 st. 1: Øll, hvørs frælsi er tikið frá teimum, skulu verða viðfarin menniskjansliga og við virðing fyri íbornari tign menniskjans*

- *Grein 10 st. 2:*
*A Ákærdir persónar skulu, uttan í serligum undantaksførum, vera skildir sundur frá dømdum persónum og skulu fáa serstaka viðferð sambært støðu teirra sum ódømdir*
*B Ákærdir ungdómar skulu vera skildir sundur frá vaksnum, og mál teirra skulu avgreiðast skjótast gjørligt*

- *Grein 10 st. 3: Revsiskipanin skal viðvíkjandi fangum hava til endamáls at bøta um fangarnar og fáa teir væl inn aftur í samfelagið. Ungir lógbrótarar skulu vera hildnir burtur frá vaksnum og skulu fáa viðferð, ið hóskar aldri og rættarstøðu teirra.*




*Børn í flóttafólkaleguni Nakivale í Uganda*

Í stuttum kann sigast at “grundlóg barnsins” frá 1989 skal tryggja børnunum úr øllum heraðshornum rættin til, (a) at fáa eftirlíkað grundleggjandi rættindi (t.d. mat, heilsu, bústað), (b) at mennast (t.d. við skúlagongd, frítíð, spæli og upplýsing), (c) at verða vard (t.d. ímóti kríggi, harðskapi og misnýtslu), og (d) at hava samavgerð (t.d. ávirkan, luttøku og hugsanarfrælsi). Hvørt einstakt barn er eitt subjekt við staðfestum heilum mannarættindum, førleikum og tilfeingi. Flestu stovnarnir, bæði almennir og privatir, ið seta børn í brennidepilin, brúka barnarættindasáttmálan sum virðisgrundarlag. Og tað má sigast at vera eitt stórt framstig fyri tey yngstu í samfelagnum.

## Aðalreglur í sáttmálanum

Barnarættindasáttmálin kann sigast at umfata fýra meginreglur. Grein tvey um ikki at gera mismum: øll børn í sama landi eiga at fáa javna viðferð uttan nakran mannamun av nøkrum slag. Grein trý um tað, ið tænir barninum best – hetta skal altíð hava hægstu raðfesting í øllum avgerðum viðvíkjandi barninum. Grein seks um rættin til lív og menning. Grein tólv um rættin til at siga sína hugsan og luttaka í avgerðum viðvíkjandi barninum – barnið er sjálvstøðugt, hevur fult mannavirði og hevur meiningar, ið skulu virðast. Serliga grein tólv umboðar eina nýhugsan innan mannarættindi.

Tá einstøku londini fyrst undirrita og síðan staðfesta altjóða sáttmálar, ið síðan koma í gildi í einstøku londunum, seta tey javnan krøv um fyrivarni og undantøk. Fyrivarni í sambandi við barnarættindasáttmálan verða ikki góðkend, um tey beinleiðis stríða ímóti aðalreglunum í og endamálinum við sáttmálanum. Eisini kunnu fyrivarni eyðvitað strikast, um londini sjálvi ynskja tað. Fyrivarni kunnu bæði verða lýst, tá sáttmálin verður undirritaður, og tá hann verður staðfestur í einstøku londunum. Danmark hevur eitt ítøkiligt fyrivarni í sambandi við barnarættindi. Grein 40 stykki 2b (v) er ikki galdandi í Danmark. Grein 40 snýr seg um viðferð av børnum í rættinum. Greinin staðfestir, at børn undir ákæru hava krav um rættarhjálp og rættvísa viðferð. Teksturin, ið ikki er galdandi í Danmark, ljóðar soleiðis: Luttakandi londini skulu syrgja fyri, at eitthvørt barn, ið er undir illgruna ella ákært fyri at hava framt lógarbrot, hevur í minsta lagi hesi rættindi:

[...] *"hvis det anses for at have begået strafbart forhold, at få beslutningen derom og enhver foranstaltning, der er truffet som følge deraf, prøvet af en højere kompetent, uafhængig og upartisk myndighed eller dømmende organ i medfør af loven".*

Høvuðsorsøkin til danska fyrivarnið er at finna í donsku rættarskipanini. Landið manglar eina skipan, ið opnar fyri møguleikanum at skjóta mál inn fyri hægri rætt í nevningadómum. Nevndin fyri barnarættindi hevur, eftir at hava viðgjørt donsku frágreiðingarnar um støðuna í landinum viðvíkjandi barnarættindum í 1995 og 1999, funnist at donskum myndugleikum. Í viðmerkingunum hjá nevndini frá september 2005, kallað "*Concluding Observations*", eru fleiri uppskot til, hvussu Danmark kann betra um rættarstøðuna hjá børnunum í landinum. Noreg hevði júst tað sama fyrivarnið sum Danmark fram til september 1995, tá norska stjórnin boðaði ST-aðalskrivaranum fá, at fyrivarnið skuldi strikast. Støðan í Danmark endurspeglar støðuna í Føroyum viðvíkjandi barnarættindum. Rættarskipanin er tann sama. Dómsvaldið í Føroyum er danskt málsøki. Sera nógv luttakandi lond hava fyrivarni til barnarættindasáttmálan, og trupulleikarnir í Danmark eru lutfalsliga smáir, tá samanborið verður við nógv onnur lond, serliga lond í triðja

heiminum. Í *Concluding Observations* hjá Barnarættindanevndini stendur m.a.

- *Danmark eigur at tryggja, at Barnarættindanevndin eisini fær upplýsingar um Føroyar*
- *Danmark eigur at styrkja implementeringina (fremjanina innlendis) av sáttmálanum um barnarættindi í landsins lógum og forskriftum*
- *Barnarættindasáttmálin eigur forrættindi í mun til danskar lógir, tá hesar stoyta saman*
- *Danmark eigur at innlima barnarættindasáttmálan í lóggávuna*
- *Danmark eigur at seta á stovn ein óheftan klagustovn við eini realistiskari játtan til børn – t.d. Umboðsmann*
- *Innsavningin av upplýsingum um børn í Føroyum og Grønlandi eigur at styrkjast*
- *Danmark eigur at avtaka sítt fyrivarni (grein 40, stk 2.b,v)*
- *Barnarættindasáttmálin eigur at vera partur av undirvísingarætlanini í øllum skúlum*
- *Øll, sum arbeiða við børnum, eiga javnan at fáa skeið og venjingar í barnarættindum*
- *Danmark eigur at tryggja øllum børnum verju ímóti skaðiligum upplýsingum og tilfari á alnetinum*
- *Danmark eigur at stuðla, at fosturfamiljur av øðrum uppruna enn donskum verða útvegaðar*
- *Sambandið millum børn í pleygu og foreldur teirra eigur at stuðlast, burtursæð frá um tað stríðir ímóti barnsins besta*
- *Danmark eigur at styrkja arbeiðið ímóti ovurvekt og fiti hjá børnum*

- *Børn eiga ikki at vera koyrd á psykiatriskar stovnar fyri vaksin*
- *Eitt átak ímóti sjálvmorði hjá børnum eigur at setast í verk*
- *Arbeiðið ímóti happing eigur at styrkjast, og børn eiga at luttaka í hesum*
- *Danmark eigur at betra um korini hjá børnum í flóttafólkalegum*
- *Danmark eigur at tryggja, at børn, ið misnýta rúsdrekka ella rúsevni, verða viðfarin sum offur – ikki sum brotsmenn*
- *Danmark eigur at stríðast ímóti barnapornografi og styrkja uppafturvenjingar (rehabilitering) ætlanir.*
- *Danmark eigur at broyta sín praksis við at avbyrgja-fongsla børn og eisini at sundurskilja børn og vaksin í frælsistøku*
- *Danmark eigur at syrgja fyri, at ung undir fimtan ikki vera fyri frælsistøku*

Nógv av hesum, ið nevndin her tekur upp, er eins viðkomandi fyri Føroyar sum fyri Danmark. Á nógvum økjum, serliga innan lógarsmíð og dómspraksis, eru vit í somu støðu sum Danmark.

**Valfríu protokollirnar**

Barnarættindasáttmálin hevur fingið tvær valfríar protokollir, ið nógv lond hava undirritað og staðfest. Protokollirnar vóru báðar samtyktar av ST í mai 2000. Tann fyrra, protokollin um luttøku av børnum í vápnaðum stríði, kom í gildi í februar 2002. Hendan protokollin er eitt framhald av grein 38 í sáttmálanum. Protokollin umboðar eitt stórt framstig, tí frammanundan var vanligt at hava herfólk í 15-18 ára aldri. Tann seinna, protokollin um sølu av børnum, barnaprostitutión og barnapornografi, kom í gildi í januar 2002. Henda protokollin er meira umstrídd, tí fleiri ikki-stjórnarfelagsskapir, m.a. Save the Children, meta hana vera óneyðuga. Hesir felagsskapirnir siga, at aðrir galdandi sáttmálar verja børnini ímóti hesum ræðuleikum.

Danmark hevur staðfest protokollirnar uttan fyrivarni. Føroyar hava í løtuni einans staðfest fyrru protokollina. Orsøkin til, at Sameindu Tjóðir ynsktu at víðka um barnarættindasáttmálan, var tann, at talan her er um sera álvarsom og viðkomandi viðurskifti, ið ikki vera nóg væl lýst í sáttmálanum. Eisini kann sigast, at protokollirnar fevna um viðurskifti, ið umboða ein vaksandi trupulleika í heiminum – t.d. barnapornografi á alnetinum. Valfríu protokollirnar skulu, eins og sáttmálin, eftirmetast við støði í frágreiðingum, ið tey luttakandi londini senda Sameindu Tjóðum.

Í skrivandi stund hava umleið 130-140 lond staðfest protokollirnar.

## Nevndin fyri barnarættindum

Hvørja uppgávu hevur nevndin fyri barnarættindi? Hvussu arbeiðir nevndin? Nevndin umfatar ein bólk av óheftum serfrøðingum, ið kannar arbeiðið, luttakandi londini gera fyri at seta barnarættindini í hásætið. Nevndin hevur eftirlit við, um londini, ið hava staðfest sáttmálan, halda sínar skyldur og seta neyðugar lógarbroytingar í verk. Nevndin hevur eisini eftirlit við, um londini, ið hava staðfest valfríu protokollirnar, halda sínar skyldur. Hetta eru risauppgávur, og neyvan koma vit nakrantíð heilt á mál.



© UN Photo/Mark Garten

*Formaðurin í barnarættindanevndini og núverandi ST-aðalskrivarin.*

Stjórnir, ið hava staðfest barnarættindasáttmálan – øll ST-limalondini uttan Somalia og USA – skulu við jøvnum millumbilum framleiða djúptøknar frágreiðingar, ið greina støðu landsins viðvíkjandi barnarættindum, at senda til hoyringar hjá Barnarættindanevndini. Hvør einasta frágreiðing verður nærlisin, og síðan fáa stjórnirnar eitt aftursvar, ið inniheldur atfinningar ella tilráðingar. Nevndin telur átjan limir úr ymsum londum og rættarskipanum; teir eru mannarættinda-serfrøðingar og skulu hava ein "høgan moral". Hóast limirnir eru útnevndir og valdir av stjórnunum, so skulu limirnir í nevndini arbeiða við støði í persónligum eginleikum. Persónarnir umboða ikki nakra stjórn ella nakran annan felagsskap, ið teir møguliga eru knýttir at. Limirnir sita eitt fýra-ára skeið og kunnu verða endurvaldir. Annaðhvørt ár stendur helvtin av nevndini fyri vali.

Grein 43 í sáttmálanum snýr seg um nevndina fyri barnarættindi. Fyrsta nevndin varð vald í februar 1991 við limum úr londum, ið høvdu staðfest altjóða sáttmálan. Úr norðurlondum er Noreg í skrivandi løtu limur í nevndini fyri barnarættindi. Nevndin fær ikki einans frágreiðingar frá stjórnum úr luttakandi londunum, tí óheftir barnarættindafelagsskapir sleppa at skoyta upplýsingar uppí. Eisini hava hesir ikki-stjórnarfelagsskapir høvi at luttaka í einum hoyringsumfari, ið limirnir í nevndini skipa fyri. Í Danmark hava fimtan felagsskapir í tøttum samstarvi skapt *Samgonguna fyri sáttmálan um barnarættindi*. Samstarvið byrjaði í 1991, og 4-5 ferðir árliga hittast felagsskapirnir til fundir og átøk. Í 2004 sendu fleiri av hesum felagsskapunum eina felags frágreiðing sum virðismikið uppískoyti til almennu frágreiðingina hjá donsku stjórnini um støðuna viðvíkjandi barnarættindum í Danmark. Í samgonguni eru t.d. Amnesty International Danmark, Børns Vilkår, Red Barnet og UNICEF Danmark.

Í 2008 skulu øll tey luttakandi londini (ikki øll í senn, ymisk lond ymisk ár) aftur senda sínar drúgvu frágreiðingar um liviumstøðurnar hjá børnunum í londunum til nevndina fyri barnarættindi. Nevndin hevur rætt til nýggjar frágreiðingar fjórða hvørt ár. Ár 2008 er eisini fyrstu ferð, at føroyska stjórnin gevur eitt sjálvstøðugt íkast til donsku ríkisfrágreiðingina. Hóast Løgtingið, sum fyrr nevnt, staðfesti sáttmálan í 1992, hava Føroyar tíverri ikki áður gjørt sína skyldu og sent tilfar avstað. Vit hava ikki givið Sameindu Tjóðum upplýsingar um føroysk børn, hóast

hetta var avtalað í sáttmálanum. Tí er tað gleðiligt at staðfesta, at Føroyar umsíðir hava skrivað sín part av ríkisfrágreiðingini. Føroyar eru ikki sjálvstøðug tjóð, og sostatt verður okkara frágreiðing send saman við donsku frágreiðingini.

## Føroyskt tilfar um barnarættindi

Føroyska samfelagið er eyðkent av, at nøkur málsøki eru yvirtikin eftir Heimastýrislógini, meðan onnur málsøki eru partur av danskari lóggávu. Hetta arbeiðsbýtið ávirkar eyðvitað arbeiðsgongdina, tá støðan hjá føroyskum børnum skal lýsast. Føroyska skjalið greiðir frá á øllum økjum, har vit hava yvirtikið málsøkið. Í prinsippinum skulu avvarðandi danskir myndugleikar afturfyri greiða frá á øllum økjum, har vit ikki hava yvirtikið málsøkið, men hetta sæst ikki altíð aftur í ríkisfrágreiðingini. Hin danski parturin av ríkisfrágreiðingini nevnir næstan ikki føroysk børn. Familjurætturin er eitt týðandi málsøki, ið ikki er yvirtikið. Revsirætturin er eisini danskt málsøki. Tað er Almanna- og Heilsumálaráðið, ið hevur samskipað føroysku frágreiðingina. Mentamálaráðið og Uttanríkisráðið hava eisini spælt ein leiklut í arbeiðinum at savna tilfar saman til frágreiðingina.

At savna saman hagtøl og vitan um korini hjá føroyskum børnum er eitt tungt umsitingarligt arbeiði, ið krevur nógva orku. Innan nógv málsøki eru hagtøl ikki savnað saman fyri landið. Viðhvørt eru als ongi hagtøl at vísa til. Hetta er ein álvarsamur trupulleiki í Føroyum í dag. Vit vita ov lítið um samfelagið, vit liva í. Hesar avmarkingarnar seta síni spor á frágreiðingini frá 2008, men frágreiðingin er ein góð byrjan. Næstu ferð, í 2012, kunnu vit væntandi leggja eina meira fullfíggjaða frágreiðing fram, ið m.a. tekur viðmerkingarnar hjá nevndini til føroyska partin av ríkisfrágreiðingini (2008) til eftirtektar. Óhefti felagsskapurin Barnabati, fyrrverandi limur í *Save the Children Alliance*, hevur gjørt eitt ískoyti, eina sonevnda skuggafrágreiðing, til almennu føroysku frágreiðingina.

## Frágreiðingin

Hvat stendur í føroysku frágreiðingini, ið er ein kapittul í ríkisfrágreiðingini, ið Danmark sendi nevndini í 2008? Her er ein stuttur samandráttur av skjalinum.

Í formælinum stendur, at landsstýrið hevur útfylt ein part av rammulógini um barnarættindi. Nýggja føroyska barnaverndarlógin verður tikin fram sum dømi um føroyskt lógarsmíð, har eitt aðalmál hevur verið at fremja sáttmálan í tjóðarlóggávu. Viðvíkjandi kravinum um at spjaða upplýsingar um barnarættindi út til fjøldina (grein 42 í sáttmálanum) verður sagt, at ungdómsting annaðhvørt ár verður hildið í Løgtinginum. Her fáa ung innlit í politisku arbeiðsgongdina í einum fólkaræði. Harafturat verður sagt, sum eitt svar til atfinningarnar hjá Barnarættindanevndini (2005), at ein lítil miðfyrisiting í einum lítlum samfelagi hevur eina rættiliga avmarkaða arbeiðsorku, tá tað ræður um at framleiða og skipa samfelagslig hagtøl. Tó sigur Almanna- og heilsumálaráðið, ið hevur framleitt frágreiðingina, at ætlanin er at menna hetta arbeiðið við at fáa fleiri hagtøl um føroysk børn til vega, m.a. við hjálp frá fólkateljingini, ið stendur fyri framman.

Sambært forsorgarlógini frá 1988 er eitt barn ein persónur undir átjan ár (grein 1). Sambært barnaverndarlógini frá 2005 kunnu børn fáa serliga vernd, til tey eru fylt 21 ár. Barnaverndarlógin gevur børnum rætt at verða hoyrd og siga sína meining í barnaverndarmálum í mun til aldur og búning barnsins (grein 12). Frá tað er fylt tólv ár skal barnið altíð hoyrast, og frá tað er fylt fimtan ár, skal tað altíð vera egin partur í málum. Sjúklingar, sum eru fyltir fimtan ár, skulu samtykkja sínar sjúkraviðgerðir. Persónar, sum eru fyltir fimtan ár, hava eisini málsinnlit og kunnu samtykkja, at heilsuupplýsingar verða givnir víðari. Øll, ið eru fylt átjan ár, eru myndug sambært myndugleikalógini.

Nýggja barnaverndarlógin, ið roynir at lúka krøvini hjá barnarættindasáttmálanum, hevur til endamáls at tryggja børnum trygg kor í uppvøkstrinum (grein 3). Børn, ið hava skaðilig – likamlig ella sálarlig – kor í uppvøkstrinum, hava rætt til

hjálp og umsorgan. Myndugleikarnir skulu velja tær loysnir, ið tæna einstaka barninum best. Lógin roynir eisini at tryggja rættartrygdina hjá børnum og foreldrum. Fakligu krøvini til persónar, ið hava barnaverndarmál um hendi, eru herd í barnaverndarlógini frá 2005. Fakfólk skulu hava reina revsiváttan og vitan um børn og ikki minst vera samvitsku- og ábyrgdarfull.

Dagstovnalógin frá 2000 ásetur krav um, at í minsta lagi 2/3 av starvsfólkunum á dagsstovnum, skulu vera útbúnir námsfrøðingar. Tó hava flestu dagstovnarnir í Føroyum ikki klárað at halda lógina, tí at ov fá fólk hava eina námsfrøðiliga útbúgving. Dagstovnalógin setur eisini krav um, at kommunurnar kanna og góðtaka førleikarnar hjá dagrøktarum og karmarnar í dagrøktarheiminum, áðrenn børn sleppa í dagrøkt. Landslæknin hevur ábyrgdina fyri at kanna, um heilsu- og reinførisviðurskiftini eru nøktandi á føroyskum dagstovnum, skúlum o.s.fr.

Forsorgarlógin frá 1988 ásetur, at einhvør maður og kvinna, mótvegis almannaverkinum, hevur skyldu til at forsyrgja hjúnafelaga sínum og børnum sínum (grein 5). Forsorgaruppgávan dettur burtur, um barnið verður ættleitt, um tað giftist, ella um ein dóttir gerst við barn frá tíðspunktinum, tá mett verður, at átta vikur eru til føðing. Myndugleikarnir hava skyldu til at stuðla foreldrum í uppalingini og røktini av børnum teirra.

Børn kunnu, sambært barnaverndarlógini, einans sundurskiljast frá foreldrum sínum, tá tað verður mett neyðugt í mun til tørv barnsins, og tá fyribyrgjandi fyriskipanir ikki hjálpa nóg væl (grein 9). Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerðir um at flyta børn úr heiminum – tíðaravmarkað ella uttan tíðarmark. Landsstýrismaðurin setir nevndina, ið hevur tríggjar limir – ein royndan løgfrøðing, ein sálarfrøðing og ein barnasakkønan. Fyrstnevndi persónur er nevndarformaður. Limirnir í nevndini verða valdir fyri fýra ár í senn.

Í nýggju barnaverndarlógini eru nógvar neyvar reglur fyri, hvussu sosialu myndugleikarnir skulu viðgera barnaverndarmál (grein 9). Málið er at tryggja børnunum og foreldrum teirra rættartrygd í málunum. Myndugleikarnir skulu eyðvitað eisini fylgja reglunum, ið umsitingarlógin ásetur. Ein avgerð um at flyta

eitt barn burtur frá foreldrunum kann kærast til Føroya rætt, ið í hesum føri verður víðkaður við tveimum serkønum dómarum í barnavernd og sálarfrøði. Ein dómur úr Føroya rætti kann kærast til Landsrættin.

Við nýggju barnaverndarlógini kunnu kommunurnar í landinum seta nógvar fyribyrgjandi fyriskipanir í verk í heiminum, í skúlanum, á dagstovnum, við stuðulsfamiljum o.s.fr. Í málum, har høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð um, at eitt barn skal flytast úr heiminum, er talan oftast um at flyta barnið í fosturfamilju ella á stovn. Lutfalsliga fá børn búgva á stovnum í Føroyum. Í mai 2008 vóru ongi børn undir átta ár, ið búðu á stovni. Kommunurnar rinda kostnaðin fyri fosturfamiljur.

Nýggja barnaverndarlógin hevur eisini sett Barnaverndarstovu Føroya á stovn. Hetta er ein felagskommunalur stovnur, ið m.a. hevur hesar uppgávur at røkja:

- *Styrkja og samskipa barnaverndarøkið í landinum*
- *Virka sum ráðgevi hjá landsstýrismanninum viðvíkjandi stevnumiðum á barnaverndarøkinum*
- *Vegleiða og ráðgeva barnaverndartænastunum í almennum spurningum viðvíkjandi viðgerð av barnaverndarmálum*
- *Veita barnaverndartænastunum undirvísing viðvíkjandi uppgávum teirra sambært hesi lóg*
- *Veita samdøgursstovnum ráðgeving og vegleiðing*
- *Savna saman og umsita hagtøl á økinum*

Í 2005 kom løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsukanningar av børnum og ungum í gildi. Endamálið við lógini er at menna fyribyrgjandi arbeiðið á heilsuøkinum í Føroyum. Børn skulu, sambært lógini, fáa tilboð um níggju fyribyrgjandi kanningar hjá einum kommunulækna. Børn undir skúlaaldur skulu fáa tilboð um sjey heilsukanningar, harav tríggjar fara fram fyrsta liviárið. Børnini fáa tilboð um tvær heilsukanningar, meðan tey ganga í fólkaskúla. Haraftrat skulu børn fáa tilboð um fyribyrgjandi og heilsufremjandi kanningar í skúlaheilsurøktini.

Foreldur, ið eru arbeiðsleys ella sjúk og ikki megna at uppihalda seg sjálvi og síni børn, hava rætt til uppihald frá almannaverkinum (grein 26-27). Almannafyrisitingin veitir stuðul sambært forsorgarlógini, lógini um sjúkradagpengar, pensiónslógini ella arbeiðsloysistryggingini. Almannahjálp verður einans veitt, tá allir aðrir møguleikar fyri stuðuli eru troyttir. Almannahjálpin er tillagað tørvinum og inntøkunum í húskinum. Foreldur fáa annars, óansæð inntøku, barnastyrk, heilt til børnini eru fylt átjan ár. Hetta er ein skattafrádráttur. Fólk, ið hava lága ella onga skattainntøku, fáa studningin beinleiðis útgoldnan. Ein nýggj lógarbroyting inniber, at stakir uppihaldarar frá september 2008 fáa ein hækkaðan stuðul til síni børn. Tey fáa 6.000 kr. fyri hvørt barn um árið.

Øll børn í Føroyum hava sambært fólkaskúlalógini rætt til undirvísing, tá tey eru í skúlaaldri (grein 28). Børnini hava sostatt rætt og skyldu til at luttaka í undirvísingini í fólkaskúlanum ella aðrari undirvísing, ið lýkur tey somu krøvini, sum fólkaskúlin ger. Fólkaskúlalógin varð broytt í juni 2007, og tað merkir, at ymisk viðurskifti innan undirvísing eru broytt – t.d. eru fleiri skúlatímar til teir yngstu næmingarnar og landsumfatandi royndir í føroyskum, støddfrøði og náttúru/tøkni til eldru næmingarnar. Haraftrat er tað krav í dag, at undirvísingin leypandi verður eftirmett. Undirvísingin skal eisini taka útgangsstøði í hinum einstaka næminginum.




*Skúlabørn í Port-au-Prince, Haiti luttaka í einum tiltaki hjá Amnesty International.*

Viðvíkjandi mentanartilboðum til ung tryggjar t.d. føroyska kringvarpslógin, at ein *public service*-avtala eisini tekur atlit til børn og ung (grein 31). Kringvarp Føroya skal eisini syrgja fyri, at sendingarnar ikki skaða likamligu, andaligu og moralsku menningina hjá teimum undir átjan ár.
Ein fjølmiðlanevnd er sett á stovn, og miðlanevndalógin til verju av børnum

og ungdómum skal tryggja karmarnar fyri upplýsing og vegleiðing viðvíkjandi filmum og spølum til børn.

Ítróttarsamband Føroya fær fíggjarligan stuðul, ið tað býtir út til limafeløg síni. Ein ítróttaráðgevi er eisini settur í starv, og hann skal fyrst og fremst vegleiða innan ítróttaarbeiði fyri børn og ung. Føroysk ungdómsfeløg og skótafeløg fáa eisini stuðul. Haraftrat er Mentamálaráðið í ferð við at orða ein landsumfatandi mentanarpolitikk fyri børn og ung.

Sum sæst, umfatar føroyska frágreiðingin upplýsingar um sera nógv viðurskifti, ið ávirka liviumstøðurnar og gerandisdagin hjá børnum og ungdómum í Føroyum í dag. Frágreiðingin er eitt sera hent amboð, ið feløg og stovnar, ið arbeiða við føroyskum børnum, kunnu brúka og vera við til at menna víðari. Nú eru grundin løgd, og tað kemur óivað at gera arbeiðið at skriva frágreiðingar til ST lættari í framtíðini. Eisini verður lættari at samanbera støðuna í Føroyum við støðuna í Íslandi, Grønlandi, Stórabretlandi og í øðrum londum, tá føroyska frágreiðingin kemur at umfata fleiri hagtøl og data.

## Skuggafrágreiðing hjá Barnabata

Barnabati, ið arbeiðir fyri at fremja barnarættindi í Føroyum, hevur síðstu árini havt eina vælvitjaða telefon-ráðgeving til børn og ung, ið hóskar sera væl til sjónina í barnarættindasáttmálanum. Telefonráðgevingin – *Tú & eg ráðgevingin* – hevur útfylt eitt tómrúm í samfelagnum, tí sera nógv børn brúka tænastuna, og nógv teirra hava álvarsamar trupulleikar at fortelja um. Skugga-frágreiðingin er stuttorðað, men áhugaverd, tí felagskapurin hevur stórt innlit í viðurskiftini hjá børnum í Føroyum. Tað eru sera fáir føroyskir felagsskapir, sum hava børnini í brennideplinum, og tí er arbeiðið hjá Barnabata sera virðismikið. Barnabati sigur í sínum viðmerkingum til greinirnar í barnarættindasáttmálan m.a.:

- *Grein 12. Rættin at siga sína hugsan. Vit eru í iva, um allir lærararnir í tí føroyska fólkaskúlanum geva næmingum sínum ein virðiliga viðfer sambært barnarættindasáttmálan.*

- *Grein 19. Verja ímóti ringari viðferð. Í samskifti okkara við børn og ungdóm, vita vit, at tað eru nógv teirra, sum ikki verða viðfarin sambært málunum í barnarættindasáttmálanum. Foreldur teirra hava av ymsum orsøkum ikki førleikar/yvirskot at geva børnum sínum ta neyðugu umsorgan og uppaling. Aðrir familjulimir vísa seg at hava ilt við at seta seg í samband við Barnaverndina. Viðhvørt eru aðrir serfrøðingar, ið kenna barnið, men sum heldur ikki fráboða Barnaverndini. Við øðrum orðum er tað eisini skipanin, ið svíkur hesi børnini, tí fráboðanarskyldan verður ikki hildin.*

- *Grein 34. Kynslig misnýtsla. Tað eru børn í Føroyum, ið verða kynsliga misnýtt, bæði í og uttan fyri heimið. Vit fáa samband við hesi børnini, ið føla, at tey ikki hava vaksin fólk í sínum umhvørvi, ið kunnu hjálpa teimum og skilja hesar trupulleikarnar.*

- *Grein 39. Endurbúgvandi røkt. Børn og ung, ið hava verið fyri vanrøkt, revsing ella misnýtslu líða av, at vit í Føroyum enn ikki hava nøkur væl skipað hjálpartiltøk til børnini. Hjálpin, tey fáa, er ofta sera tilvildarlig. Tað eru ongi ítøkilig almenn tilboð til kynsliga misnýtt børn og ung, har arbeitt verður við at geva teimum tey amboðini, ið forðar teimum at sjálvi gerast (kynsligir) misnýtarar sum vaksin. Og heldur ikki hava vit í Føroyum málrættað almenn viðgerðartilboð til børn og ung, ið koma úr øðrum illa-virkandi familjum, t.d. við rúsdrekkamisnýtslu ella sálarsjúkum foreldrum.*

Barnabati er tann einasti óhefti felagsskapurin í Føroyum, ið hevur skrivað skugga-frágreiðing til Barnarættindanevndina umvegis ríkisfrágreiðingina. Aðrir viðkomandi felagsskapir, ið kundu luttikið, eru Javni, MBF, Ættleiðingarfelagið, Amnesty International o.s.fr. Barnabati er serliga ørkymlaður um ungdómin í 13-18 ára aldri. Tað er hesin bólkurin, ið sambært Barnabata er í størsta vanda fyri at ikki fáa tey rættindi, ið barnarættindasáttmálin staðfestir, til verju.
Barnabati hevur seinastu árini miðvíst arbeitt fyri at fremja tiltøk innlendis (*implementering*), ið gera, at tað føroyska samfelagið livir upp til krøvini, ið barnarættindasáttmálin hevur ásett. Størsta verkætlanin er *Tú & eg ráðgevingin* hjá Barnabata. Hetta er navnleys ráðgeving til børn og ung umvegis telefon (80 70 10) og alnet (www.eg.fo). Barnabati lýsir verkætlanina soleiðis fyri børnum:

*"Ongan at tosa við?*
*Vit kunnu hjálpa tær.*
*Er lívið kiksað? Happar onkur teg? Ongan at spæla við? Eru mamma og babba droy? Er skúlin rotin? Ella er tað okkurt heilt annað, sum ikki er gott?*
*Tú kanst altíð tosað við okkum. Vit eru nøkur vaksin, sum duga væl at lurta.*
*Vit skilja teg. Vit kunnu hjálpa tær."*

Barnabati hevur eisini framleitt upplýsandi undirvísingartilfar á føroyskum til fólkaskúlan. Talan er um tveir smáar faldarar til yngri og størri børn í fólkaskúlaaldri, har viðkomandi greinir úr sáttmálanum verða lýstar á einfaldan námsfrøðiligan hátt. Til grein tvey um javnstøðu og verju ímóti mismuni, stendur t.d. soleiðis í einum av faldarunum:

*"Ongin annar er sum tú. Tú og øll onnur børn og ung skulu virðast. Uttan mun til hvørja familju tú hevur, hvørjum landi tú ert úr, hvat mál tú tosar, hvat tú trýrt, um tú ert genta ella drongur, hvønn tú verður góð/ur við, ella um onkur hevur okkurt brek.*
*Stóribeiggi mín situr í rullistóli. Summi vaksin eru serliga fitt við hann bara av tí. Er tað rættvíst? Eg og vinfólkini hjá mær trúgva uppá Jesus, men eg veit um onkran, ið trýr upp á Allah. Noyðist man at trúgva uppá tað sama fyri at vera vinfólk? Eru gentur betri enn dreingir? Ella er tað øvut? Kann ein drongur siga, at hann heldur ein annan drong vera fittan? Ber til at vera føroyingur, sjálvt um tú kemur úr einum øðrum landi? Eg haldi, at summi fólk eru løgin. Hevur man rætt at vera so løgin, sum man vil?"*

Barnabati er luttakandi partur í nýggja SSP-samstarvinum í Føroyum, hvørs endamál er at fyribyrgja, at børn undir átjan ár fremja brotsverk og gerast partur av brotsligum marginaliseraðum bólkum í samfelagnum. SSP er eitt samstarv millum skúlaverk, sosialar myndugleikar og løgreglu. Endamálið við samstarvinum er at samskipa tað fyribyrgjandi arbeiðið og fremja tvørfaklig átøk, ið kunnu forða fyri lógarbrotum millum børn, og sum kunnu hjálpa teimum, ið av ymsum orsøkum eru komin í eina óhepna støðu viðvíkjandi harðskapi, rúsevnum, óhóskandi atburði o.s.fr. Arbeiðsuppgávurnar hjá SSP-ráðgevanum eru sera

týðandi fyri ítøkiliga SSP-virksemið kring landið og fyri samskiftið millum ymsu myndugleikarnar.

Ráðgevin skal savna hagtøl og upplýsingar um lógarbrot hjá børnum og royna at greina orsøkirnar til brotsverkini. Ráðgevin skal eisini lýsa møguleikarnar fyri fyribyrgjandi arbeiði í lokalsamfelagnum og menna og samskipa lokal og landsumfatandi átøk. Almanna- og Heilsumálaráðið, Mentamálaráðið, Løgreglan, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag og Barnaverndarstova Føroya hava ábyrgdina av SSP-samstarvinum.

Barnabati roynir at betra um almennu vitanina um barnarættindi í Føroyum Ein týðandi partur av sáttmálanum snýr seg júst um at upplýsa fólk úr øllum samfelagsbólkum um barnarættindi. Allar frágreiðingarnar, ið londini senda til Barnarættindanevndina, eiga at vera frítt og lætt atkomandi hjá øllum borgarum landsins. Tað er eitt mál í sjálvum sær at spjaða boðskapin hjá sáttmálanum út til fólkið og at geva fjøldini álítandi kunning um korini hjá børnunum í landinum.

## Visión 2015

Í 2007 legði løgmansskrivstovan eitt stásiligt álit fram, ið nevnist *Mál og Vegir*, við trettan sonevndum *grundarsteinum* fyri Visión 2015 fyri føroyska samfelagið. Visiónin hjá landsstýrinum var, at Føroyar í 2015 skulu vera millum bestu lond í heiminum at liva í. Í grundarsteininum *Vælferð* er eitt áhugavert brot um vælferðina hjá børnum og ungum (s. 219-221). Her verða týðandi mál fyri samfelagið orðað, ið hava eitt tætt tilknýti til sjónina í barnarættindasáttmálanum. Sagt verður m.a., at arbeiðs- og familjulív skulu hóska betur saman: familjuni verða tryggjaðar bestu umstøður við lagaligum skipanum á arbeiðsmarknaðinum, soleiðis at bæði foreldrini fáa betri stundir at vera saman við børnum sínum. Allir løntakarar skulu, sambært Visión 2015, kunna vera heima við løn á fyrsta og øðrum sjúkradegi hjá børnum.

Víðari verður sagt, at skipanin við barnsburðarfarloyvi skal víðkast til eitt ár, og farloyvistíðin skal býtast javnt millum foreldrini. Haraftrat skal ansingartrygd verða

veitt øllum børnum, og ansingartilboð skulu hóska til tørvin hjá barnafamiljuni, so at børnini kunnu verða ansað uttan fyri vanliga upplatingartíð (um kvøldið/náttina). Sera viðkomandi í mun til sáttmálan er at lesa, at Visión 2015 miðjar ímóti, at øll starvsfólk, ið fáast við børn og ung, skulu vera skikkað og útbúgvin; hetta skal tryggja eitt gott fakligt støði og góð ansingartilboð. Ansingarstovnarnir skulu seta mál fyri starvsfólki og stovni.

Visión 2015 ynskir eisini at menna samstarvið innan barna- og ungdómsøkið. Barna- og ungdómsøkið skal skipast og samskipast, so at tilboðini vera børnunum at frama. Viðvíkjandi fólkaskúlunum, so skulu hesir umboða miðsavnandi deplar í nærumhvørvinum hjá børnunum, har tey eisini eftir skúlatíð hava møguleika at fáast við fjøltáttað og mennandi ítrótt og ítriv og kunnu gera skúlating. Eitt annað týðandi mál í Visión 2015 er at menna barnatænastuna. Skipanin við heilsufrøðingum, verður sagt í álitinum, skal styrkjast og mennast og soleiðis stuðla upp undir, at øll børn undir átjan ár trívast og fáa rík og heilsugóð barnaár. Visión 2015 vísir eisini á, at vit mugu orða ein føroyskan barna- og ungdómspolitikk.
Síðan kemur parturin av álitinum, ið beinleiðis lýsir barnarættindi. Aðalmálið við barna- og ungdómspolitikkinum í Visión 2015 er, at øll børn og ung skulu hava somu rættindi og somu møguleikar, óansæð hvørjar fortreytir og umstøður tey annars hava. Hetta er beinleiðis tikið úr barnarættindasáttmálanum. Her er m.a. eitt uppskot um at skapa eitt barna- og ungdómsráð, ið tryggjar børnum og ungum bestu umstøðurnar at vaksa upp og mennast í. Ráðið skal vera mannað við umboðum úr Barnabata, Føroya Ungdómsráð o.s.fr. Ráðið skal vera ráðgevandi hjá myndugleikum í barna- og ungdómsmálum. Ráðið skal koma við tilmælum um átøk at betra um umstøðurnar hjá føroyskum børnum. Ráðið skal virka óheft av politiska myndugleikanum. Hetta er eitt sera gott hugskot, ið veruliga kann skapa stór framstig í tí føroyska samfelagnum, tá hugsað verður um barnarættindasáttmálan. Virðingin fyri rættindum hjá børnum verður óivað styrkt við einum ráði av hesum slag.

**Niðurstøða**

At semjast um, hvussu mannarættindi skulu allýsast er ein stór avbjóðing. At samtykkja altjóða sáttmálar er ein risaverkætlan, ið krevur eitt stórt forarbeiði, ið umfatar ósemjur, neyðsemjur, kjak, samráðingar og nógvar ymsar tulkingar. At fremja altjóða sáttmálar innlendis í einstøkum londum er eitt eins krevjandi arbeiði, ið sjáldan kemur heilt á mál. Við øðrum orðum er vónleyst at fáa eitt heimssamfelag uttan mannarættindabrot. Tá vit tosa um barnarættindi og hyggja at sáttmálanum, so er sera nógv at gleðast um. Einans tvey lond hava ikki staðfest sáttmálan *anno* 2008. Sera nógvir altjóða felagsskapir stríðast fyri at fáa londini at virða barnarættindini, t.d. Save the Children, UNICEF og Amnesty International. Og hóast tað tekur langa tíð at broyta siðvenjur, hugburð, lóggávu og politiskar raðfestingar, so eru framstig at hóma á sera nógvum frontum.

Arbeiðið fyri at fáa londini at laga sínar lógir til barnarættindasáttmálan er ein prosess, ið krevur vitan, førleikar og hugsjónir umframt gott samstarv millum felagsskapir og lond kring allan heimin. Eisini í Føroyum eru framstig at hóma m.a. við arbeiðinum hjá Barnabata, nýggju barnaverndarlógini og SSP-samstarvinum. Frágreiðingin, ið Føroyar senda Sameindu Tjóðum, umboðar eisini eitt týðandi framstig, tí hon prógvar at virðingin fyri børnum er vaksin, og at trýstið frá Barnarættindanevndini gevur úrslit. Endamálið við hesum tekstinum hevur verið at geva føroyskum børnum og vaksnum tilfar um barnarættindi á føroyskum máli, ið kann skapa eina størri tilvitan um barnarættindasáttmálan og týdningin av at verja rættindini hjá øllum børnum í øllum londum. Vónandi kann greinin birta upp undir kjak og fáa fleiri í Føroyum at stremba eftir at fáa barnarættindini í hásætið.

# Altjóða sáttmálin um rættindi teirra brekaðu

*Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur*

## Inngangur

Altjóða sáttmálin um rættindi teirra brekaðu er av stórum týdningi fyri tey, ið bera brek, og teirra stremban eftir javnstøðu. Brek er sum hugtak ikki støðugt, men er viðurkent av sáttmálanum sum verandi *an evolving concept*. Hetta merkir, at krøvini til londini sum frálíður koma at verða meira umfatandi, og sum frálíðir verður avbjóðingin at uppfylla sáttmálan størri. Politiski myndugleikin hevur samtykt, at sáttmálin eisini skal fevna um Føroyar og verður sáttmálanum sýndur ta virðing, sum hann eigur, koma rættindini í sáttmálanum at vera sjónlig og hava stóran týdning í føroyska samfelagnum. Henda grein viðger innihaldið í sáttmálanum, søguna, føroysku støðuna og kemur inn á nøkur dømi.

## Gongdin

Í 1976 avgjørdi aðalfundur Sameindu Tjóða, at 1981 skuldi vera ár teirra brekaðu. Aðalfundurin heitti somuleiðis á limalondini um at virka fyri ætlanum á nationalum, regionalum og altjóða stigi við atliti at javnbjóðis møguleikum, endurmenning og forðan av mismuni vegna brek.

Sjálvt um ongar altjóða reglur vóru samtyktar í 1981, so skuldi árið 1981 vísa seg at gerast eitt serligt ár, og kann søgan um rættindini hjá teimum, ið bera brek, býtast upp í tíðina áðrenn og eftir 1981.

Áðrenn 1981 broyttist hugburðurin til tað at bera brek. Fyri flest lond hevði tað at bera brek verið eitt sosialt mál, har fokus var sett á brekið og ikki tað einstaka menniskjað.

Eftir 1981 kom veruliga vend í, og tað gjørdist nú meira ein spurningur um javnstøðu hjá tí einstaka og luttøku í øllum samfelagsviðurskiftum í mest møguligan mun.

Samfelagið hevði innrættað seg soleiðis, at tey, ið bóru brek, høvdu í longri tíð verið gjørd ósjónlig, og heldur enn at seta fokus á brekið vóru tey sædd sum ein bólkur av fólki, ið hevði brúk fyri verju, viðgerð og stuðul, heldur enn fólk við javnbjóðis rættindum.

Sum eitt úrslit av hesum vórðu fólk við breki sett uttan fyri mangt, sum samfelagið annars hevði at bjóða uppá. Heldur var dentur lagdur á at taka serliga atlit og veita eitt nú serligar skúlar, vardar bústaðir og serflutning o.a., tí hildið varð, at tey, ið bóru brek, vóru ikki før fyri at luttaka í samfelagnum javnbjóðis við onnur.

Við hesum hugburði varð teimum forðað atgongd til fleiri grundleggjandi frælsi, eitt nú heilsuviðgerð, arbeiði, útbúgving, luttøku í demokratinum og mentanarligum tiltøkum, ið flest fólk taka sum eina sjálvfylgju.

Týðandi hugburðsbroytingar eru hendar, og nú verða fólk, sum bera brek, í nógv størri mun vird á sama hátt sum tey, ið ikki bera brek, sum einstøk menniskju, ið hava somu grundleggjandi rættindi sum øll onnur.
Hugburðsbroytingin og uppfylgjandi politikkur og lóggáva er ein sein og ymisk tilgongd í teimum ymisku londunum, men gongdin er tann rætta vegin innan allar búskaparligar og sosialar skipanir.

Við at viðurkenna, at tey, ið bera brek, hava somu grundleggjandi rættindi, verður nú miðað ímóti, at tey fáa ávirkan og kunnu luttaka í øllum politiskum, búskaparligum, sosialum og mentanarligum samfelagsviðurskiftum, har virðingin fyri menniskjanum og tørvinum hjá tí einstaka verður sett í hásæti.

Fyri at staðfesta hesi grundleggjandi rættindi og seta ferð á eina altjóða hugburðsbroyting vóru summi lond farin at tosa um at gera ein altjóða sáttmála,

sum skuldi staðfesta rættindini hjá teimum, ið bera brek, og forða fyri mismuni.

Seinni í 80-árunum gjørdu Italia og Svøríki eina roynd at fáa sett í gongd arbeiðið at fáa ein altjóða sáttmála um rættindi teirra brekaðu. Henda royndin fall niðurfyri vegna vantandi undirtøku. Ein av høvuðsorsøkunum var møguliga tann, at tað í hesum tíðarskeiðinum ikki var nóg nógv orka til yvurs í ST-høpi, tí eftir at tilgongdin viðvíkjandi Barnarættindasáttmálanum hevði verið trupul, vóru tað fleiri lond, sum høvdu brúk fyri einum steðgi í at gera altjóða sáttmálar.

Áhaldandi strembanin eftir at fáa ein altjóða sáttmála var tó ikki til fánýtis. Í 1993 samtykti aðalfundur Sameindu Tjóða "Fyrimyndarreglur um javnar møguleikar fyri fólk, ið bera brek". Hetta eru vegleiðandi reglur. Sjálvt um reglurnar ikki eru bindandi fyri limalondini í ST, so eru tær ikki uttan týdning. Reglurnar eggja limalondunum moralskt og politiskt til at gera nakað fyri at beina fyri mismuni vegna brek, og at fólk, ið bera brek, hava somu møguleikar sum onnur.

Tær 22 reglurnar staðfesta grundleggjandi mannarættindi og áseta vegleiðandi reglur um, hvussu farast skal fram fyri at uppnáa javnbjóðis luttøku í øllum samfelagsviðurskiftum so sum atkomu, arbeiði, útbúgving, ítrótt og religión.

**Ein altjóða bindandi sáttmáli verður veruleiki**

Hóast "Fyrimyndarreglurnar um javnar møguleikar fyri fólk, ið bera brek" vóru framvegis fleiri, sum vóru av teirri áskoðan, at tað ikki var nokk bert við vegleiðandi reglum. Ásannandi, at tørvurin og hugurin var til staðar at fara undir at gera ein løgfrøðiliga altjóða bindandi sáttmála, tóku nøkur lond seg saman og settu fram uppskot í Sameindu Tjóðum um at fara undir gerð av einum altjóða sáttmála um rættindi teirra brekaðu.

Tað var í desember 2001, at Meksiko setti fram uppskot á Aðalfundi Sameindu Tjóða um at seta eina arbeiðsnevnd at umhugsa og gera uppskot um ein altjóða sáttmála um rættindi teirra brekaðu. Aðalfundurin samtykti uppskotið, og í august 2002 hevði nevndin sín fyrsta fund.

## ST-Arbeiðsnevndir (Ad hoc committees)

Ein ST-arbeiðsnevnd arbeiðir ikki eftir somu mannagongdum, sum nevndir annars gera. Ikki einans eru nevndirnar rúgvismiklar, men vanliga er limaskarin breiður og umboða limirnir allar heimsins partar. Fyri at koma á mál er tí umráðandi, at fyrireikingararbeiðið er gjørt til fulnar áðrenn fundirnar. Fundirnir hjá Ad Hoc nevndum vara vanliga yvir fleiri dagar, og tað er langt millum fundirnar.

Í august og endaliga í desember 2006 hevði arbeiðsnevndin sín áttanda og seinasta fund. Í august vóru tær síðstu samráðingarnar, og avgjørt varð at senda uppskotið til løgfrøðiligan rættlestur. Eftirfylgjandi, í desember, tá uppskotið kom aftur, var uppskot um ein altjóða sáttmála um rættindi teirra brekaðu og valfría protokollin samtykt av arbeiðsnevndini.

Sáttmálin og valfría protokollin vóru síðani løgd fyri aðalfund Sameindu Tjóða. 13. desember 2006 var sáttmálin um rættindi teirra brekaðu og protokollin samtykt við einmæltari semju uttan atkvøðugreiðslu í høvuðssætinum hjá ST í New York.

## Einmælt samtyktur

Tá talan er um at fáa einmælta semju millum øll heimsins lond, verður hildið, at arbeiðið at skriva og fáa semju um sáttmálan og valfríu protokollina gekk rættiliga skjótt í mun til aðrar mannarættindasáttmálar.
30. mars 2007 var klárt hjá ST-limalondunum at skriva undir. Sama dagin, møguligt var at skriva undir, undirritaðu 82 lond sáttmálan. Hetta er besta luttøkan, nakar ST sáttmáli hevur fingið frá byrjan.


© UN Photo/Devra Berkowitz

*Forsetin í Ukreina undirritar sáttmálan fyri rættindi teirra brekaðu.*

3. mai 2008, eftir at 20 lond høvdu staðfest sáttmálan og 10 protokollina, fekk sáttmálin gildi og protokollin fyri tey londini, ið høvdu staðfest hana.

Altjóða Sáttmálin um rættindi teirra brekaðu er fyrsti mannarættindasáttmálin í 21. øld og tann fyrsti mannarættindasáttmálin, sum ger tað møguligt hjá regionalum felagsskapum at taka undir við sáttmálanum, eitt nú ber til hjá ES sum ein felagsskapur at staðfesta sáttmálan og seta sáttmálan í gildi í ES við teimum avmarkingum, sum innanhýsis ES lóggávan loyvir.

Sáttmálin fevnir ikki bert um mannarættindi, men inniheldur eisini ásetingar um sosial og búskaparlig viðurskifti. Sáttmálin endurstaðfestir, at einhvør við einum og hvørjum breki skal verða fevndur av øllum mannarættindum og grundleggjandi frælsum á jøvnum føti við øll onnur.

Sáttmálin er hugburðsbroytandi og ger upp við gomlu fatanin um, at tann, ið ber brek, er ein byrða, ið hevur brúk fyri neyð- og sosialhjálp frá samfelagnum, og staðfestir, at fólk, ið bera brek, eru borgarar við javnbjóðis rættindum við allar aðrar borgarar og hava rætt til sjálvi at avgera og skipa teirra lív og skulu hava møguleikan at luttaka aktivt í øllum viðurskiftum í samfelagnum.

**Nógvum menniskjum at gagni**

Ikki ber til at siga annað enn, at sáttmálin tænir einum breiðum skara av fólki. Mett verður, at tað eru umleið 650 milliónir fólk í heiminum, ið bera brek. Um teirra nærmastu familjulimir verða íroknaðir, eru tað áleið 2 milliardir fólk í heiminum, ið beinleiðis eru ávirkað av einum breki. Hetta er næstan ein triðingur av øllum heimsins borgarum, og tískil kann staðfestast, at sáttmálin um rættindi teirra brekaðu og protokollin við vissu er nógvum menniskjum at gagni.

## Tvær umsitingar

Sum vanligt er við ST-sáttmálum, umsita Sameindu Tjóðir eisini sáttmálan og valfríu protokollina. Tað eru tvær umsitingar. Ein umsiting er hjá búskapar- og sosialu deild Sameindu Tjóða í New York. (United Nations Department of Economic and Social Affairs, DESA). Hin umsitingin er hjá OHCHR í Geneve (The Office of the High Commissioner for Human Rights).

## Innihaldið

Altjóða sáttmálin um rættindi teirra brekaðu hevur 50 greinir. Sáttmálin hevur ásetingar um mannarættindini hjá fólki, ið bera brek og setur krøv til limalondini, at tey skulu arbeiða fyri at breiða út vitanina um sáttmálan og verja og tryggja hesi mannarættindini. Harumframt eru ymiskar ásetingar um at seta sáttmálan í gildi og ásetingar um eftirlit til tess at tryggja, at sáttmálin verður fylgdur.

Sum flestu ST-sáttmálar byrjar sáttmálin við einum formæli, eisini kallað *Preamble*. Hesi fororð geva innlit í, hví tørvur er á sáttmálanum. Tikið verður í partar av tí søguligu gongdini, og er ætlanin við formælinum at geva lesaranum eina fatan av, hvat sáttmálin snýr seg um.

Endamálið við sáttmálanum er, sum staðfest í grein 1, at fremja, verja og tryggja, at øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi fult og javnbjóðis verða fólki, ið bera brek, til gagns, og at virðing verður sýnd fólki, ið bera brek.

Grein 2 inniheldur nakrar høvuðslýsingar av hugtøkum, ið verða brúkt í sáttmálanum. Millum annað skal *mál* skiljast í breiðastu merking og er ikki avmarkað til bert at fevna um skrivi- og talumál, men punktskrift, nerting og aðrir hættir fyri samskifti eru eisini at rokna sum mál í mun til sáttmálan.

Allur mismunur, grundaður á brek, er ólógligur sambært sáttmálanum. Staðfest verður, at mismunur vegna brek fevnir sera vítt. Er tað eitt brek hjá tí einstaka,

ið er orsøkin til eina avgerð, ið hevur við sær, at tann við brekinum er fyri vanbýti, verður avgerðin at rokna sum mismunur og harvið brot á sáttmálan.

Hóast møguleiki var fyri tí, hava høvundar valt ikki at lýsa hugtakið “brek”. Grundgevingin fyri ikki at lýsa hugtakið nærri er fyri ikki at avmarka hugtakið. Í fororðinum til sáttmálan stendur, at hugtakið brek broytist, og at brek er úrslit av sínámillum ávirkan millum fólk, sum eru viknað, og forðingum, ið standast av hugburði og umhvørvi, sum tarnar teimum til fulnar og á virknan hátt at vera við í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

## Brek er hugtak í broyting

Í formælinum undir punkt (e): ”viðurkenna, at brek er hugtak í broyting, og at brek er úrslit av sínámillum ávirkan millum fólk, sum eru viknað, og forðingar, ið standast av hugburði og umhvørvi, sum tarnar teimum til fulnar og á virknan hátt at vera við í samfelagnum javnbjóðis øðrum.

### *Grundleggjandi ásetingar í grein 3*

Tær grundleggjandi reglurnar, sum eru staðfestar í grein 3 í sáttmálanum, skulu brúkast sum grundarlag fyri tulkingini av øðrum ásetingum í sáttmálanum.

(a) Virðing fyri menniskjans íbornu tign, sjálvræði einstaklingsins og frælsi hjá tí einstaka at velja at vera óheftur av øðrum fólkum.
(b) Ikki fremja mismun
(c) Fult og virkið at kunna luttaka og vera partur av samfelagnum
(d) Virðing fyri, at menniskju eru ymisk, og viðurkenning av fólki, ið bera brek, sum ein liður í fjølbroytni millum manna,
(e) Eins møguleikar,
(f) Atkoma,
(g) Javnstøða millum menn og kvinnur,
(h) Virðing fyri framburðinum hjá børnum, ið bera brek, og virðing fyri rættindum hjá børnum, ið bera brek, at varðveita sín samleika.

Grein 3 er at rokna sum ein reyður tráður, ið gevur innlit í, hvussu greinirnar í sáttmálanum skulu tulkast og setast í gildi í tjóðarrætti. Tær grundleggjandi reglurnar í grein 3 geva eina fatan av, hvat dentur eigur at verða lagdur á, tá rættindi hjá teimum, ið bera brek, skulu betrast.

Grein 4 ásetir og lýsir nærri tær almennu skyldurnar, limalondini hava at virka fyri og seta í gildi politiskar ætlanir, lógir og umsitingarligar mannagongdir, sum hava sum endamál at verja tey rættindi, sum eru viðurkend í sáttmálanum.

***Grein 5 – Javnrættindi og eingin mismunur***

***Grein 5***

1. Limalondini viðurkenna, at øll fólk eru eins fyri og undir lógini og hava rætt til somu verju og sama gagn av lógini uttan mismun.

2. Limalondini skulu banna øllum mismuni, grundaður á brek, og tryggja fólk, ið bera brek, javnbjóðis og effektiva lógarverju ímóti mismuni, sama hvør grundin er.

3. Til tess at fremja javnrættindi og beina fyri mismuni skulu limalondini taka øll hóskandi stig at tryggja, at rímiligar tillagingar verða gjørdar.

4. Ávís átøk, sum eru neyðug fyri at skunda undir ella fáa í lag javnrættindi í roynd og veru fyri fólk, ið bera brek, skulu ikki verða mett sum mismunur sambært ásetingunum í hesum sáttmála.

Grein 5 er ein týðandi og savnandi grein, sum myndugleikar ætlandi altíð skulu hava atlit til, tá avgerðir skulu takast. Limalondini skulu sambært grein 5 seta úr gildi allar lógir, kunngerðir, mannagongdir og siðvenjur, ið sambært sáttmálanum eru at rokna sum mismunur vegna brek. Hetta er ein umfatandi og nýskapandi áseting, ið kann nýtast sum jarnbrot at beina burtur allan mismun í lóggávuverkinum vegna brek.

Grein 5, stykki 4 letur upp fyri, at til ber at geva teimum, ið bera brek, framíhjárættindi fyri at skunda undir ella fáa í lag javnrættindi. Hetta merkir, at metir eitt limaland tað neyðugt at seta lógir í gildi, ið geva teimum, ið bera

brek, sersømdir, so er hetta lógligt. Eitt dømi um hetta er lóg, ið ásetur, at øll arbeiðspláss yvir ávísa stødd **skulu hava fólk við breki í starvi.**

***Grein 6 – Kvinnur við breki***

Ásannandi, at kvinnur og børn, ið bera brek, eru lutfalsliga meira útsett, hevur sáttmálin serligar ásetingar um kvinnur og børn, ið bera brek.

Ásett er í grein 6, at limalondini skulu viðurkenna, at kvinnur og gentur, ið bera brek, eru fyri stórum mismuni, og í hesum sambandi skulu stig verða tikin at tryggja kvinnum og gentum, ið bera brek, framburð og forða fyri, at mismunur verður gjørdur vegna brek. Limalondini skulu eisini taka øll hóskandi stig at tryggja menning, framgongd og at geva kvinnum ávirkan við tí endamáli at borga fyri, at tær kunnu fremja og njóta tey mannarættindi og grundleggjandi frælsi, sum eru ásett í sáttmálanum.

Tað kann við fyrsta eygnakast tykjast undrunarsamt, at sáttmálin skal hava serligar ásetingar um rættindini hjá kvinnum og gentum, ið bera brek. Tá grundgevingarnar fyri hesi grein verða kannaðar nærri, gerst tað greiðari, hví tað er umráðandi at hava serlig atlit til kvinnur.

Eitt dømi, har kvinnur, ið bera brek, eru munandi verri fyri enn menn, er innan arbeiði. Altjóða arbeiðarafelagsskapurin, *International Labour Organization* (ILO), hevur sum høvuðsendamál at tryggja sosialt rættvísi, altjóða viðurkend arbeiðararættindi og mannarættindi. ILO hevur sambært teirra arbeiðssetningi eisini kannað arbeiðsviðurskiftini hjá teimum, ið bera brek. Kanningar hava staðfest, at sannlíkindini fyri, at menn, ið bera brek, hava ella fáa arbeiði, eru tvífald í mun til møguleikan hjá kvinnum, ið bera brek.

Harafturat eru kanningar eisini komnar eftir, at kvinnur, ið bera brek og eru í starvi, í nógv størri mun eru fyri mismuni. Hesin mismunur ger seg galdandi bæði áðrenn starvssetan og serliga aftaná. Í fleiri førum fáa tær lægri løn og verri møguleikar at koma til endurútbúgving og betri lønt størv, og tær eru sjáldan

partur av leiðsluni og verða hildnar uttanfyri, har avgerðirnar verða tiknar, *(Arthur O'Reilly)*.

Innan útbúgving, bústaðir, heilsu og viðgerðartilboð er tað eisini staðfest, at kvinnur og gentur eru fyri størri vanbýti enn menn. Tí hevur tað verið hildið neyðugt at hava eina grein, ið serliga staðfestir mannarættindi hjá kvinnum, ið bera brek.

## Kvinnur eru serliga útsettar

Sambært UNESCO (United Nations Educational, Scientific and Cultural Organization) fáa umleið 20 milliónir kvinnur brek, ímeðan tær eru við barn ella undir føðing.

***Grein 7 - Børn við breki***

Við tað, at børnum tørvar serliga verju, er ein grein avsett til børn, ið bera brek. Umframt at tryggja, at børn, ið bera brek, til fulnar kunnu njóta øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi á jøvnum føti við onnur børn, ásetir sáttmálin eisini, at allar avgerðir, ið viðvíkja børnum, ið bera brek, skulu verða tiknar við atliti at barnsins besta. Harafturat verður dentur lagdur á, at børnini skulu fáa møguleikan at koma til orðanna.

Endamálið og ásetingarnar í grein 7 eru at finna aftur í altjóða barnarættindasáttmálanum. Hóast rættindini partvíst eru endurgivin í hesum sáttmálanum, merkir hetta ikki, at altjóða barnarættindasáttmálin ikki er galdandi fyri børn, ið bera brek. Ásetingin í grein 7 er at rokna sum ein endurstaðfesting av verandi rættindum, sum eisini eru staðfest í barnarættindasáttmálanum.

Grundgevingarnar annars fyri, at hava serligar ásetingar um børn eru, at børn, ið bera brek, hava tað munandi truplari enn vaksin, og tískil hava tey brúk fyri verju, og at tað verður sett fokus á teirra rættindi.

## Børn, brek og menningarlond

90% av børnum, ið bera brek í menningarlondunum, fáa sambært UNESCO onga skúlagongd.

Flestu av greinunum frá 10 til 30 innihalda ásetingar um verandi borgarlig, mentanarlig, búskaparlig, politisk og sosial mannarættindi.

Ímeðan fleiri greinir eru ein endurstaðfesting av galdandi mannarættindum, innihalda nakrar greinir ásetingar um, hvussu og hvat limalondini skulu gera fyri at tryggja, at tey, ið bera brek, kunnu njóta mannarættindini á jøvnum føti og uttan mismun.

Greinir, ið áleggja limalondunum skyldur, ið ikki eru staðfestar í øðrum altjóða skjølum eru:

- Grein 8 - Hugburðsbroyting
- Grein 9 - Atkoma
- Grein 11 - Vandastøður og menniskjalig neyðstøða
- Grein 13 - Atkoma til rættarskipan
- Grein 20 - Rætturin til persónligt flytføri
- Grein 26 - Menning og endurmenning
- Grein 31 - Hagtals- og dátuinnsavning

### *Hugburðsbroyting - grein 8*

Ein av hornasteinunum í øllum arbeiði at betra um rættindini hjá teimum, ið bera brek, er hugburðsbroyting. Tað at fáa fólk at skilja, at eitt brek ikki er ein forðing, men at tað eru umstøðurnar, sum eru forðingarnar, og við at tillaga umstøðurnar detta forðingarnar burtur.

Grein 8 lýsir tær skyldur, limalondini hava til at fremja eina hugburðsbroyting. Limalondini skulu millum annað fara undir at seta í verk munagóð tiltøk, sum

virka skjótt, fyri at skapa hugburðsbroyting og meirvitan í øllum samfelagnum. Henda strembanin eftir hugburðsbroytingini skal ikki einans fara fram í tí almenna rúminum, men eisini millum manna á øllum stigum í samfelagnum.

## Hugburðsbroyting í øllum samfelagnum

Grein 8 inniheldur neyvar ásetingar um, hvussu tey einstøku londini skulu virka fyri og fremja eina hugburðsbroyting.

Tey einstøku londini skulu virka fyri at beina burtur vanamyndir, fordómar og aðrar skaðiligar siðvenjur, ið fólk hava um, hvat tað at bera eitt brek merkir.

Eitt nú skulu limalondini taka stig til at seta í verk og varðveita munagóð almenn kunningarátøk. Endamálið við hesum átøkum skal vera at læra fólk at virða rættindini hjá fólki, ið bera brek, og at virka fyri jaligari fatan og størri samfelagsligari viðurkenning av fólkum, ið bera brek. Harafturat skal boðskapurin vera, at fólk eru ymisk og at eitt brek eigur ikki at vera ein forðing fyri eini starvssetan ella øðrum, samfelagið hevur at bjóða.

Hugburðsbroytingin skal eisini inn í skúlarnar, og tí er ásett, at londini hava skyldu at ala fram á øllum stigum í útbúgvingarskipanini ein hugburð við virðing fyri rættindunum hjá fólki, ið bera brek.

Ein týðandi partur av gerandisdegnum hjá einum stórum skara av heimsins borgarum eru dagsins tíðindi. Fólk í øllum aldursbólkum og uttan mun, hvar tey eru frá, hava áhuga at fylgja við í tí, sum rørist í samfelagnum. Tí er tað umráðandi, og tað er eisini skyldan hjá londunum, at eggja øllum pørtum av fjølmiðlunum at mynda fólk, ið bera brek, á ein hátt, sum er í samsvari við endamálið í sáttmálanum. Her verður eisini hugsað um, at virðingin fyri lívinum og tignini hjá tí einstaka, ið ber brek, verður lýst jaliga.

Verður hugburðsbroytingin gjøgnumførd sambært ætlanunum í sáttmálanum, og fara limalondini at geva hesum ans, kann hugburðsbroytingin ivaleyst gerast ein

avgerandi partur, ið fer at geva sáttmálanum lív, soleiðis at hann verður meira sjónligur í gerandisdegnum og harvið ein natúrligur partur, tá nýggj lóggáva verður gjørd, og tá avgerðir verða tiknar.

Tað er hugsandi, at tess nærri teimum grundleggjandi høvuðsreglunum í sáttmálanum hugburðsbroytingin verður, tess minni verður tørvurin fyri nágreiniligari lóggeving, tí tá fara nógvir trupulleikar at vera loystir uttan um sjálva lóggávuna.

### *Atkoma – grein 9*

Rætturin til atkomu, sum er staðfestur í grein 9, er ein týðandi partur av teimum rættindum, ið sáttmálin ásetur. Atkoma, sum lýst í sáttmálanum, merkir meira enn tað, fólk vanliga hugsa um, koyristólin, ið ikki sleppur inn, tí trappurnar forða tí.

Meginásetingin í greinini er, at øll fólk, ið bera brek, skulu kunna liva sjálvstøðugt og taka fullan lut í øllum lívsins viðurskiftum, og málið verður nátt við at betra um atkomumøguleikarnar.

Til tess at náa hesum máli, skulu limalondini fara undir at tryggja atkomu á sama støði sum hjá teimum, ið ikki bera brek. Umframt atkomu til bygningar fevnir atkoma eisini um atkomu til umhvørvi, ferðamøguleikar, upplýsing og samskifti, íroknað kunningar- og samskiftistøkni og skipanir, og til aðrar veitingar og tænastur, sum eru tøkar hjá ella verða veittar almenningi.

Tað, sum limalondini skulu gera, er at eyðmerkja og burturbeina allar forðingar.

### Atkoma

Vit hava ikki líkarætt, fyrr enn samfelagið er eins fyri øll. MBF virkar fyri, at ongin skal verða settur uttanfyri í samfelagnum vegna brek, (av heimasíðuni hjá mbf).

Greinin ásetur ikki, hvussu nógv tey einstøku londini skulu gera fyri at kunna siga, at sáttmálin er uppfyltur. Tað vil vera upp til limalondini hvør sær at taka støðu til, í hvussu stóran mun tey fylgja ásetingini um atkomu fyri øll.

Tað, sum er vert at hava í huga í hesum sambandi, er, at øll limalondini skulu senda inn frágreiðingar annað hvørt ár um, hvat tey gera og ætla at gera fyri at fylgja sáttmálanum. Ein meting verður tá gjørd við útgangsstøði í tí einstaka limalandinum. Hjá summum londum skal meira gerast, og tað fer tískil at taka longri tíð, áðrenn allar forðingar eru burturbeindar, hjá øðrum londum verður tað allarhelst einfaldari. Avgerandi er, at londini hava eina ætlan og eru farin til verka.

### *Rætturin til persónligt flytføri - grein 20*

"*Tað er ikki brekið, ið er forðingin, men umstøðurnar*". Hetta er ein av hugsjónunum handan sáttmálan, ein hugsjón sum sæst aftur í fleiri greinum. Í grein 20 verður álagt limalondunum, við atliti til sjálvbjargni, at taka munadygg stig til at tryggja persónligt flytføri hjá fólki, ið bera brek.




*Ung folk, sum bera brek, luttaka á altjóða friðardegi*

Tað nyttar einki, at tað eru nógv tilboð til venjing, læru ella heilsuátøk, um tann, ið ber brek, ikki hevur møguleikan at koma til staðið.

Tí skulu limalondini lætta um flytføri hjá fólki, ið bera brek, á tann hátt og til ta tíð, tey ynskja, og fyri rímiligan kostnað, umframt gera tað møguligt at fáa fatur á flutningshjálpartólum og øðrum fyri ein rímiligan kostnað.

Harafturat skulu limalondini leggja áherðslu á at útbúgva fólk, sum arbeiða við fólki, ið bera brek, upplæring í flytførisdugnaskapi og eggja framleiðarum av flutningshjálpartólum, amboðum og hjálpartøkni at taka atlit til øll viðurskifti viðvíkjandi flytføri hjá fólki, ið bera brek.

Tá hjálpitól og annað verður bjóðað fram, skal tað í mest møguligan mun vera tann einstaki, ið skal avgera, hvørji amboð hóska best.

### *Menning og endurmenning - grein 26*

Í nærum øllum førum ber til at minka um avleiðingarnar av brekinum, um hvør einstakur fær møguleika at menna og endurmenna seg. Tí setur sáttmálin krav um, at hóskandi stig skulu takast fyri at *gera fólk, ið bera brek, før fyri at vinna sær og varðveita størst møguligt sjálvræði, fullan likamligan, sálarligan og vinnuligan førleika og fullan part og luttøku í øllum lívsins viðurskiftum*.

Til at røkka hesum máli skulu limalondini skipa, styrkja og víðka umfatandi menningar- og endurmenningartænastur og skipanir, serstakliga á heilsu-, starvs-, útbúgvingar- og almannaøkinum.

Tað er eisini staðfest í sáttmálanum, at umráðandi er at byrja so tíðliga sum gjørligt og byggja á tvørfakliga meting av persónligum tørvi og styrki.

### **Onnur rættindi teirra brekaðu og skyldur hjá limalondunum**

Av øðrum skyldum áleggur sáttmálin limalondunum at seta í gildi lóggávu og umsitingarligar mannagongdir, ið virka fyri mannarættindum hjá teimum, ið bera brek. Limalondini skulu eisini steðga allari siðvenju, ið er at rokna sum brot á hesi.

Tað er tí av stórum týdningi, at londini tryggja, at tað almenna hevur virðing og yvirheldur rættindini hjá teimum, ið bera brek. Hetta skal ikki skiljast soleiðis, at sáttmálin ikki er galdandi fyri tann privata sektorin, men tað almanna eigur at vera ein góð fyrimynd.

Ásannandi, at orsøkin til, at eitt brek kann gerast ein trupulleiki, hvørki er brekið ella tann, ið hetta brek ber, men umstøðurnar, leggur sáttmálin áherðslu á, at limalondini fara undir gransking og menning av vørum, tænastum og tøkni, ið eru til frama fyri tey, ið bera brek. Tað verður eisini álagt limalondunum at veita kunning til tey, ið bera brek, um, hvørji hjálpitól tey kunnu fáa.

Til tess at sjónligera sáttmálan og lýsa tey rættindini, ið hann inniheldur, skulu limalondini eggja teimum, ið arbeiða við fólki, ið bera brek, at fáa sær vitan um sáttmálan.

Ein týdningarmikil meginregla, ið varð nýtt ígjøgnum alla fyrireiking av sáttmálanum, var, at tey, ið bera brek, altíð skuldu luttaka virkið í tilgongdini at gera sáttmálan. Henda høvuðsregla er eisini staðfest í sáttmálanum, og skulu limalondini taka tey, ið bera brek, og teirra felagsskapir við uppá ráð tá umræður teirra viðurskifti. Tey skulu eisini hava møguleikan at luttaka aktivt, tá sáttmálin verður staðfestur í tjóðarrætti og gerð av lógum og annars, tá myndugleikar arbeiða við rættindunum hjá teimum, ið bera brek.

### Sáttmálin sum ein heild

Hvør einstøk grein skal skiljast sum ein partur av tí størri heildini. DØMI: Útbúgving (grein 24) skal vera uttan mismun (grein 5), tað skal vera møguligt hjá teimum, ið bera brek, at koma til eina útbúgving (grein 20), og útbúgvingin skal vera atkomulig fyri øll (grein 9).

### *Fátækradømi*

Hóast eingin grein í sáttmálanum beinleiðis hevur áseting um støðuna hjá teimum, ið bera brek í menningarlondunum, so er tað í hesum londunum, at tey,

ið bera brek, hava tær truplastu umstøðurnar. Sáttmálin hevur týdning fyri fólk, ið bera brek kring allan heimin, men tað er í menningarlondunum, at tær flestu broytingarnar skulu gerast, og hugburðsbroytingar skulu fremjast.

80% av heimsins borgarum, ið bera brek, búgva í menningarlondunum, tað er meira enn 400 milliónir. Verða tølini hjá teimum framkomnu londunum samanborin við menningarlondini, sæst, at tað er ein greiður samanhangur millum brek og fátækradømi. Í menningarlondum eru 80 til 90 % av teimum, ið bera brek, arbeiðsleys, har talið í teimum framkomnu londunum verður mett at vera millum 50% og 70%.

**Eftirlitsnevndin**

Við heimild í sáttmálanum verður ein eftirlitsnevnd sett at røkja rættindini hjá fólki, ið bera brek. Nevndin er mannað av serfrøðingum umboðandi ymiskar heimspartar.

Limalondini skulu við jøvnum millumbili lata nevndini víðfevnda frágreiðing um tey stig, ið tikin eru til at seta í verk ásetingarnar í sáttmálanum og frágreiðing um tey framstig, ið eru gjørd. Fyrsta frágreiðingin skal vera latin, áðrenn tvey ár eru liðin, eftir at sáttmálin er komin í gildi í tí einstaka landinum.

Nevndin skal síðani meta um tær ymisku frágreiðingarnar og koma við møguligum viðmerkingum og tilmælum til tey einstøku limalondini. Tað er ásett í sáttmálanum, at øll limalondini skulu samstarva við nevndina. Annaðhvørt ár skal nevndin leggja fram álit fyri Sameindu Tjóðum um hennara virksemi og koma við uppskotum og tilmælum, ið eru grundað á gjølligar kanningar av frágreiðingum og upplýsingum, ið limalondini eru komin við.

Endamálið við nevndini er, at sáttmálin ikki skal fáa møguleika at tagna burtur ella gerast óvirkin, men heldur vera eitt skjal í støðugari menning.

## Valfría protokollin

Undir fyrireikingini av sáttmálanum var semja um, at hóskandi var at hava eitt ískoyti til sjálvan sáttmálan. Tí var ein valfrí protokoll til sáttmálan endaliga samtykt saman við sáttmálanum. Hetta skjal er eisini ein altjóða sáttmáli, og kunnu tey londini, ið gerast partur av sjálvum sáttmálanum, avgera, um tey ynskja, at protokollin eisini skal vera galdandi.

Bert limalond, ið eru partar av sáttmálanum, kunnu gerast partur av protokollini.

### *Borgarin kann klaga heimlandið beinleiðis*

Vanliga eru altjóða sáttmálar einans galdandi millum lond, og hava borgarar í teimum ymisku limalondunum ikki møguleika at taka ósemjur beinleiðis til ST.

Protokollin brýtur við hendan sið og gevur tí einstaka borgaranum í tí landinum, har protokollin er galdandi, møguleika at klaga beinleiðis til eftirlitsnevndina *(Committee on the Rights of Persons with Disabilities)*. Umframt einstaklingar kunnu felagsskapir vegna borgarar eisini brúka henda rættin.

Protokollin gevur tessvegna borgarum í teimum londum, har hon er galdandi, ein kæru møguleika afturat verandi møguleikum, sum eru í tí einstaka landinum. Áðrenn ein klaga verður viðgjørd av eftirlitsnevndini, skulu nøkur krøv vera uppfylt. Eitt av krøvunum er, at borgarin hevur troytt øll rættarstigini í landinum, áðrenn hann sendir sínar klagu til eftirlitsnevndina.

Tá eftirlitsnevndin hevur móttikið eina klagu, verður málið kannað nærri, og samskifti verður tikið upp við limalandið, sum er klagað. Niðurstøðan av kanningini verður send til borgaran, ið hevur klagað, og limalandinum við møguligum viðmerkingum og tilráðingum. Eftirfylgjandi verða møguligar viðmerkingar og tilráðingar gjørdar almennar.

Hóast skjalið gevur eftirlitsnevndini heimild at viðgera klagur og koma við tilráðingum, so kann nevndin ella annar stovnur undir ST ikki við heimild í sáttmálanum ella protokollini á nakran hátt revsa eitt limaland.

***Kanningar um illgruni er um grov og miðvís brot á sáttmálan***

Harafturat gevur valfría protokollin nevndini heimild at seta kanningar í verk, um illgruni er um grov og miðvís brot á sáttmálan.

Kemur nevndin í samband við álítandi og illgrunasamt tilfar um, at eitt limaland, ið er fevnt av protokollini, fremur grov og miðvís brot á sáttmálan, hevur nevndin heimild at seta kanningar í verk. Nevndin heitir tá á limalandið um at koma við eini frágreiðing um støðuna og svara aftur ákærunum. Um limalandið tekur undir við tí, kann nevndin velja at vitja landið fyri at kanna málið nærri.

Eftir at hava viðgjørt tilfarið frá limalandinum og annað álítandi tilfar, kann nevndin útnevna ein ella fleiri av limunum í nevndini at standa fyri einari gjølligari kanning av tilburðinum og at koma við eini frágreiðing.

Eitt land, sum er partur av protokollini, kann velja, at tann parturin í protokollini, ið snýr seg um hesar kanningarnar, ikki skal vera galdandi, sí grein 8 í protokollini.

**Føroyska støðan**

Stutt eftir, at sáttmáin var liðugt viðgjørdur í ST høpi, byrjaðu fólk og felagsskapir, ið varða av teimum, ið bera brek, at vísa á, at sáttmálin átti at verið settur í gildi í Føroyum.

Tað gekk heldur ikki long tíð, so boðaði politiski myndugleikin frá, at ætlanin var at staðfesta sáttmálan og seta hann í gildi í Føroyum. Hetta var millum annað umrøtt av løgmanni í Ólavsøkurøðunum til Føroya Løgting í bæði 2007 og 2008.

Á heystið 2007 setti løgmaður ein arbeiðsbólk at fyrireika Føroyar at gerast partur av sáttmálanum. Arbeiðsbólkurin var mannaður við umboðum frá miðfyrisitingini og tveimum umboðum frá Meginfelagnum teirra Brekaðu. Arbeitt varð miðvíst, og í januar 2009 var arbeiðið hjá bólkinum komið so mikið ávegis, at ávegis álit var skrivað, sum landsstýrismaðurin í Uttanríkismálum legði fyri landsstýrið. Landsstýrismaðurin fekk fullan stuðul frá restini av landsstýrinum at arbeiða víðari við fyrireikingunum at seta sáttmálan í gildi.

Í apríl 2009 bar landsstýrismaðurin uppskot til samtyktar um at seta sáttmálan og protokollina í gildi fyri Føroyar í Løgtingið, og tann 13. mai 2009 samtykti eitt einmælt Løgting, at sáttmálin og protokollin skuldu setast í gildi fyri Føroyar.

Áðrenn sáttmálin fær gildi við altjóða virknað í Føroyum, skulu danskir myndugleikar boða Sameindu Tjóðum frá, at sáttmálin og protokollin eisini skulu fevna um Føroyar.

**Protokollin í gildi í Føroyum, men ikki í Danmark**
Protokollin verður ikki sett í gildi í Danmark, og hevur danska *Vælfærdsministeriet* upplýst politisku skipanini í Føroyum, at grundin til, at protokollin ikki verður sett í gildi í Danmark, er, at danir meta, at teir kunnu tryggja sínum borgarum full rættindi samsvarandi sáttmálanum í nationalari lóggávu, og tí er ikki neyðugt við protokollini.

Eftirsum Danmark hevur avgjørt ikki at gerast partur av protokollini, kann eitt áhugavert politiskt og juridiskt eftirspæl koma millum danskar og føroyskar myndugleikar hesum viðvíkjandi.

Hetta tí Danmark er nú komið í tað løgnu støðu, at Danmark má boða Sameindu Tjóðum frá, at sáttmálin skal setast í gildi í Danmark, uttan at fyrivarni skal takast fyri Føroyar, men at protokollin skal setast í gildi í Føroyum við fyrivarni fyri Danmark.

Vanliga orðingin, sum Danmark sambært Hoyvíkssáttmálanum brúkar um

Føroyar í altjóða høpi er, *Kongeriget Danmark, for så vidt andgår Færøerne*. Ein kann tí ivast, um Danmark í hesum serliga føri fer at boða Sameindu Tjóðum frá, at protokollin skal setast í gildi fyri Danmark, men við fyrivarni fyri *Kongeriget Danmark for så vidt angår Danmark og Grønland*.

Av stjórnarligum orsøkum kann hugsast, at danskir myndugleikar ikki vilja boða Sameindu Tjóðum frá um støðu Føroya til protokollina og harvið forða fyri, at protokollin kann koma í gildi fyri Føroyar.

Verða danskir myndugleikar ikki at góðkenna, at Føroyar kunnu gerast partur av protokollini, ið er at roknað sum ein altjóða sáttmáli, við teirri grundgeving, at Danmark ikki er partur, kann hetta koma at standa sum dømi um, at Ríkisfelagsskapurin millum Danmark og Føroyar ikki verður mettur av Danmark at vera millum javnbjóðis partar.

**Orðið: "Human Rights"**

Í sambandi við greinasavnið hava greinaskrivararnir umrøtt, hvørt orðið "mannarættindi" ella orðið "menniskjarættindi" skuldi nýtast fyri enska orðið "human rights".

Hyggja vit í donsk-føroysku orðabókina undir "menneskerettigheder" kunnu bæði orðini "mannarættindi" og "menniskjarættindi" nýtast.

Grundgevingar fyri at nýta orðið "mannarættindi" eru, at orðið "manna-" merkir "menniskja-" á føroyskum. Orðið verður nýtt í fleiri samanhangum merkjandi menniskja, sosum: mannamúgva, mannabarn, manngjørdur, mansaldur, osfr. Eisini er orðið "mannarættindi" tað orðið, ið vanliga verður nýtt í almenna orðaskiftinum í Føroyum. Orðið er greitt skilmarkað, er væl innarbeitt og hevur langa hevd í málinum.

Grundgevingar fyri at nýta orðið "menniskjarættindi" eru, at orðið "mannarættindi" bert fevnir um rættindi hjá monnum, ikki rættindi hjá kvinnum og børnum. Á

enskum verður orðið “human rights” nýtt, og á donskum, norskum, og svenskum verður orðið “menneskerettigheder” nýtt. Hesi orð eru dekkandi fyri rættindi hjá øllum menniskjum. Tað er bert ein hugburðsbroyting, ið skal til, fyri at vit í Føroyum eisini kunnu nýta hetta orðið.

Umrøðan av, hvørt orðið skal nýtast, er ikki bert ein umrøða, ið hevur verið í Føroyum, men ein umrøða, ið hevur verið um allan heim og longu byrjaði í Sameindu Tjóðum í 1945. Í sambandi við gerð av “The Universal Declaration on Human Rights” varð ætlanin at nýta orðingina: “all men are born equal ..”, men eftir drúgva umrøðu varð hetta heitið broytt til: “all human beings are born equal ...”. Hetta júst av somu orsøk, at hetta vóru rættindi fyri øll menniskju.

Hetta kann vera eitt íkast til umrøðuna frameftir av, hvat orðið skal nýtast. Flestu greinaskrivararnir hava í hesi bók nýtt orðið “mannarættindi”.

# Orðalisti

| | |
|---|---|
| Aðalfundur Sameindu Tjóða / Aðalfundurin | The General Assembly |
| Aðalskrivari Sameindu Tjóða / Aðalskrivarin | The Secretary General |
| Aðalskrivstovan | The Secretariat |
| Aljóða Arbeiðarafelagsskapurin | The International Labour Organization (ILO) |
| Altjóða Dómstólurin | The International Court of Justice (ICJ) |
| Altjóða mannarættindalóggáva | International Human Rights Law (IHRL) |
| Altjóða mannarættindalógin | The International Bill of Human Rights (IBHR) |
| Altjóða Matvøru og Landbúnaðar felagsskapurin | The Food and Agriculture Organization (FAO) |
| Altjóða sáttmáli | Convention |
| Altjóða Sjóferðslufelagsskapurin | The International Maritime Organization (IMO) |
| Altjóða rættur/altjóða lóg | International Law |
| Barnarættindasáttmálin | The Convention on the Rights of the Child (CRC) |
| Búskapar- og Almannaráðið | The Economic and Social Council (ECOSOC) |
| Europeiski mannarættindasáttmálin | The European Convention on Human Rights (ECHR) |
| Formælið | The Preamble |
| Fólkasamgonga | Leauge of Nations |
| Frágreiðingar | Reports |
| Fremjan innlendis (Implementering) | Implementation |
| Fyrivarni | Reservation |
| Gildiskoma | Entry into force |
| Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um Mannarættindi | The Universal Declaration of Human Rights |

| | |
|---|---|
| Ikki-stjórnarfelagsskapir | Non Governmental Orginazation (NGO) |
| Kvinnurættindasáttmálin | Convention on the Elimination of Discrimination Against Women (CEDAW) |
| Limaríkir / Limalond | Member States |
| Løgskjalið fyri Altjóðadómstólin | The Statute of the International Court of Justice |
| Mannarættindakommisiónin | The Commission on Human Rights |
| Mannarættindanevndin | The Human Rights Committee |
| Mannarættindaráðið | The Human Rights Council |
| Mannarættindasáttmálarnir frá 1966 | The International Covenant on Civil and Political Rights (ICCPR) & The International Covenant on Economic, Social and Cultural Rights (ICESCR) |
| Mannarættindi / Menniskjarættindi | Human Rights |
| Nevndin fyri barnarættindum | The Committee on the Rights of the Child (CRC) |
| Nevndin fyri Búskapar-, Almanna- og Mentanarrættindi | The Committee on Economic, Social and Cultural Rights (CESCR) |
| Nevndin fyri støðuni hjá kvinnum | The Commission on the Status of Women |
| Píning | Torture |
| Protokol | Protocol |
| Sameindu Tjóðir (ST) | United Nations (UN) |
| Sáttmálin móti píning/ ST-sáttmálin móti píning og aðrari grimari, ómenniskaligari ella niðrandi viðferð ella revsing | Convention Against Torture and Other Cruel, Inhuman or Degrading Treatment or Punishment |

| | |
|---|---|
| Sáttmálin um rættindi teirra brekaðu | Convention on the Rights of Persons with Disabilities |
| Semingur | Covenant |
| Sjálvsavgerðarrættur | The Rights to Self determenation |
| Setan úr gildi | Denunciation |
| Skugga frágreiðing | Shadow Report |
| Staðfesting | Ratification |
| Staðfestingarskjalið | The Instrument of Ratification |
| Stjórin í fyrisitingini hjá altjóðaskrivstovuni | Registrar |
| Stovningarskjal Sameindu Tjóða | The United Nations Charter |
| ST-Sáttmálin/Semingurin um búskapar-, almanna- og mentanarrættindi | The International Covenant on Economic, Social and Cultural Rights (ICESCR) |
| ST-Sáttmálin/Semingurin um borgalig og politisk rættindi | The International Covenant on Civil and Political Rights (ICCPR) |
| Sýtingarrættur | Veto |
| Terroritalt fyrivarni | Territorial reservation |
| Tilsjónarráðið | Trusteeship Council |
| Tjóðarlóggáva/Innlendislóggáva | National law |
| Trygdarráðið | Security Council |
| Undirritan | Signature |
| Valfrí/sjálvboðin protokol | Optional Protocol |
| Yvirlýsing | Declaration |

# Keldulisti

## Sameindu Tjóðir: Herluf Sigvaldsson

### Bókmentir

Baylis, John and Steve Smith (2001). *The Globalization of World Politics – An introduction to international relations.* Oxford: Oxford University Press.

Kissinger, Henry (1994). *Diplomacy.* London: Simon & Schuster.

Muldoon, J. P. Jr; Aviel, J. F.; Reitano, R. and Sullivan, E. (1999) *Multilateral Diplomacy and the United Nations Today.* Boulder: Westview Press.

Walter, Barbara F. & Snyder, Jack (1999). *Civil Wars, Insecurity, and Intervention.* New York: Columbia University Press.

### Leinkjur

www.un.org

## Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi: Halgir W. Poulsen

### Bókmentir

Eide Asbjørn o.fl. (1992). *The Universal Declaration of Human Rights: A Commentary*, Scandinavian University Press (Universitetsforlaget A/S), Oslo

*Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um Mannarættindi Fimti ár* Amnesty International, Føroya deild, 1998

Malcolm D. Evans (ed.) (2003). *International Law*, Oxford University Press, Oxford/New York

Johannes Morsink (1999). The Universal Declaration of Human Rights. Origins, Drafting, and Intent, University of Pennsylvania Press, Philadelphia

Robertson A.H. & J.G. Merrills (1994). *Human Rights in the World*, Manchester University Press, Manchester and New York, 3. útg.

Sieghart Paul (1986). *The Lawful Rights of Mankind. An Introduction to the International Legal Code of Human Rights,* Oxford University Press, Oxford/New York

**Altjóða rættur og staðfesting av altjóða sáttmálum: Birita Ludvíksdóttir**

**Lógir v.m.**

- Lov nr. 169 af 5. juni 1953: danmarks riges grundlov

- Færø Amts kundgørelse nr. 11 af 31. marts 1948 af lov om Færøernes Hjemmestyre

- Løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan føroya / om færøernes styrelsesordning.

- Lov nr. 579 frá 24. juni 2005 om færøernes landsstyres indgåelse af folkeretlige aftaler, og Lóg nr. 80 frá 14. mai 2005 um altjóðarættarligu sáttmálar føroya landsstýris at gera

- Lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka

- Tingskipan Løgtingsins, samtykt á løgtingi1. juni 1995 og broytt 15. mai 1996, 23. apríl 1999, 2. mai og 14. desember 2007 og 31. mai 2008

## Bókmentir

*Akehursts Modern Introduktion to International Law,* seventh revised edition by Peter Malanczuk, 1997

Kap. 3 og 9

Rigsombudsmanden på Færøerne, Beretning – 2007

## ST-mannarættindasáttmálarnir frá 1966: Birita Ludvíksdóttir

**Sáttmálar, protokollir v.m.**

International Covenant on Civil and Political Rights, New York, 16. desember 1966

International Covenant on Economic, Social and Cultural Rights, New York, 16. desember 1966

Optional Protocol to the International Covenant on Civil and Political Rights, New York, 16. desember 1966

Second Optional Protocol to the International Covenant on Civil and Political Rights, aiming at the abolition of the death penalty, New York, 15. desember 1989

Revised Draft Optional Protocol to the International Covenant on Economic, Social and Cultural Rights, April 2008

Fourth periodic reports of States Parties due in 1998:
International Covenant on Civil and Political Rights
Denmark, 22 february 1999

Concluding observations of the Human Rights Committee:
Denmark, 31. october 2000

Fourth periodic reports submitted by States Parties under articles 16 and 17 of the covenant:
Imlementation of the International Covenant on Economic, Social and Cultural Rights
Denmark, 28. mars 2003

Concluding observations of the Committee on Economic, Social and Cultural Rights:
Denmark, 14. December 2004

Human Rights Council 8. session document, May 2008: Promotion and Protection of all Human Rights, Civil Political, Economic, Social and Cultural Rights, including the Right to Development

Fact Sheet No. 2 (Rev. 1), The International Bill of Human Rights
Printed at United Nations, Geneva, June 1996

Fact Sheet No. 15 (Rev. 1), Human Rights: Civil and Political Rights: The Human Rights Committee,
Printed at United Nations, Geneva, May 2005

Fact Sheet No. 16 (Rev. 1), The Committee on Economic, Social and Cultural Rights
Printed at the United Nations, Geneva, July 1991

**Bókmentir**

*Akehursts Modern Introduktion to International Law*, seventh revised edition by Peter Malanczuk, 1997
(kap. 14)

The United Nations and Human Rights 1945-1995, Department of Public Information
United Nations, New York, 1995

H*eimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um Mannarættindi Fimti Ár*, Amnesty International Føroya deild, 1998

**Leinkjur**

Sáttmálatekstirnir, protokollir, kunning um nær sáttmálarnir eru undirskrivaðir og staðfestir, hvørji lond hava staðfest v.m. er at finna á heimasíðuni hjá ST: http://treaties.un.org
Vel: **Status of Treaties**
Vel síðani: Kap. IV: Human Rights

Danskar rapportir til ST um 1966 konventiónirnar frá heimasíðuni hjá danska Uttanríkismálaráðnum: http://www.um.dk

Aðrar áhugaverdar heimasíðir:
http://www.bayefsky.com
http://www.un.org
http://www.unric.org
http://unbisnet.un.org

## CEDAW – menniskjarættindi fyri kvinnur: Kristianna W. Poulsen

**Sáttmálar, protokollir v.m.**

Convention on the Eliminiation of Discrimination Against Women (CEDAW), New York 18 December 1979

Optional Protocol to Convention on the Eliminiation of all Forms of Discrimination Against Women, New York 6 October 1999

Concluding comments of the Committee on the Elimination of Discrimination against Women:
Denmark, dagfest 25. august 2006.

**Bókmentir**

Dansk Kvindesamfund: CEDAW – FNs Kvindekonvention, greinasavn, Danmark 2007

Ketscher, Kirsten: Kvindekonventionen CEDAW og dens placering i international og dansk ret, Dansk Kvindesamfund 2006

Schopp-Schilling, Hanna Beate og Flinterman, Cees: The Circle of Empowerment, The Feminist Press 2007

Steiner Henry J. og Alston, Philip: International Human Rights in Context. Law, Politics, Morals, Oxford University Press 1996

Uttanríkisráðið í Danmark: Seventh Periodic Report by the Government of Denmark on Implementation of the Convention on the Elimination of All Forms of Discrimination against Women, mai 2008 (sí www.um.dk)

**Leinkjur**

http://www.un.org/womenwatch/daw/cedaw/reservations-country.htm

Á heimasíðuni http://tb.ohchr.org/default.aspx, ber til at finna skjøl, ið viðvíkja CEDAW í Danmark. Her finnast eisini skjøl, ið viðvíkja Føroyum. Fyrstu skjølini, ið viðvíkja Føroyum, eru frá 2002.

CEDAW-sáttmálin er at finna á http://www.un.org/womenwatch/daw/cedaw/cedaw.htm

Almenna føroyska CEDAW-frágreiðingin umframt skuggafrágreiðingin hjá Javnstøðunevndini, báðar frá 2008, eru at finna á heimasíðuni hjá føroyska uttanríkisráðnum, sí leinkju http://www.mfa.fo/Default.aspx?ID=6589&M=News&PID=9447&NewsID=1845
Sí hvørji fyrivarni verða tikin av teimum einstøku londunum:
http://www.un.org/womenwatch/daw/cedaw/reservations-country.htm

Á http://tb.ohchr.org/default.aspx ber til at finna skjøl, ið viðvíkja CEDAW í Danmark. Her finnast eisini skjøl, ið viðvíkja Føroyum. Fyrstu skjølini, ið viðvíkja Føroyum, eru frá 2002.

Viðmerkingar sum CEDAW-nevndin í 2006 gjørdi um, hvussu CEDAW-sáttmálin verður hildin í Danmark og í Føroyum eru at finna á http://tb.ohchr.org/default.aspx. Sí skjalið *Concluding comments of the Committee on the Elimination of Discrimination against Women: Denmark*, dagfest 25. august 2006.

Tilmæli nr. 19 hjá CEDAW-nevndini, sum snýr seg um harðskap móti kvinnum er at finna á http://www.un.org/womenwatch/daw/cedaw/recommendations/recomm.htm

Á www.kvinnuhusid.fo finnast hagtøl um gistingar og áheitanir til Kvinnuhúsið.

## Sáttmálin móti píning: Annika Sølvará

**Sáttmálar, protokollir v.m.**

The Convention against Torture and Other Cruel, Inhuman or Degrading Treatment or Punishment, New York 10 December 1984

Optional Protocol to The Convention against Torture and Other Cruel, Inhuman or Degrading Treatment or Punishment, New York 18 December 2002

**Bókmentir**

Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um Mannarættindi Fimti ár Amnesty International, Føroya deild 1998

**Leinkjur**

www.amnesty.fo

www.amnesty.dk

www.amnesty.org

www.irct.dk

www.ohchr.org

Um áhugi er fyri at vita meira um píning og arbeiðið við at fyribyrgja píning, t.d. í sambandi við uppgávuskriving, kann viðmælast at byrja á hesum síðunum:

Les um arbeiðið hjá Amnesty International at fyribyrgja píning, m.a við einum 12 punkts programmi – danska síðan: http://www.amnesty.dk/default.asp?page=967&lang=da

Les um arbeiðið hjá IRCT – International Rehabilitation Council for Torture Victims: http://www.irct.org/

Felagsskapurin CINAT er ein paraply av NGO felagsskapum, sum í felag arbeiða fyri at steðga píning. Les meira á:
http://www.apt.ch/cinat/

Les ST- sáttmálan móti píning í fullum líki á enskum:
http://www.unhchr.ch/html/menu3/b/h_cat39.htm
ella donskum:
http://www.amnesty.dk/default.asp?page=730&lang=da

Les, hvør hevur staðfest sáttmálan:
http://www2.ohchr.org/english/bodies/ratification/9.htm

Les hvør hevur staðfest ískoyti:
http://www2.ohchr.org/english/bodies/ratification/9_a.htm

Les Optional Protocol á enskum - OPCAT:
http://www.unhchr.ch/html/menu2/6/cat/treaties/opcat.htm

Les hvør hevur staðfest protokollina:
http://www2.ohchr.org/english/bodies/ratification/9_b.htm

## Altjóða sáttmálin um barnarættindi: Firouz Gaini

**Sáttmálar, protokollir v.m.**

Barnarættindasáttmálin – Convention on the Rights of the Child (CRC) (Bekendtgørelse nr. 6 af 16. januar 1992 af FN-konvention af 20 november 1989 om Barnets Rettigheder)

Protokol til sáttmálan
(Bekendtgørelse nr. 30 af 28. november 2002 af valgfri protokol af 25. maj 2000 til FN-konventionen om Barnets Rettigheder vedrørende inddragelse af Børn i væbnede konflikter)

Lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 99 frá 1. november 2007

Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007
Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006

Løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung

**Bókmentir**

Føroyski parturin (útkast) av ríkisfrágreiðingini viðvíkjandi barnarættindum 2008

Mál og Vegir. Frágreiðing hjá Landsstýrinum um Visión 2015 (2007)

Um rættindi hjá børnum og ungum (tveir faldarar til fólkaskúlaundrivísing, Barnabati 2006)

**Leinkjur**

www.amnesty.dk

www.bvs.fo (Barnaverndarstova Føroya)

www.2ohchr.org (Office of the United Nations High Commissioner for Human Rights)

www.logir.fo (Lógarsavn)

www.redbarnet.dk

www.unicef.org

Aðrar keldur:

Samrøða við Hallberu West (ráðgevi á Almanna- og Heilsumálaráðnum)

**Altjóða sáttmálin um rættindi teirra brekaðu (Greinaskrivari: Heðin D. Poulsen)**

**Sáttmálar, protokollir, løgtingsmál v.m.**

The Convention on the Rights of Persons with Disabilities, New York 13 December 2006

Optional protocol to the Convention on the Rights of Persons with Disabilities, New York 13 December 2006

General Assembly resolution 56/168 of 19 December 2008 Optional protocol to the convention on the rights of persons with disabilities

General Assembly resolutin on the standard rules on the Equalization of Opportunities for persons with Disabilities. resolution 48/96, annex, of 20 December 1993 (FN's standardregler om lige muligheder for mennesker med handicap).

Løgtingsmál nr. 162/2008 Uppskot til samtyktar um at seta í gildi fyri Føroyar Sáttmála Sameindu Tjóða frá 13. desember 2006 um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek

Løgtingsmál nr. 163/2008 Uppskot til samtyktar um at seta í gildi fyri Føroyar Sjálvboðið Frumskjal til Sáttmála Sameindu Tjóða frá 13. desember 2006 um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek

Fyrimyndarreglur um Javnar møguleikar fyri fólk, ið bera brek, útgivið á føroyskum í 1999 av Almanna- og Heilsumálastýrinum
Ólavsøkurøða løgmans (Jóannes Eidesgaard) árið 2007 og 2008
Bókmentir
Arthur O'Reilly (2003). "Employment Barriers for Women with Disabilities" in "The Right to Decent Work of Persons with Disabilities" IFP/Skills Working Paper No. 14. International Labour Organization.

## Leinkjur

http://www.handicap.dk/politik/rettigheder/fn-konventionen/historien

http://www.mfa.fo/Default.aspx?ID=6589&M=News&PID=9440&NewsID=1883

http://www.mbf.fo/Default.aspx?pageid=949

http://www.un.org/disabilities/default.asp?id=33

http://www.ilo.org

http://www.mbf.fo

## Høvundar:

- Annika Sølvará, cand.mag. í enskum og søgu. Stjóri fyri Granskingarráð Føroya síðani desember 2007. Hevur verið í nevndini í AIFO 1999-2007, forkvinna 2001-2007. Er samskipari av Skriva fyri Lívi netverkinum.

- Birita Ludvíksdóttir. Løgfrøðiligt embætisprógv frá Universitetinum í Keypmannahavn, 1997. LLM í altjóða rætti frá Universitetinum í Southampton, 2001. Hevur starvast sum løgfrøðingur í Almanna- og heilsumálaráðnum frá 1996 til 2004, og síðani 2004 sum løgfrøðiligur ráðgevi hjá Løgtingsins Umboðsmanni. Hevur verið í nevndini í Amnesty International Føroya deild frá 2007 til 2009.

- Firouz Gaini, PhD í antropologi. Lektari á Føroya Læraraskúla, ið er partur av Fróðskaparsetur Føroya. Nevndarformaður í AIFO 2007-09. Skrivar javnan greinar um mannarættindamál.

- Heðin D. Poulsen, løgfrøðiligt embætisprógv frá Universitetinum í Aberdeen, 1999. LLM í altjóða sjóvinnurætti frá Universitetinum í Southampton, 2001. Danska Advokatútbúgving, 2004. Løgfrøðiligur ráðgevi hjá Meginfelag teirra brekaðu og arbeiðir sum dagligur leiðari á Tryggingarfelagnum Føroyar.

- Herluf Sigvaldsson, aðalstjóri í Uttanríkisráðnum og MSSc frá Lærda Háskúlanum í Lund við serfrøði í heimspolitikki

- Halgir Winther Poulsen, advokatur, løgfrøðiprógv í 1964 frá Keypmannahavnar universiteti, MA í 1997 í Understanding and Securing Human Rights frá University of London. Hevur verið í nevndini í Amnesty International, Føroya deild frá 1977-1989, formaður 1983-1989.

- Kristianna Winther Poulsen, cand. mag og MSc. Forkvinna í Javnstøðunevndini síðani apríl 2008.



Bókin viðger mannarættindi úr mentanarligum, sosialum, búskaparligum, politiskum og løgfrøðiligum sjónarhornum. Bókin er tann fyrsta av sínum slagi á føroyskum, og kann hon tí verða eitt týdningarmikið íkast til føroyska kjakið um mannarættindi framyvir. Greinirnar eru skrivaðar av føroyskum serfrøðingum, ið hava fakligar og praktiskar royndir í altjóða mannarættindaspurningum. Heldur enn at týða útlendska bókaútgávu hevur Amnesty International Føroya deild valt at skapa eitt sjálvstøðugt verk, ið hóskar til føroyskar lesarar og føroysk samfelagsviðurskifti anno 2009.

Átta kapitlar eru í bókini, og teir taka lesaran á ferð ígjøgnum ST-stovnin og útvaldar mannarættindasáttmálar.

Bókin er serliga ætlað teimum, ið eru á hægsta stigi í miðnámsskúlum og á byrjanarstigi á hægri lærustovnum. Eisini er bókin væl egnað sum bakgrundslesnaður hjá fjølmiðlum og starvsfólki í umsitingini, ið starvast við mannarættindum.

Greinasavnið er harumframt kærkomið hjá øllum, ið vilja ogna sær størri og neyvari innlit um altjóða mannarættindaviðurskifti.

AMNESTY INTERNATIONAL

fróðskapur

Faroe University Press
Tórshavn 2009

ISBN 978-99918-65-28-7

9 789991 865287